# Leiðreglur um skipan og leiðslu á einum skaðastaði

November 2020

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond
100 Tórshavn
Telefon: 35 30 30
Telefax: 35 30 35
Teldupost: fisk@fisk.fo
www.fisk.fo

Útgáva: 1 – November 2020

# FORMÆLI

Vit hava ikki fyrr havt leiðreglur um skipan og leiðslu á einum skaðastaði galdandi fyri Føroyar. Niðurlagdi stovnurin *Brunaumsjón Landsins* gjørdi í síni tíð mannagongdir fyri skipan av einum skaðastaði, mannagongdir fyri samskiftið á einum skaðastaði og eina reglugerð fyri brunaumsjónarmenn. Annars hevur mann yvirskipað hildið seg til tær leiðreglur, ið eru lýstar í danska ”Retningslinjer for indsatsledelse”.

Í 2012 fingu vit í Føroyum eina nýggja tilbúgvingarlóg, har heimild var givin Landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum at seta í gildi leiðreglur um skipan og leiðslu á einum skaðastaði.

Hetta er ein roynd at gera eitt samlað yvirlit yvir, hvussu eitt átak á landi skal skipast í samband við ein skaðatilburð, bæði tá talan er um eitt lítið átak, men serliga tá ið eitt átak verður so stórt, at fleiri myndugleikar gerast partar av átakinum. Hóast hesar leiðreglur í ein vissan mun líkjast teimum donsku, so verður hildið, at tað var alneyðugt at hava leiðreglur, ið eru serstakar fyri Føroyar og sum lýsa, hvussu føroyska tilbúgvingin skal virka í einum føroyskum samanhangi.

Hesar leiðreglur verða settar í gildi fyri at betra tvørfakliga samstarvið millum partarnar, ið hava ein leiklut í einum tilbúgvingarátaki og fyri at tryggja, at eitt átak verður skipað á best møguligan hátt.

Hóast hesar leiðreglur sum útgangsstøði lýsa samstarvið á taktiskum og operationellum stigi, verður stutt komið inn á samlaðu kreppustýringina í sambandi við stórar tilburðir.

Ætlanin er, at hesar leiðreglur javnan skulu endurskoðast, soleiðis at tillagingar verða gjørdar so hvørt eftirmetingar av stórum átøkum vísa okkum, hvat kann verða gjørt betur og smidligari.

Vegna Fiskimálaráðið

Rógvi Reinert,
aðalstjóri

# Innihaldsyvirlit

**1 Yvirskipað viðurskifti ... 5**
1.1 Alment ... 5
1.2 Grundreglur fyri tilbúgvingina í Føroyum ... 6
1.3 Samskipan og átaksleiðsla ... 9

**2 Lýsing av eindunum í tilbúgvingini ... 11**
2.1 Politiið ... 11
2.1.1 Alment ... 11
2.1.2 Politiøkini ... 11
2.1.3 Ríkispolitiið ... 13
2.2 Kommunala tilbúgvingin ... 13
2.2.1 Alment í samband við kommunala tilbúgvingin ... 13
2.2.2 Kommunala tilbúgvingin ... 14
2.2.3 Landstilbúgvingin í samband við tilburðir á landi ... 17
2.3 Heilsutilbúgvingin ... 18
2.3.1 Alment ... 18
2.3.2 Sjúkrahústilbúgvingin ... 19
2.3.3 Landslæknin ... 20
2.4 Basing av dálking við vandamiklum evnum ... 21
2.4.1 Alment ... 21
2.4.2 Tann kommunala umhvørvisdeildin ... 23
2.4.3 Umhvørvismyndugleiki landsins ... 23
2.4.4 CBRNE - Serfrøðitilbúgving ... 23
2.5 Verjan ... 24
2.5.1 Alment ... 24
2.5.2 Vanlig hjálp ... 25
2.5.3 Serlig hjálp til politiið ... 25
2.5.4 Lóðurruddingartilbúgvingin ... 25
2.6 Havumhvørvistilbúgvingin ... 26
2.7 Leiting og bjarging (SAR) ... 27
2.7.1 Alment ... 27
2.7.2 SAR-átøk ... 28
2.7.3 Aðrar bjargingaruppgávur ... 29
2.8 Eldur umborð á skipi til havs ... 29
2.9 Aðrir partar í tilbúgvingarhøpi ... 30
2.9.1 Aðrir myndugleikar ... 30
2.9.2 Privatar fyritøkur ... 31
2.9.3 Einstaklingar og sjálvboðin ... 32
2.10 Altjóða hjálp ... 33
2.10.1 Altjóða avtalur ... 34
2.10.2 Umbøn og samskipan ... 34

3 **Fráboðan** ... **37**
3.1 Alment ... 37
3.2 Alarmsentralurin (1-1-2) ... 37
3.3 Vaktsentralar ... 38

4 **Skipan av átøkum** ... **39**
4.1 Yvirskipað hugtøk ... 39
4.2 Átaksleiðslan ... 41
4.2.1 Vanligar uppgávur ... 41
4.2.2 Fyrsti fundur í átaksleiðsluni ... 42
4.2.3 Seinni fundir í átaksleiðsluni ... 43
4.2.4 Fyriskipanarstaður (KST) ... 43
4.3 Kreppusamskifti ... 44
4.3.1 Endamál ... 44
4.3.2 Uppgávur ... 44
4.3.3 Ábyrgd og samskipan ... 45
4.3.4 Tilbúgvingarboð ... 45
4.4 Átakið hjá politinum ... 46
4.4.1 Samskipan av øllum átakinum ... 46
4.4.2 Aðrar uppgávur hjá politinum ... 47
4.5 Átakið hjá kommunalu tilbúgvingini ... 47
4.6 Átakið hjá Heilsutilbúgvingini ... 49
4.6.1 ML-HEILSA & ÁTL-HEILSA ... 49
4.6.2 Landslæknin ... 50
4.7 Samskifti ... 50
4.8 Dronur (Kallbýflugur) ... 51
4.9 Tyrlulendingarpláss ... 51

5 **Stórir, torgreiddir og serligir tilburðir** ... **53**
5.1 Alment ... 53
5.2 Toymisarbeiði á átaksøkinum ... 53
5.2.1 Leiðsla hjá kommunalu tilbúgvingini í sambandi við rættiliga stórar tilburðir ... 53
5.2.2 Leiðsla hjá heilsutilbúgvingini í sambandi við stórar tilburðir ... 55
5.3 Staðbundið og landsumfevnandi toymisarbeiði ... 58
5.3.1 Fyriskipanarstøðin (KSN) ... 59
5.3.2 Kommunala tilbúgvingin og/ella kommunala krepputoymið ... 60
5.3.3 Samskipan av heilsutilbúgvingini ... 60
5.3.4 Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) ... 61
5.4 Trygdartilburðir ... 62
5.4.1 Fyrsti fundur í átaksleiðsluni og støðumetingin um fyrivarni ... 63
5.4.2 Operatiónsøki ... 63
5.4.3 Átak í øki við vanda fyri at møta illgerðamanni ... 63
5.4.4 Ráðlegging ... 64
5.5 Stórur ófriður og mótmælisgongur ... 64

**Fylgiskjøl ........ 66**
Fylgiskjal 1 Yrkisorð ........ 66
Fylgiskjal 2 Lóggáva o.a. ........ 73
Fylgiskjal 3 Eyðmerkingarvestar ........ 74
Fylgiskjal 4 Rundskriv um skaðastaðarradio ........ 76
Fylgiskjal 5 Átaksøki – dagligir tilburðir ........ 77
Fylgiskjal 6 Átaksøki – stórir tilburðir ........ 78
Fylgiskjal 7 Àtaksøki við tveimum skaðastøðum ........ 79
Fylgiskjal 8 Yvirlit yvir virksemi, umfatað av kapitli 5 ........ 80
Fylgiskjal 9 Yvirlit yvir tilbúgvingarøkini ........ 82
Fylgiskjal 10: Strikumynd – Oljubasing á sjónum ........ 85
Fylgiskjal 11: Kreppustýring í Føroyum ........ 86

# 1 Yvirskipað viðurskifti

Leiðreglurnar um skipan og leiðslu á skaðastaðnum verða ásettar við heimild í § 20 í løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012

## 1.1 Alment

Í teimum førum, tá ið fólk eru í vanda ella eru komin til skaða, tá ið bráðfeingis vandi er fyri umhvørvinum, ella tá ið virðir verða oyðiløgd ella eru hótt, er neyðugt at seta í verk eitt átak við einum ella fleiri pørtum í tilbúgvingini. "Leiðreglur fyri átaksleiðslu" lýsir tey yvirskipaðu leiðsluviðurskiftini og grundreglurnar fyri samstarvi millum partarnar, ið hava ábyrgdina at loysa eina slíka uppgávu í sambandi við allar tilburðir, sama hvør tilburðurin, er og hvussu ógvisligur hann er. "Leiðreglur um skipan og leiðslu á einum skaðastaði" er galdandi í sambandi við heilt vanligar tilburðir, og tá stórir og fløktari tilburðir koma fyri. Tá er lagt upp fyri - minni sannlíkum – tilætlaðum tilburðum, so sum bumbuspreingingum og tilburðum við skotvápnum.

Eitt ótal av tilburðum eru, ið kunnu vera orsøk til, at neyðugt er at skipa eitt átak. Vanliga verða hesir tilburðir býttir í tveir bólkar. Náttúruelvdir tilburðir og mannaelvdir tilburðir. Talvan niðanfyri er ein roynd at vísa á, hvat slag av tilburðum talan kann vera um.

| Náttúruelvdir tilburðir | |
|---|---|
| Veðurfyribrigdi | Smittandi sjúka |
| • Ódnarveður<br>• Stórkavi og nógv regn | • Alheimsfarsóttir<br>• Húsdjórasjúkur og "zoonosur" |
| **Mannaelvdir tilburðir** | |
| Vanlukkur (ótilætlaðir tilburðir) | Trygdarhóttanir (Tilætlaðir tilburðir) |
| • Vanlukkur við flutningsførum á sjógvi og á landi<br>• Vanlukkur við vandamiklum evnum á landi<br>• Dálkingarvanlukkur á sjónum<br>• Kjarnorkuvanlukkur | • Telduálop (Cyberálop)<br>• Yvirgangsálop |

Talvan lýsir ikki út í æsir allar hugsaðar tilburðir, men er eitt yvirlit yvir 10 sannlíkar tilburðir, sum vilja krevja, at eitt skipað átak verður sett í verk.

Hesar leiðreglur viðgera t.d. ikki vanlukkur við flutningsførum á sjógvi, telduálop, alheimsfarsøttir, húsdjórasjúkur og "zoonosur", men einans hvussu ein skaðatilburður á landi skal skipast. Tó verður mælt til, at hildið verður fast í tvørfakliga bygnaðinum í sambandi við allar tilburðir, ið krevja tvørfakligt samstarv. Víst verður til bygnaðin góðkendur av Føroya landsstýri tann 17. juni 2019 (sí fylgiskjal 11).

Málbólkurin í sambandi við hesar leiðreglur er serliga politiið, kommunala tilbúgvingin og heilsutilbúgvingin, men leiðreglurnar eru eisini galdandi fyri aðrar partar, sum á ein ella annan hátt eru ella kunnu gerast partur av samlaða átakinum.

Hesar leiðreglur nýta trý yvirskipað hugtøk: Átaksøki, skaðastað og vandaøki. Átaksøkið er alt økið, har samlaða tilbúgvingarátakið verður útint og er avmarkað við ytri avbyrging (girðing). Skaðastaðið er tað økið ella staðið, har skaðin er hendur. Skaðastaðið verður avmarkað við innari avbyrging (girðing). Eitt vandaøki er partur av einum skaðastað, har ítøkiligur vandi er fyri fólk.

Aftrat hesum trimum lýstu økjunum kann eisini vera talan um eitt brotsgerðarstað, har politiið hevur ein týðandi leiklut og yvirskipaðu ábyrgdina. Brotsgerðarstaðið er vanliga nakað størri enn skaðastaðið og fevnir um øll øki, har sannlíkt er at finna slóðir, ið nýttar kunnu vera í kanningararbeiðinum. Politiið nýtir eisini hugtakið "operatiónsøki" í sambandi við serligar tilburðir, ið verða kallaðir trygdartilburðir.

Umframt samstarv á sjálvum átaksøkinum lýsa leiðreglurnar eisini samstarvið millum kommunur og aðrar ábyrgdarar við økisábyrgd, og hvussu tilbúgvingin yvirskipað skal virka í "upplendinum". Aftrat hesum vera landstilbúgving og millumlanda avtalur lýstar. Í fylgiskjali 1 er eitt yvirlit yvir yrkisorð, sum verða brúkt av pørtunum í tilbúgvingini.

Aðalreglur fyri, hvussu hvør partur av tilbúgvingini loysir sínar egnu uppgávur, so sum framferðarhættir í einum átaki, og hvør átaksætlan skal nýtast, er ikki lýst í hesum leiðreglum. Hetta er best gjørt av hvørjum øki sær. Tilfar, ið lýsir framferðarhættir og átaksætlanir, er partur av útbúgvingini hjá myndugleikanum við økisábyrgdini og er sostatt tøkt har.

## *1.2 Grundreglur fyri tilbúgvingina í Føroyum*

Smáir tilburðir, sum vanliga koma fyri, verða vanliga loystir av kommunalu tilbúgvingini, politinum og heilsutilbúgvingini. Tá ið størri, fløktari tilburðir koma fyri, er aloftast neyðugt við øðrum pørtum at vera við í átaksarbeiðnum. Tað kunnu vera bjargingarfeløgini kring landið, tyrlutænastan, skipini hjá Vørn ella danska sjóverjan í Føroyum. Aftrat tí hevur Føroya landsstýri samstarvsavtalu við danska tilbúgvingarstovnin um at veita sonevnda serfrøðingatilbúgving í samband við CBRNE-tilburðir.

Tá ið vandi er fyri, at ein vanlukka ella stórskaði kann henda, skulu myndugleikarnir seta fyribyrgjandi átøk í verk. Um ein vanlukka ella stórskaði hendir, er tað uppgávan hjá avvarðandi myndugleika at handfara tilburðin og skjótast gjørligt tryggja, at virksemi, ið varð órógvað, kann fara í gongd aftur.

Longu undir ráðleggingini er umráðandi at geva heildini gætur og at hava í huga, at stórar vanlukkur ella stórtilburðir, í flest øllum førum, ikki kunnu loysast av einum einstøkum myndugleika.

Tilbúgving á øllum økjum byggir á yvirskipaðar grundreglur, sum eru galdandi í sambandi við ráðlegging, kreppustýring og við sjálvt átakið:

- **Grundreglan um økisábyrgd** ið merkir, at tann myndugleikin, ið hevur ábyrgd av ávísari uppgávu í gerandisdegnum, varðveitir ábyrgdina, tá ið stórir skaðar ella vanlukkur henda.

- **Grundreglan um líkskap** ið merkir, at tær mannagongdir og tey ábyrgdarviðuskifti, ið vanliga galda, í størstan mun eisini eru galdandi í tilbúgvingarstøðum, soleiðis at tillagingar í bygnaðinum ikki gerast ógvisligari enn neyðugt.

- **Grundreglan um nærleika** ið merkir, at tilbúgvingaruppgávurnar eiga at verða loystar so nær borgaranum sum gjørligt og á so lágum bygnaðarligum stigi sum til ber.

- **Grundreglan um at gera skjótt av** ið merkir, at í støðum, har tað er ógreitt, hvat ið er hent, er best at byrja á einum ov høgum tilbúgvingarstigi, heldur enn at byrja á einum ov lágum. Aftrat tí skal ein vera til reiðar skjótt at broyta tilbúgvingarstig til eitt lægri stig fyri ikki at nýta óneyðuga orku og pening.

- **Grundreglan um samstarv** ið merkir, at myndugleikar hava skyldu at samstarva og samskifta við aðrar myndugleikar og feløg um tilbúgving og tilbúgvingarátøk.

Oman fyri standandi grundreglur vísa á skylduna hjá myndugleikum at gera skjótt av og taka ábyrgd í støðum, har tað krevst, at eitt tilbúgvingarátak verður sett í verk. Tað merkir eisini, at myndugleikar skullu hava evnini at víkja frá vanligum mannagongdum fyri, at eitt átak munagott kann setast í verk.

Átaksleiðslan hevur førleika og skyldu til at víkja frá vanligum mannagongdum, tá serlig viðurskifti tala fyri tí. Tá ið vikið verður frá, er umráðandi, at boðað verður øllum pørtum av tilbúgvingini á øllum viðkomandi stigum frá hesum.

Hvør myndugleiki sær skal eisini halda seg til aðalreglurnar um, í góðari tíð, munadygt at raðfesta nýtsluna av tøkari útgerð og fólki.

Hvør myndugleiki sær hevur eisini ábyrgd av at samskipa saman við øðrum myndugleikum, ið hava økisábyrgd. Hetta er galdandi fyri tilburðir, ið kunnu raka samfelagsliga breitt, men er eisini galdandi í sambandi við meira sermerktar tilburðir fyri egið ábyrgdarøki. Skyldan at samskipa er galdandi, sama um ein myndugleiki/stovnur er undirskipaður, javnsettur ella yvirskipaður.

Handfaringin av stórum og torgreiddari tilburðum treytar, at hugsað verður gjølla um, hvussu ein myndugleiki skal bera seg at frá teirri løtu, tað verður ásannað, at ein tilburður, sum krevur yvirskipaða leiðslu og ein virknan leiklut frá myndugleikanum, hevur stungið seg upp ella er í umbúnað.

Tað merkir, at myndugleikarnir frammanundan skulu hava tikið grundleggjandi atlit, at leiðslu, ábyrgdarbýti, ávaringarmannagongdir, kreppusamskifti, samskipan, rættin at taka avgerðir í sambandi við stórar óvæntaðar útreiðslur, samstarvsavtalur o.a. Samstundis skulu myndugleikar og aðrir partar í tilbúgvingini gera sær greitt, hvussu nógv teir vænta at vera við í tvørgangandi samstarvi millum myndugleikar á operationellum og strategiskum stigi, og hvussu tað verður tryggjað, at orka er til tað. Kreppustýringarbygnaðurin skal endurspegla teir váðar, føroyska samfelagið stendur yvir fyri.

Alt eftir slag og stødd av tilburði kann handfaringin/stýringin røkjast á einum ella fleiri av niðanfyri standandi stigum. Stýringin skal vera á so lágum bygnaðarligum stigi sum til ber, vísandi til grundregluna um nærleika. Tað sama er galdandi í sambandi við fyribyrgjandi virksemi og ráðlegging.

Nógv bygnaðarlig stig eru at handfara tilburðirnar. Heitini á summum av tvørfakligu ráðunum bera somuleiðis donsk heiti. Orsøkin til tað er, at hesar leiðreglur væntandi eisini verða umsettar til danskt, so Ríkismyndugleikarnir hava eitt eintak á egnum máli og fyri at tryggja, at heitini á ymsu ráðunum verða nýtt í røttum samanhangi.

- Á sjálvum átaksøkinum – útinnandi stig.
    - Fyriskipanarstaðið – (Kommandostade), KST (tvørgangandi ráð undir leiðslu hjá politinum)

- Á operationellum stigi – stýrandi stig.
    - Vaktsentralurin/vakttelefonin hjá kommunalu tilbúgvingini
    - Kommunala kreppuskipanin
    - Fyriskipanarstøðin – (Kommandostation), KSN (politiið)
    - Átaksráðið – (Færøernes Beredskabsstab) (tvørgangandi ráð undir leiðslu av politinum)
    - Vaktsentralurin á Landssjúkrahúsinum (LS), Vakttelefonirnar á Suðuroyar sjúkrahúsi (SSH) og á Klaksvíkar sjúkrahúsi (KS).
    - Kreppuskipanin hjá øðrum myndugleikum.

- Á strategiskum stigi – ráðandi stigi.
    - Strategisk ráð sambært kreppusamskipanini hjá myndugleikum við økisábyrgd

- o Kreppuráðið – (Krisestaben) (tvørfakligt kreppuráð undir leiðslu av Fiskimálaráðnum)
- o Tilbúgvingarráðið – (Beredskabsrådet) (tvørfakligt ráðgevandi ráð undir leiðslu av Fiskimálaráðnum)
- o Føroya landsstýri (Færøernes regering)

## 1.3 Samskipan og átaksleiðsla

Tá ið fleiri partar í tilbúgvingini eru saman um eitt átak, er neyðugt við samskipan. Samskipan í hesum samanhangi merkir, at teir partar, ið eru um eitt átak, skulu í felag loysa eitt felags og yvirskipað mál, sum semja er um. Samstundis skal vera lagt upp fyri ábyrgdini og uppgávunum hjá hvørjum øki sær. Partarnir skulu viðurkenna, at teir eru bundnir av hvør øðrum fyri at loysa eina uppgávu. Tað merkir, at partarnir mugu gera avtalur og tillagingar sínámillum, eisini um hvussu tvístøður kunnu loysast. Tað er samskipandi leiðslan, ið hevur ábyrgdina av at tryggja sær, at tað hendir.

Yvirskipaði leiðslubygnaðurin hevur trý stig:
1. Strategiskt stig
2. Operationelt stig
3. Taktiskt stig

Í parti 2.1.2 verður leiðslubygnaðurin omanfyri útgreinaður og lýstur.

Tað er umráðandi, at partarnir í tilbúgvingini hava neyðugan kunnleika um aðrar tilbúgvingareindir, ið hava ein leiklut í tilbúgvingini, so sum uppgávur, ábyrgd og hvør útgerð og hvat fólk er tøkt. Fyri at sleppa undan misskiljingum skulu partarnir í tilbúgvingini áhaldandi kunna hvør annan og verða greiðir sínámillum, um støðan broytist, og um tað er nakað, sum vekur ans ella undran. Partarnir skulu laga seg eftir hvør øðrum, góðtaka neyðsemjur og góðtaka, at avgerðir verða tiknar í felag við aðrar partar, ið virka í tilbúgvingini.

Í sambandi við stórar tilburðir verður ein átaksleiðsla skipað. Hetta verður neyvari lýst í kapitli 4. Undir vanligum umstøðum er bulurin í átaksleiðsluni teir tríggir átaksleiðararnir frá politinum, kommunalu tilbúgvingini og heilsuverkinum. Hesi heiti og hesar styttingar verða brúktar fyri hesar átaksleiðarar:

- Samskipandi átaksleiðari (Átaksleiðari Politi) – ÁTL-POLITI
- Tekniskur átaksleiðari (Átaksleiðari fyri kommunalu tilbúgvingina) – TEKNISKI-ÁTL
- Átaksleiðari Heilsa (Átaksleiðari prehospitala tilbúgvingin) – ÁTL-HEILSA

Í hesum leiðreglum verða einans styttingarnar nýttar.
Handfaringin av einum tilbúgvingarátaki fer fram í samstarvi millum teir tríggjar átaksleiðararnar og aðrar leiðarar, ið hava týdning fyri at loysa uppgávuna. Tað kann t.d. vera ein liðleiðari fyri stuðulseindir, (t.d. bjargingarfeløgini í Føroyum) ella serfrøði.

Semja um sínámillum býti av arbeiðsuppgávum og raðfestingum verður avtalað millum partarnar soleiðis, at uppgávur í sambandi við átakið verða loystar so nøktandi og væl sum til ber eftir slagi og stødd av tilburði og eftir tí tilfeingi, ið er tøkt til at loysa uppgávuna.

Fyri at tryggja samskipanina og ikki minst, at teir tríggir átaksleiðararnir hava neyðugt innlit í, hvør ábyrgd og hvørjar uppgávur liggja hjá hinum pørtunum í tilbúgvingini, eiga átaksleiðararnir í minsta lagi at hava luttikið í og staðið eina átaksleiðaraútbúgving, ið er góðkend av avvarðandi myndugleika.

# 2 Lýsing av eindunum í tilbúgvingini

## 2.1 Politiið

### 2.1.1 Alment

Ríkispolitiovastin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av uppgávunum hjá politinum undir ábyrgd hjá danska løgmálaráðharranum. Ríkispolitiið virkar sum yvirskipað stýring fyri danskt politi, eisini politiið í Føroyum, meðan dagliga politiarbeiði sum útgangsstøði er í politiøkinum. Føroyar er eitt politiøki, ið er býtt í trý landafrøðilig øki undir leiðslu av Føroya Landfúta.

Sambært Tilbúgvingarlógini § 21 og Rættargangslógini § 108 er tað politiið, ið samskipar tað samlaða átakið í sambandi við stórar tilburðir á landi, á vøtnum, í áum, og í praksis í havnum og tætt fram við landi, har serliga grunt er, har tað vanliga eru eindir frá landi, ið arbeiða á skaðastaðnum. Tað skilst eisini av Rættargangslógini, at tað er uppgávan hjá politinum at fyribyrgja vanda fyri órógvi av lóg og landaskili, og vanda fyri trygdini hjá stakpersónum og almennu trygdini. Tað er somuleiðis uppgávan hjá politinum at fyribyrgja revsiverd viðurskifti, at steðga teimum og eftirkanna og ábyrgja revsiverd viðurskifti.

### 2.1.2 Politiøkini

Politiið í Føroyum undir Føroya landfúta er skipað í trý politiøki. Føroya landfúti hevur samskipandi leiklutin í sambandi við stórar tilburðir á landi. Politiið skal tryggja, at samlaða átakið á átaksøkinum og uttanfyri verður samskipað so væl sum til ber. Politiið skal eisini tryggja, at aðrar átakseindir kunnu arbeiða ótarnaðar. Samstundis hevur politiið ábyrgdina av kanningararbeiðinum í átaksøkinum.

Í sambandi við tilburðir, sum krevja átøk frá fleiri myndugleikum, er tað sum útgangsstøði politiið, ið ger av, nær samskipandi leiðsla verður sett í verk. Samskipandi leiðsla byrjar longu undir ráðleggingar- og fyrireikingarstiginum og er galdandi undir sjálvum átakinum og endar ikki, fyrr enn samlaða átakið er av, og samfelagið skal endurskipað seg eftir tilburðin.

Politiið hevur eisini samskipandi leiðsluna í sambandi við bjargingaruppgávur á vøtnum, í áum og í praksis í havnum og tætt fram við landi har serliga grunt er, tá ið t.d. ein bilur koyrir á sjógv, har politiið skal umbiðja viðkomandi eindir ið, sum útgangsstøði, arbeiða frá landi.

Og øvut, um talan er um eindir, ið natúrliga hava støði á sjógvi, er tað MRCC, ið hevur samskipandi leiklutin, sí part 2.7.

*Leiðsluskipanin hjá politinum er býtt í trý leiðslustig:*

1. Tað strategiska stigið (ráðandi stigið):
   Ta strategisku ábyrgdina hevur ovasta leiðslan, ið hevur til endamáls at áseta yvirskipað og langtíðar stevnumið, herundir hvørji mál skulu røkkast og hvørji amboð og arbeiðshættir skulu nýtast, at røkka ásettu málunum.

   Strategiska toymið hjá Føroya Landfúta - ”Politimesterens strategiske stab” (PM-stab)

   Strategiska toymið hjá Føroya Landfúta hevur strategisku ábyrgdina av “operatiónini” (atgerðini) tá talan er um tilburðir, ið einans verða handfarnir av politinum. Toymið setur út í kortið eina yvirskipaða ætlan, sum skal taka avgerðir um nýtslu av fólki og útgerð og umstøðum sum heild við tí endamáli at náa teimum ásettu málunum vísandi til § 108 í Rættargangslógini. Í hesum sambandi verður ein løgfrøðilig tilbúgving sett í verk og tikin upp á ráð.

   Í sambandi við stórar tilburðir, ið krevja samskipan millum myndugleikar, kann Kreppuráðið fyri Føroyar eisini kallast saman á strategiskum stigi.

2. Tað operativa stigið (stýrandi stigið)
   Operativu ábyrgdina hevur dagliga leiðslan hjá politinum. Í sambandi við stórar tilburðir verður hon skild frá dagliga rakstrinum og stýrd frá eini fyriskipanarstøð (KSN), vanliga á politistøðini.

   Fyriskipanarstøð (Kommandostatation) (KSN)
   KSN skal leggja strategiina fyri operativ átøk, har m.a. samskifti, samskipan av átaksøkjum og skjalfestan verður tryggjað. KSN verður mannað ymiskt alt eftir, hvør tilburðurin er. Í stórum átøkum kann KSN mannast við fleiri operatiónsleiðarum, ið hava ábyrgd fyri hvør sínum átaki, men allir virka undir einum KSN-leiðara. Hetta skal tryggja góða samskipan og samskifti millum átaksøkini og fleiri politiaktiónir.

   Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab)
   Tá ein tilburður er so stórur í vavi, at hann krevur eitt tvørfakligt átak, verður Átaksráðið fyri Føroyar kallað saman til at handfara tilburðin. Í Átaksráðnum verður átakið samskipað millum myndugleikarnar við økisábyrgd. Politiið hevur ábyrgdina av at kalla Átaksráðið saman, og at tilbúgvingarætlanir fyri samansetingina av Átaksráðnum í mun til sjálvan tilburðin verða gjørdar. Er ein tilburður á sjónum, er tað MRCC Tórshavn, ið hevur ábyrgdina av at kalla Átaksráðið saman. Átaksráðið fyri Føroyar vísir til Kreppuráðið fyri Føroyar.

3. Tað taktiska stigið (útinnandi stigið):
   Átaksleiðslan hjá politinum (ÁTL-POLITI), ið er taktiski og samskipandi átaksleiðarin á sjálvum átaksøkinum, skipar KST (fyriskipanarstað/kommandostade) í samstarvi við hinar átaksleiðararnar. Við útgangsstøði í KST hevur átaksleiðarin hjá politinum (ÁTL-POLITI) samskipandi leiðsluna av øllum uppgávum í átakinum á ein slíkan hátt, at samlaða átakið í átaksøkinum fer fram so munadygt sum til ber. Uppgávurnar eru nærri lýstar í parti 4.4.

### 2.1.3 Ríkispolitiið

Rigspolitiets Strategiske Stab (RSS)
RSS er tað strategiska leiðslulagið hjá Ríkispolitinum. Í starvstoyminum er Ríkispolitisjefurin og onnur útvald av honum. Í sambandi við ein stóran tilburð hevur RSS ábyrgdina av fleiri yvirskipaðum uppgávum.

Nationalt Situations- og Operationscenter (NSIOC)
NSIOC er bæði tað nationala og internationala millumliðið, tá samskiftast skal við Ríkispolitiið. NSIOC hevur stýrandi, samskipandi og stuðlandi leiklutin í sambandinum við politiøkini – bæði í dagliga rakstrinum, og tá ein ella fleiri fráboðaðir og ófráboðaðir tilburðir eru.

NSIOC skal tryggja, at Ríkispolitiið altíð er ført fyri at geva eina dagførda støðulýsing, bæði nationalt og internationalt.

NSIOC tryggjar saman við PET SIOC (PET's Situations- og Operationscenter), at politiið skjótt kann seta í verk og samskipa eitt átak í sambandi við ein ella fleiri størri tilburðir, so sum trygdartilburðir.

NSIOC hevur ábyrgdina av at seta í verk kreppurstýringarskipanina hjá Ríkispolitinum og NSIOC hevur, vegna NOST (National Operativ Stab), dagliga sambandið við og boðsendur umboðum í NOST í samsvari við donsku kreppuskipanina um tvørfakligt samstarv millum økisábyrgdarmyndugleikar.

## 2.2 Kommunala tilbúgvingin

### 2.2.1 Alment í samband við kommunala tilbúgvingin

Sambært tilbúgvingarlógini er tað uppgávan hjá kommunalu tilbúgvingini at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaðar á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðatilburðir ella vanlukkur, herundir yvirgangur og hernaðarligar tilburðir, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum.

Tilbúgvingin er uppbygd í átaksstigum sum fylgjandi:

1. Átaksstig: Tann kommunala tilbúgvingin,

2. Átaksstig: Grannahjálp (stuðul frá kommunalum granna tilbúgvingum),
3. Átaksstig: Hjálp frá landstilbúgvingini og
4. Átaksstig: Altjóða hjálp.

Tann kommunala tilbúgvingin setur í verk nøktandi átøk í sambandi við skaðatilburðir ella vanlukkur og hevur teknisku leiðsluna av átakinum á skaðastaðnum undir øllum átakinum. Hetta er t.d. galdandi fyri:

- eldsbruna,
- óhapp við vandamiklum evnum,
- spreinging,
- skriðu-, skalva-, áar- og omanlop,
- tá ið bygningar rapa,
- ferðsluvanlukkur,
- tilburðir við skipa- og bátaóhappum, tá ið førini liggja við bryggju,
- hýsa neyðstøddum ella bráðfluttum fólki,
- flogvanlukkur á landi,
- at loysa fastkleimd fólk í ferðsluvanlukkum, flogvanlukkum, omanlopum o.ø. og
- umhvørvisdálking, herundir eisini at basa olju- og øðrum vandamiklum evnum á landi, á vøtnum, í áum og í havnarløgum.

Í sambandi við størri, drúgvar ella útgerðs- og mannskapskrevjandi tilburðir, ella tilburðir har serútgerð krevst, verða oman fyri nevndu átaksstig nýtt eftir áheitan frá tekniska átaksleiðaranum (TEKNISKI-ÁTL) hjá kommunalu tilbúgvingini. Harumframt kann kommunali tekniski átaksleiðarin heita á aðrar myndugleikar við tilbúgvingarábyrgd (økisábyrgd), ella onnur við ábyrgd av týðandi virksemi í samfelagnum.

Ein uppgáva, sum tó ikki er kommunal, er at leita eftir horvnum fólki. Hesa uppgávu eigur politiið á landi og fiskiveiðieftirlitið hjá Vørn á sjónum, ið verður samskipað av MRCC Tórshavn. Myndugleikarnir kunnu tó fáa hjálp frá øðrum myndugleikum í hesum sambandi.

### *2.2.2 Kommunala tilbúgvingin*

Tann kommunala tilbúgvingin skal, við fyriliti til váðan í kommununi, vera før fyri at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaðar á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðatilburðir ella vanlukkur, herundir yvirgang og hernaðarligar tilburðir, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum.

Tilbúgvingarætlanir, ið lýsa uppgávur, bygnað og ásettu stødd á kommunalu tilbúgvingini, skulu gerast sambært kommunalari váðameting, ið er fyriskrivað í tilbúgvingarlógini § 13. Meginreglan í greinini er, at kommunan skal leggja ta dagligu tilbúgvingina til rættis, við støði í fyrrnevndu váðameting, ið lýsir eyðmerktar vandar í

tilbúgvingarøkinum. Váðametingar og tilbúgvingarætlanir skulu javnan endurskoðast. Mælt verður til, at váðametingar og tilbúgvingarætlanir verða endurskoðaðar 4. hvørt ár.

Uppgávurnar hjá kommunalu tilbúgvingunum kunnu annaðhvørt fremjast av kommununi sjálvari ella fremjast av eini felags kommunalari tilbúgving. Tað er ábyrgdin hjá kommunustýrinum at tryggja og hava eftirlit við, at tilbúgvingarnar hjá kommunum eru fullgott skipaðar og útgjørdar.

Kommunalu tilbúgvingarnar eru skipaðar sum nevnt niðanfyri:

- 4 felagskommunalar tilbúgvingar undir ábyrgd av hvør sínari felags tilbúgvingarnevnd sett av kommununum,
- umframt 15 kommunalar tilbúgvingar undir ábyrgd av hvør sínari tilbúgvingarnevnd sett av kommununi, sambært tilbúgvingarlógini § 12.

**Tær felagskommunalu tilbúgvingarnar eru:**

- Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið (Nes, Sjóvar og Runavíkar kommunur),
- Suðuroyar Syðra Sløkkilið (Vágs, Hovs, Porkeris og Sumbiar kommunur),
- Tvøroyrar Sløkkilið (Hvalbiar og Tvøroyrar kommunur) og
- Klaksvíkar Sløkkilið (Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Kunoyar og Klaksvíkar kommunur).

**Tær kommunalu tilbúgvingarnar eru:**

- Fuglafjarðar Sløkkilið
- Sløkkilið Eysturkommunu
- Eiðis Sløkkilið
- Sunda Sløkkilið
- Vestmanna Bjargingar- og Sløkkilið
- Kvívíkar Sløkkilið
- Vága Sløkkilið
- Sørvágs Sløkkilið
- Tórshavnar Sløkkilið
- Skopunar Sløkkilið
- Sands Sløkkilið
- Húsavíkar Sløkkilið
- Skálavíkar Sløkkilið
- Skúvoyar Sløkkilið
- Fámjins Sløkkilið

(Sí fylgiskjal 9, yvirlit yvir tilbúgvingarøkir í Føroyum)

<u>Uppgávurnar hjá teimum kommunalu tilbúgvingunum</u>

Kommunala tilbúgvingin skal veita eitt nøktandi átak móti skaða á fólk, djór, umhvørvi og ognir í sambandi við skaðatilburðir ella vanlukkur, herundir yvirgang og hernaðarligar tilburðir

Tær kommunalu tilbúgvingarnar skulu kunna klára átøk móti óhappum sum til dømis eldi, spreingingum, tá ið bygningar rapa, flogvanlukkur, skipsvanlukkur við kai, náttúruvanlukkur og óhapp, ið kunnu hava við sær útlát og spjaðing í umhvørvinum av vandamiklum evnum (CBRNE-tilburðir) á landi, á vøtnum, í áum og í havnum. Tær kommunalu tilbúgvingarnar skulu haraftrat eisini kunna gera eitt átak í sambandi við at loysa fastkleimd fólk í ferðsluvanlukkum.

Somuleiðis skal kommunala tilbúgvingin kunna taka ímóti, hýsa og í neyðugan mun kostarhalda bráðfluttum og fólki, sum, orsakað av neyðstøðu, eru komin illa fyri.

Bjargingaruppgávur á vøtnum, í mýrum, áum og havnum eru ein partur av uppgávunum hjá kommunalu tilbúgvingini. Tilbúgvingarlógin setir ikki krøv um, at kommunala tilbúgvingin skal hava eina kavaratilbúgving. Kommunustýrið kann, við støði í váðametingini, taka avgerð um at seta á stovn kavaratilbúgving, sum so verður fevnd av krøvum galdandi fyri kavaraarbeiði.

Tekniskur leiðari av átakinum

Tekniska leiðslan av átaki á einum skaðastaði verður røkt av TEKNISKI-ÁTL ella einum liðleiðara við nøktandi útbúgvingarligum førleikum.

Um tekniska leiðslan av átakinum verður framd av einum liðleiðara (TEKNISKI-LL), skal hesin boðsenda ella kunna TEKNISKI-ÁTL, tá ið TEKNISKI-LL metir, at tørvur er á hesum. TEKNISKI-ÁTL er altíð partur av boðsending, um tørvur er á stuðli. Uppgávurnar hjá TEKNISKI-ÁTL eru nærri lýstar í parti 4.5.

Tekniska leiðslan av átakinum skal boðsenda stuðli frá aðrari kommunalari tilbúgving ella frá landstilbúgvingini, um mett verður, at tørvur er á hesum vegna slag og vavi av vanlukku.

Danska tilbúgvingarstýrið "Beredskabsstyrelsen" hevur tilevnað serhefti við evninum "*Indsatsledelse på skadestedet*", har dentur verður lagdur á teknisku og taktisku viðurskiftini í sambandi við eldsbruna (sí fylgiskjal 2).

Í tilbúgvingarlógini, § 25 eru ásetingar, ið geva teknisku leiðsluni møguleika í sambandi við eitt átak, uttan rættarúrskurð at taka avgerð um at taka seg inn á privata ogn, um neyðugt við at bróta niður bygningar ella taka burtur forðingar, ið mettar vera neyðugar til tess at steðga skaðanum.

Í lógini er ikki greinað, hvat metingarstig krevst fyri at gera seg inn á privata ogn. Tað er upp til teknisku leiðsluna í hvørjum einstøkum føri at gera eina meting og at taka avgerð um, hvussu eitt átak verður skipað. Tískil er tað sera umráðandi, at tekniski

leiðarin altíð hevur í huga, at henda heimildin verður umsitin við virðing fyri privata ognarrættinum, lutfalsmeginregluni og minst møguligum inntrivum.

At taka ímóti, hýsing og kostarhald

Kommunala tilbúgvingin skal sambært § 8 í tilbúgvingarlógini vera før fyri at taka ímóti, hýsa og í neyðugan mun kostarhalda bráðfluttum fólki, sum vegna neyðstøðu eru komin illa fyri.

Bráðflutt skal skiljast sum persónar, har myndugleikin í sambandi við ein møguligan komandi tilburð ella í sambandi við ein stóran tilburð hevur tikið avgerð um at flyta burtur frá einum øki (burturflutt øki) til annað øki (hýsingarøki). Hýsing av bráðfluttum fólki verður skipað í tøttum samstarvi millum kommunalu tilbúgvingina og politiið, sum taka sær av hesi uppgávu.

Onnur neyðstødd eru at skilja sum persónar, ið hava hjálp fyri neyðini í meiri tilvildarligum og avbyrgdum umstøðum, har tey, orsakað av serliga tilburðinum, ikki kunnu náa ætlaða hýsingarstaðið og/ella ikki við egnari hjálp kunnu finna hýsing. Tað kunnu til dømis vera skipbrotin, ið eru fingin í land, ella ferðandi, sum eru forðað orsakað av vánaligum veðri.

Politiið kann í hesum førum heita á kommunalu tilbúgvingina um at hýsa og kostarhalda teimum neyðstøddu. Sambært tilbúgvingarlógini verður í hesum føri miðað eftir eini bráðfeingis og serliga stuttari hýsing, til tey neyðstøddu klára seg sjálv.

Um mett verður, at tey bráðfluttu og onnur neyðstødd hava brúk fyri kreppuhjálp (sálarliga 1. hjálp) í sambandi við tilburðin, kann politiið ella kommunala tilbúgvingin seta seg í samband við heilsuverkið. Heilsuverkið ella politiið kann aktivera skipan um at geva kreppuhjálp á hýsingarstaðnum.

### *2.2.3 Landstilbúgvingin í samband við tilburðir á landi*

Landstilbúgvingin, sum til dømis umfatar skipini hjá Vørn, Landsverk og bjargingarfeløgini, kann eftir áheitan veita hjálp til kommunalu tilbúgvingina og kann í summum førum veita serútgerð til at loysa eina uppgávu. Annars er samstarvsavtala gjørd við danska tilbúgvingarstýrið, Beredskabsstyrelsen, sum kann veita serútgerð og servand fólk til eina røð av tilburðum.

Bjargingarfeløgini kunnu verða biðin til eina røð av tilburðum, har kommunala tilbúgvingin hevur tørv á tí. Tað kann vera í samband við stórar tilburðir, har tørvur er á fleiri fólkum til ymiskar uppgávur, til dømis í sambandi við skips- ella flogvanlukkur og í sambandi við ódnarveður ella stórar eldar. Landsverk hevur ábyrgd av at reetablera rutur á landi og at halda landsvegir opnar, tá ið ódnarveður er, so tilbúgvingin sleppur til verka.

Skipini hjá Vørn kunnu nýtast til sløkking frá sjónum, og tyrlutænastan og skipini hjá Strandferðsluni kunnu nýtast til at flyta fólk og útgerð í eini neyðstøðu og Landsverk reetablerar rutur á landi.

Bjargingarfeløgini og onnur sjálvboðin kunnu eisini veita hjálp til aðrar myndugleikar, ið hava økisábyrgd, og í sambandi við serlig átøk. Havast skal tó í huga, at talan er um sjálvboðið arbeiði. Tað er hvør landsstýrismaður, ið innan egið ábyrgdarøki, sambært § 5 í tilbúgvingarlógini, tekur avgerð um, hvørjar uppgávur bjargingarfeløg og onnur sjálvboðin kunnu røkja í landstilbúgvingini.

Bjargingarfeløgini eru staðsett kring meginpartin av landinum og kunnu boðsendast við stuttum skotbrái. Umbøn um stuðul frá bjargingarfeløgunum kann gerast beinleiðis ella umvegis vaktsentralin hjá politinum.

Bjargingarfeløgini hava til dømis servitan innan fjallabjarging og hava fingið førleikar at handfara handhildna útgerð at máta geislavirkni í sambandi við tilburðir við geislavirknum evnum.

Um neyðugt er við sertilbúgving innan økini kjarnorku, geisling og handfaring av kemiskum evnum (CBRNE), kann hendan tænastan veitast frá danska tilbúgvingarstýrinum, Beredskabsstyrelsen, ið hevur servand fólk til at loysa hesar uppgávurnar. Eisini ber til at biðja um Hazmat-tilbúgving gjøgnum danska tilbúgvingarstýrið. Um stuðul verður veittur úr Danmark, má væntast, at tað tekur nakað av tíð, áðrenn útgerð og fólk við servitan kunnu seta beinini á land í Føroyum.

Í tí føri, har tilbúgvingareindirnar fáa stuðul frá bjargingarfeløgunum, vísir eitt umboð (liðleiðari) fyri bjargingarfeløgini til átaksleiðaran, ið hevur ábyrgdina av umbidnu hjálpini. Hesi umboð vera sostatt bindilið millum átaksleiðsluna og stuðulseindirnar frá bjargingarfeløgunum.

## *2.3 Heilsutilbúgvingin*

### *2.3.1 Alment*

Sambært løgtingslóg um sjúkrahúsverkið og kunngerð um skipan av sjúkraflutningstænastuni (sí fylgiskjal 2) hevur sjúkrahúsverkið ábyrgd av ráðlegging og virksemi hjá heilsutilbúgvingini.

Heilsutilbúgvingin umfatar sjúkrahústilbúgvingina, ta prehospitalu tilbúgvingina, heilivágstilbúgvingina og tilbúgvingina í primera heilsuøkinum. Tilbúgvingin á sjúkrahúsum og á tí prehospitala økinum hoyrir til Sjúkrahúsverk Føroya. Bæði Sjúkrahúsverk Føroya og kommunurnar hava uppgávur í mun til tilbúgving í primera

heilsuøkinum og heilivágsøkinum. Krepputilbúgvingin er fakligir partur av heilsutilbúgvingini.

Sjúkrahúsverk Føroya hevur evstu ábyrgd av heilsutilbúgvingini, ið hoyrir undir Heilsumálaráðið. Í sambandi við serligar tilburðir tekur Sjúkrahúsverk Føroya sær av landsumfatandi samskipanini av øllum heilsuátøkum og tekur avgerð um, hvussu tilburðurin skal handfarast. Sjúkrahúsverk Føroya vegleiðir og ráðgevur kommunum um ráðlegging av heilsutilbúgvingini. Sjúkrahúsverk Føroya kann eisini veita ráðgeving viðvíkjandi heilsutilbúgving í eini ítøkiligari støðu og áseta reglur fyri ítøkiligari handfaring av smittandi sjúku.

Tann prehospitala tilbúgvingin, herundir sjúkraflutningstænstan (ambulansatilbúgvingin), er ein partur av sjúkrahústilbúgvingini. Tað prehospitala átakið fevnir um bráðfeingishjálp til sjúklingar, føðandi kvinnur og til løstað, áðrenn komið verður til sjúkrahúsið. Endamálið við átakinum er at bjarga mannalívum, betra um heilsuframtíðina, linna um pínu og onnur sjúkueyðkenni, minka um ta samlaðu sjúkragongdina, veita umsorgan og skapa tryggleika.[1]

Ein part av heilsutilbúgvingini varðar Landslæknin av. Landslæknin er stovnur undir danska Heilsumálaráðnum og er fakliga knýttur at Styrelsen for Patientsikkerhed. Uppgávurnar kunnu millum annað fevna um serligar støður, har viðkomandi veitir heilsufakliga ráðgeving til aðrar staðbundnar myndugleikar, umframt í mun til eksponeraðar og møguliga eksponeraðar – ið enn ikki eru vorðin sjúk – fólkabólkar, eitt nú persónar í einum átaks- og vandaøki ella í mun til fólk, sum búgva í námind (av vanlukkustaðnum), sí nærri 2.3.3 og 4.6.2.

Geislaverndin (SIS) er ein eind í danska Heilsustýrinum og hevur eina landsumfevnandi serfrøðiliga tilbúgving í sambandi við tilburðir við radioaktivum evnum. Skuldi ein vanlukka við geislavirknum evnum komið fyri, veitir Landslæknin heilsufakliga ráðgeving við atliti at geislavernd í samráð við SIS og viðkomandi myndugleikar.

Center for Biosikring og Bioberedskab (CCB) hjá Statens Serums Institut er landsumfevnandi serfrøðilig tilbúgving við atliti at lívfrøðiligum evnum. Skuldi ein vanlukka við lívfrøðiligum evnum komið fyri, veitir Landslæknin heilsufakliga ráðgeving í samráð við CCB og viðkomandi myndugleikar.

### *2.3.2 Sjúkrahústilbúgvingin*

Høvuðsuppgávan hjá Sjúkrahúsverki Føroya í sambandi við stórskaðar og kreppur er:

---

[1] Kunngerð nr. 9 frá 19. februar 2010 – um skipan av sjúkrarflutningstænastuni.

- At tryggja, at tað er ein felags inngongd (atgongd) til heilsutilbúgvingina gjøgnum tey trý sjúkrahúsini umvegis alarmsentralin (1-1-2).
- At seta í verk heilsutilbúgvingina, herundir ta prehospitalu tilbúgvingina.
- At senda út neyðugt tal av sjúkrabilum, bráðfeingisbilum, neyðsendartoymi og líknandi, herundir heilsustarvsfólk frá primeru heilsutænastuni o.a. í sambandi við prehospitala átakið.
- At taka sær av triage, viðgerð og raðfestingum.
- At taka ímóti nógvum sjúkum/løstaðum sjúklingum.
- At fáa hjálp frá øðrum prehospitalum eindum eftir tørvi.
- At upplýsa og samskipa við kommunur í umráðnum.
- At økja um kapasitetin á sjúkrahúsunum t.d. við at útskriva sjúklingar til tess at útvega pláss fyri fleiri sjúklingum.
- At seta í gongd psykososialu krepputilbúgvingina.

Sjúkraflutningstænastan (Ambulansutænastan) er knýtt at sjúkrahúsunum og hevur tað yvirskipaðu operativu leiðsluna á heilsuøkinum. Starvsfólk frá Sjúkraflutningstænastuni við førleikum í átaksleiðslu kunnu vera umboðað í KSN hjá politinum eftir tørvi og hava fasta umboðan í Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab). Lækni og starvsfólk frá Sjúkraflutningstænastuni kunnu eisini, eftir ítøkiligari meting, vera partur av øðrum tilbúgvingarbólkum, so sum kommunalum krepputoymum ella líknandi. Hetta kann vera á bæði operationellum stigi og á strategiskum stigi.

Medisinskur leiðari hjá sjúkraflutningstænastuni (ML-HEILSA), sum kann vera lækni ella starvsfólk hjá Sjúkraflutningstænastuni við besta førleika, hevur tað hægstu heilsufakligu ábyrgdina fyri prehospitala átakið á sjálvum átaksøkinum.

Átaksleiðari fyri heilsuøkið (ÁTL-HEILSA) hevur hægstu ábyrgd av operativa átakinum í átaksøkinum og arbeiðir saman við Landslæknanum, um hesin er boðsendur til átaksøkið.

ÁTL-HEILSA hevur tætt samstarv við ÁTL-POLITI, TEKNISKI-ÁTL og ML-HEILSA. Uppgávurnar hjá ÁTL-HEILSA og ML-HEILSA vera meiri nágreiniliga lýstar í parti 4.6.1.

### *2.3.3 Landslæknin*

Landslæknin, sum er partur av Styrelsen for Patientsikkerhed, hevur vaktartilbúgving alt samdøgrið, og er hann fakliga knýttur at Sundhedsstyrelsen. Virksemið umfatar millum annað servitan um tilbúgving, smittandi sjúkur og umhvørvismedisin[2]. Læknin er tøkur á telefon og kann – um gjørligt – møta á átaksøkinum eftir eina ítøkiliga meting. Havast má í huga, at hann kann hava eina langa flutningstíð, alt eftir hvar í landinum átakið er, og hvar landslæknin er staddur. Landslæknin situr í Epideminevndini og er

[2] Miljømedicin

somuleiðis "ad hoc" umboð í Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) og Kreppuráðnum fyri Føroyar (Færøernes Krisestab) og kann tískil møta har eftir áheitan.

Landslæknin veitir ríkismyndugleikum, landsmyndugleikum og kommunum ráðgeving í samband við heilsulig viðurskifti fyri fólkið yvirhøvur og í samband við tilbúgvingarátøk. Serstakliga í teimum førum, har ein fólkabólkur hevur verið fyri vandamiklum evnum, men ikki beinleiðis hevur nøkur eyðkenni, kann landslæknin ráðgeva átaksleiðsluni og Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) og veita kunning til fólk um vandar og um, hvørji fyrivarni skulu takast. Tað kann til dømis vera í sambandi við smittandi sjúku, kemikaliu- og gasslekar ella aðrar CBRNE-tilburðir, men kann eisini vera í samband við stórar og drúgvar eldsbrunar við heilsuskaðiligum royki.

Meðan tað prehospitala átakið við sjúkrabilum og átaksbilum røkir átakið fyri sjúk og løstað á skaðastaðnum, er tað uppgávan hjá Landslæknanum at ráðgeva og kunna átaksleiðsluna og aðrar myndugleikar um heilsuligar vandar og trygdartiltøk galdandi fyri teir persónar, ið eru útsettir á og við skaðastaðið, og fólk, ið búgva nærhendis.

Í tilbúgvingarviðurskiftum og átøkum samstarvar Landslæknin við ML-HEILSA, ÁTL-HEILSA, ÀTL-POLITI, TEKNISKI-ÁTL og eisini við serfrøðina, um tað hevur týdning. Ítøkiligu uppgávurnar hjá Landslæknanum eru nærri lýstar í 4.6.2.

Í einum átaksøki og í Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) umboðar Landslæknin eisini Epideminevndina í samband við tey tiltøk, ið verða sett í verk við støði í epidemilógini[3].

## 2.4 Basing av dálking við vandamiklum evnum

### 2.4.1 Alment

Átøk í samband við bráðfeingis óhapp við vandamiklum evnum á landi, í vøtnum, áum og í havnum verða gjørd av kommunalu tilbúgvingini, sambært § 8 í tilbúgvingarlógini og § 22 í havumhvørvislógini. Bráðfeingis óhapp við vandamiklum evnum kann til dømis vera:

- Leki við flótandi brennievni á/undir lendi og á vegi.
- Óhapp við kemiskum evnum (føstum, flótandi ella luftbornum).
- Eldur í virksemi við umhvørvis- ella heilsuvandamiklari goymslu.

[3] Anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme

Allir lekar ella útlát við vandamiklum evnum, har skaðar á fólk, umhvørvi ella virðir henda, ella vandi kann standast av hesum, verður mett sum bráðfeingis óhapp við vandamiklum evnum.

Bráðfeingis óhapp við vandamiklum evnum er soleiðis partur av tilburðum, sum verður eyðkent sum ein CBRNE-tilburður. Ein CBRNE-tilburður skal skiljast sum tilburður við kemiskum (C), lívfrøðiligum (B), geislavirknum (R), kjarnorku (N) ella spreingikvæmum evnum (E), sum í eini ítøkiligari støðu er ein vandi.

Tann kommunala tilbúgvingin hevur ábyrgdina av bráðtíðarbilinum (akuttfasuni) av fyrsta-átakinum í samband við óhapp við vandamiklum evnum. Dálkarin hevur skyldu at basa dálkingini, við leiðbeining frá umhvørvisdeildini hjá kommununi, um kommunan hevur eina slíka. Kommunur, ið ikki hava nøktandi førleikar at taka støðu til, hvat gerast skal, kunnu leita sær ráð hjá Umhvørvisstovuni. Um dálking er á landsvegi, er tað Landsverk, sambært meginregluni um økisábyrgd, ið hevur ábyrgdina av, at arbeiðið at taka upp verður sett í verk.

Bráðtíðarbilið (akuttfasan) er tað stigið eftir óhappið, har endamálið við átakinum er at steðga óhappinum og forða fyri, at dálking og onnur skaðaárin breiða seg. Tað er TEKNISKI-ÁTL, sum í møguligum samstarvi við Umhvørvisstovuna ella vegamyndugleikan, ið tekur avgerð um, nær bráðtíðarbilið sambært tilbúgvingarlógini er endað.

Um so er, at óhapp hevur við sær ella kann hava við sær beinleiðis vanda fyri heilsu og/ella árin á heilsustøðuna hjá beinleiðis ella óbeinleiðis raktum persónum í átaksøkinum (skaðastaðnum) ella í nánd av tí, kann landslæknin, ella í hansara fráveru vakthavandi medisinskur serlækni, ráðgeva átaksleiðaranum um fyrivarni í sambandi við hesar persónar.

Eingin heimild er í tilbúgvingarlógini hjá kommunalu tilbúgvingini at krevja gjald fyri bráðfeingisátøk í samband við dálkandi evni. Í hvørjum einstøkum føri skal gerast ein meting, um heimild er fyri hesum í aðrari lóggávu, ella um vanligar endurgjaldsreglur kunnu gerast galdandi.

Sambært løgtingslóg um umhvørvisvernd, § 37, kann eftirlitsmyndugleikin, tá ið atgerðir eru bráðneyðugar fyri at forða álvarsamari dálking ella spjaðing av dálkingini, fremja atgerðirnar, ið eru neyðugar, uttan boð og fyri rokning hjá tí, ið hevur ábyrgdina. Útreiðslur vera bornar av avvarðandi ogn.

Um so er, at motordrivið akfar voldir skaða í sambandi við ferðsluóhapp, spreinging ella eld, sum stavar frá brennievnisskipanini í akfarinum, skal tann, sum hevur ábyrgd av

einum motordrivnum akfari, endurrinda teir skaðar, sum akfarið voldir, sambært ferðslulógini § 54.

Um so er, at motordrivið akfar voldir skaða á annan hátt enn nevnt er omanfyri, skal tann, ið hevur ábyrgd av akfarinum, sambært ferðslulógini § 54a, rinda endurgjald eftir vanligu reglunum í lóggávuni. Tað merkir í stuttum, at vanligar endurgjaldsreglur (culpa) kunnu gerast galdandi.

### *2.4.2 Tann kommunala umhvørvisdeildin*

Tað er ymist, hvussu kommunurnar í Føroyum hava skipað seg í mun til umhvørvismál. Størsta kommunan í landinum hevur eina umhvørvisdeild, men vanliga er hetta skipað undir teknisku deild hjá flestu kommununum í Føroyum.

Í sambandi við tilburðir við vandamiklum evnum er kommunala umhvørvisdeildin ella ábyrgdarpersónur við fakligari vitan um umhvørvismál kærkomin hjá tekniska átaksleiðaranum, tá talan er um ráðførslu. Tað kann til dømis vera ein meting av árininum av einum tilburði við vandamiklum evnum ella vitan um mongd av vandamiklum evnum í eini fyritøku. Kommunurnar hava møguleika at ráðføra seg við Umhvørvisstovuna ella Arbeiðs- og Brunaeftirlitið.

Annars er møguligt hjá kommunalu tilbúgvingini at gera nýtslu av ”Kemisk Beredskab”, sum er vakttelefon hjá danska tilbúgvingarstýrinum ”Beredskabsstyrelsen”, sum Fiskimálaráðið hevur gjørt samstarvsavtalu við. ”Kemisk Beredskab” kann, í eini kreppustøðu, veita leiðbeining um, hvussu vandamikil evni skulu handfarast og best verða bast (sí www.brs.dk).

### *2.4.3 Umhvørvismyndugleiki landsins*

Sambært kapitli 5 í umhvørvislógini er Umhvørvisstovan eftirlitsmyndugleiki í sambandi við serliga dálkandi virksemi. Umhvørvisstovan hevur ikki vakttelefon, men kommunala tilbúgvingin kann í dagtímunum seta seg í samband við Umhvørvisstovuna í sambandi við tilburðir, har Umhvørvisstovan er eftirlitsmyndugleiki og hevur givið virkseminum eina umhvørvisgóðkenning ella átti at havt givið eina umhvørvisgóðkenning. Umhvørvisstovan hevur onga operativa deild, men virkar einans ráðgevandi og kann í avmarkaðan mun geva kommunalu tilbúgvingini kunning um virksemi og um slag og nøgdir av vandamiklum evnum í teimum førum, har Umhvørvisstovan hevur givið umhvørvisgóðkenning. Sí fylgiskjal 8 yvir virksemi, ið krevur umhvørvisgóðkenning.

### *2.4.4 CBRNE - Serfrøðitilbúgving*

Eingin CBRNE serfrøðistilbúgving er tøk í Føroyum, ið kann koma kommununum til hjálpar í sambandi við serligar tilburðir, ið krevja serfrøði. Sambært viðmerkingunum til tilbúgvingarlógina verður mett, at tað ikki er rætt, at kommunurnar skulu hava

ábyrgd av hesum heilt serligu tilbúgvingarøkjunum, so sum CBRNE tilbúgving. Tó mugu kommunurnar hava hesi atlit í huga í sambandi við tað virksemi, ið er í kommununi, og hava hesi serligu atlit við í síni váðameting, sbrt. § 13 og § 8. Hugsast kann tó, at kommunurnar kunnu røkja ávísar uppgávur í sambandi við smærri dálkingarvanlukkur við kemiskum evnum.

Fiskimálaráðið hevur samstarvsavtalu við danska tilbúgvingarstýrið ”Beredskabsstyrelsen”, ið kann senda slíka serfrøði til Føroyar, og sum kann veita ráðgeving.

CBRNE – Serfrøðitilbúgvingin í Danmark:
C: Kemisk Beredskab, Beredskabsstyrelsen
B: Center for Biosikring og Bioberedskab, Statens Serum Institut
R: Sundhedsstyrelsen, Strålebeskyttelse (SIS)
N: Nukleart Beredskab, Beredskabsstyrelsen
E: Forsvarets ammunitionsrydningstjeneste

Danska tilbúgvingarstýrið hevur gjørt eina leiðbeining, *”Retningslinjer for indsats ved CBRNE-hændelser”,* ið lýsir hesi viðurskifti, sí fylgiskjal 2. Aftrat hevur norska stýrið fyri samfelagstrygd og tilbúgving gjørt eina handbók, ”Farlige stoffer – CBRNE”, ið lýsir, hvørji viðurskifti átaksleiðslan skal hava fyrilit fyri í bráðtíðarbilinum (akuttfasuni), sí somuleiðis fylgiskjal 2.

## 2.5 Verjan

### 2.5.1 Alment

Grundað á yvirskipaðu ásetingarnar í lóg um endamál, uppgávur, fyriskipan o.a. í verjuni eru gjørdar neyvari ásetingar í tilbúgvingini hjá verjuni um hernaðarliga hjálp til sivilar myndugleikar.

Uppgávur hjá verjuni, knýttar at tí sivila, kunnu býtast í tvey:

1. Uppgávur, ið eru vanligur partur av dagliga rakstrinum hjá verjuni
2. Uppgávur, ið líkjast hjálp til almennar myndugleikar ella sivila geiran alment. Hesar uppgávur verða loystar annaðhvørt sum vanlig hjálp til sivilar myndugleikar, her undir politinum, ella sum serstøk hjálp til politiið.

Til 1) Vanligu uppgávurnar hjá verjuni í Føroyum fevna um at hava umsjón av havleiðunum og yvirræðishevd. Sum partur av uppgávunum í Føroyum verða hesar uppgávur loystar sum stuðul til sivila samfelagið:

- Lóðurfyribeining
- Fiskiveiðieftirlit

- Stuðul til leiti- og bjargingartænastur
- Stuðul í samband við dálking á sjónum á landsábyrgdarøkinum

Til 2) Stuðulin hjá verjuni til sivila samfelagið t.d. sum hjálp til politiið, hjálp til sjúklingaflutning (MEDEVAC), hjálp til at basa dálking (olja og kemisk evni) á sjónum verða bara loystar sum hendinga uppgávur. Stuðulsuppgávurnar verða loystar, tá ið mett verður, at tað ikki darvar verjuni at loysa aðrar álagdar og bundnar uppgávur, og tá ið orka er tøk. Á øðrum økjum er verjan við lóg áløgd at loysa uppgávur fyri onnur stjórnarráð ella stýri.

### *2.5.2 Vanlig hjálp*

Vanlig hjálp verður allýst sum, tá ið hjálp verður veitt sivilum myndugleikum við amboðum og/ella fólki hjá verjuni, og góðkenning frá Verjumálaráðnum vanliga ikki er kravd. Stuðulin verður bara veittur, um verjan hevur tøka orku og stuðulin ikki gongur út yvir operativu uppgávuloysnirnar annars hjá verjuni. Stuðulin má ikki verða veittur í óneyðugari kapping við privat virksemi, og verður veittur eftir aðalregluni um, at myndugleikar, ið biðja um stuðulin, rinda útreiðslurnar.

Sum dømi um vanliga hjálp kann verða nevnt sjúklingaflutningur, lívgagnaflutningur, flutningur av amboðum til neyðstødd skip, loftvegisflutningur og skipsflutningur.
Vanlig hjálp til arbeiðið hjá politinum við at halda trygd, frið og skil og við at eftirkanna brotsverk er avmarkað til støður, har politiið metir, at stuðlin ikki ber við sær møguleikan fyri beinleiðis samanbresti millum fólk frá verjuni, eisini heimaverjuni, og møguligar brotsmenn.
Vanlig hjálp til politiið verður veitt óvápnað soleiðis, at fólk frá verjuni í hjálparstøðu ikki hava vápn ella aðrar lutir til valdsnýtslu, t.d. lurk, hundar ella handjørn.

### *2.5.3 Serlig hjálp til politiið*

Serlig hjálp til politiið verður allýst sum, tá ið hjálp verður veitt politinum at fremja sín myndugleika við atliti at trygd, friði og skili ella sum fyribyrging og kanning av revsiverdum viðurskiftum. Í hesum førum kann talan vera um at hjálpa politinum beinleiðis í sambandi við ágang ella valdsnýtslu mótvegis sivilum, ella møguleiki kann vera fyri samanbresti, sum kann seta fólk hjá verjuni í vanda.
Politiið ber fram ítøkiligar umbønir um serliga hjálp til ”Forsvarskommandoen”, sum tekur støðu til, um serlig hjálp kann verða veitt. Tað er ábyrgdin hjá politinum og ”Forsvarskommandoen”, at útvega neyðuga myndugleikan frá danska Løgmálaráðnum og danska Verjumálaráðnum í sambandi við umbøn um serliga hjálp.

### *2.5.4 Lóðurruddingartilbúgvingin*

Verjan stendur fyri lóðurruddingartilbúgvingini í Føroyum. Ruddingin er stuðul hjá politinum og fevnir um leiting, óvirkjan, flutning og at beina fyri lóðri og spreingievni. Lóðurruddingartilbúgvingin verður vanliga kallað EOD (Explosive Ordnance Disposal), sum er altjóða heitið fyri hetta virksemi.

Samband fæst við lóðurruddingartilbúgvingina við at seta seg í samband við politiið, sum setur seg í samband við Ingeniørregimentet í Skive, har vakthavandi/EOD tekur ímóti øllum umbønum um lóðurrudding og samskipar ta orku, verjan skal brúka til lóðurruddingar á sjógvi og landi, sama hvat slag og nøgd talan er um.

Lóðurruddingartilbúgvingin ræður yvir lóðurruddingarliði, sum altíð kann fara til verka eftir umbøn frá politinum, við amboðum at óvirkja og flyta bumbur og annað spreingievni eisini bráðfeingis flutning av lívfrøðiligum og kemiskum evnum samskipað við hinar sertilbúgvingareindirnar.

Biðið verður um flogfars- ella tyrluflutning til Føroyar av politinum ígjøgnum Nationalt Situations- og Operationscenter (NSIOC) hjá Ríkispolitinum.
Við trygdartilburðum og øðrum torgreiddum tilburðum kann vakthavandi/EOD stuðla Fyriskipingarstøðini (KSN) ella Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) við ráðgeving.

## *2.6 Havumhvørvistilbúgvingin*

Havumhvørvisvernd er skipað við løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum. Kapitlarnir 14 og 15 í lógini eru um tilbúgvingina og fráboðanina í sambandi við dálking á sjónum.

Í lógini er allýst, at ábyrgdin av dálking á sjónum er tvíbýtt. Land og kommunur hava hvør sítt ábyrgdarøki.

Sambært § 22, stk. 2 er tað kommunustýrið (kommunala tilbúgvingin), ið hevur ábyrgd av at basa olju- og kemikaliudálking í havnum, herundir fram við bryggjum og havnarløgum og í bátahyljum.

Sambært § 22, stk. 3 er tað landið, ið hevur ábyrgd av at basa olju- og kemikaliudálking á sjónum og á strondini á økjum, ið ikki eru fevnd av stk. 2, tá ið dálkingin er komin av sjónum.

Tað merkir, at tað er kommunan, ið hevur ábyrgd av at basa olju- og kemikaliudálking á sjónum og á strondini á økjum, ið ikki eru fevnd av stk. 2, tá ið dálkingin stavar frá landi.

Báðir partar hava ábyrgd av at gera tilbúgvingarætlanir á sínum økjum, ið skulu sendast til MRCC Tórshavn, ið er tann samskipandi myndugleikin fyri tilbúgving á sjónum.

Tey, sum eru varug við oljudálking á sjónum, skulu alt fyri eitt boða MRCC Tórshavn frá, ið hareftir boðar ábyrgdarmyndugleikanum frá, ið hevur uppgávuna at basa dálkingini.

Sí fylgiskjal 10 – Strikumynd, oljubasing á sjónum.

Útreiðslur í sambandi við at basa dálking á sjónum og á strondum skulu rindast av dálkaranum, men um dálkarin er ókendur, rinda ávikavist kommunan ella landið útreiðslurnar, alt eftir hvørjum ábyrgdarøki dálkingin stavar frá.

Tað er bert loyvið at brúka mekaniska basingarútgerð í Føroyum, men landsstýrismaðurin kann í serligum førum geva loyvi til at brúka kemiska basingarútgerð. Tað er Umhvørvisstovan, ið er myndugleikin, sum kann lata undantaksloyvi í mun til nýtslu av kemiskari basingarútgerð.

## 2.7 Leiting og bjarging (SAR)

### 2.7.1 Alment

Í Føroyum var í 2002 skipað ein leitingar- og bjargingarstøð, MRCC Tórshavn. Endamálið er at tryggja, at átøk verða samskipað, og at hjálp kemur fram í sambandi við bjarging av neyðstøddum í føroyskum sjóøki sambært altjóða reglunum í IAMSAR (International Aeronautical and Maritime Search And Rescue) hondbókini, sum er útgivin av IMO og ICAO (International Maritime Organization og International Civil Aeronautical Organisation).

Fiskimálaráðið hevur yvirskipaða, samskipandi ábyrgd av leiting og bjarging í føroyskum sjóøki og hevur ábyrgd av leiðslu og virksemi. Fiskimálaráðið hevur álagt Vørn at taka sær av dagligu leiðsluni av SAR tænastuni í Føroyum. Arbeiðið verður útint av Maritime Rescue Coordination Center Tórshavn (MRCC Tórshavn), ið er partur av Vørn. Vanliga virkisøkið hjá MRCC er havleiðin úr fjøruni og út á 200 fjórðingamarkið ella miðlinjuna millum lond.

MRCC Tórshavn hevur ábyrgdina av at seta í verk og samskipa á føroyskari havleið - SAR (Search and Rescue).

Samstarvsavtalur eru gjørdar við ymsar partar so sum Atlantic Helicopters, Føroya Politi og Arktisk Kommando.

Harumframt eru avtalur gjørdar við grannalondini, við Her Majesty's Coastguard-Maritime and Coast Guard Agency og JRCC Iceland um at veita hjálp í sambandi við ógvisligar neyðstøður. Eisini eru Føroyar partur av avtaluni um samstarv viðvíkjandi SAR hendingum í arktiska økinum, har millum annað samstarvið við JRCC støðirnar í Noreg er skipað.

Aðrar uppgávur hjá MRCC fata m.a. um at taka ímóti fráboðan um oljudálking á føroyskum havleiðum, sjúkraflutning við tyrlu, at avgreiða boð um yvirgang á føroyskum skipum (ISPS) og at gera og lýsa siglingarávaringar. Eisini liggur MAS

(Maritime Assistance Services) hjá MRCC Tórshavn. Uppgávan er at vera bindilið millum skiparan á skipi, ið tørvar stuðul til eitthvørt, og onnur í maritima umhvørvinum.

Serligt í mun til flogfør í neyð og vanlukkur við flogførum
Loftrúmið yvir føroyska sjóøkinum (í loddrættari linju frá markinum) er tvíbýtt í EGPX FIR[4], ið liggur nakað sunnan fyri Føroyar og BIRD FIR. EGPX FIR er undir eftirliti av Scottish ACC[5], og BIRD FIR er undir eftirliti av Reykjavík ACC. Eitt ”Area Control Center” hevur vanliga eftirlit við flogrutum og flogførum, ið flúgva í hægri luftløgum ímillum fráferð og lending.

Kemur eitt flogfar í neyð í EGPX FIR yvir føroyskum sjóøki, sendir Scottisch ACC boðini víðari til UK ARCC, ið er staðsett saman við National Maritime Operation Centre, ið síðan gevur boðini til MRCC Tórshavn.

Um eitt flogfar kemur í neyð í BIRD FIR yvir føroyskum sjóøki, sendir Reykjavík ACC boðini víðari til JRCC Reykjavík, ið sendir boðini víðari til MRCC Tórshavn.

Frá radiovitanum í Nólsoy (á knattstøðu 615729N 0063700W) í ein radius á 60 sjómíl og upp til 7500 fót verður loftrúmið kallað Vagar TIZ[6]. Vagar AFIS[7] veitir flúgvileiðbeiningar í Vagar TIZ.

Um eitt flogfar kemur í neyð innan fyri Vagar TIZ, er tað Vagar AFIS, ið sendir boð til JRCC Ísland, MRCC Tórshavn og politiið. Tað sama er galdandi, um eitt flogfar kemur í neyð innan fyri EGPX FIR og BIRD FIR og má trygdar-/neyðlenda í Føroyum.

### *2.7.2 SAR-átøk*

MRCC Tórshavn hevur samskipandi leiðsluna, tá ið leiting og bjarging verður sett í verk í sambandi við, at skip, havstøðir ella persónar eru í neyð í føroyskum sjóøki.

JRCC Ísland hevur samskipandi leiðsluna, tá ið flogfør koma í neyð í BIRD FIR (Flight Informaton Region). Í tí føri, at eitt flogfar neyðlendir ella dettur niður í føroyskum sjóøki, hevur MRCC Tórshavn samskipandi leiðsluna av átakinum í tøttum samstarvi við JRCC Ísland.

MRCC Tórshavn kann biðja um hjálp frá politinum, heilsutilbúgvingini, kommunalu tilbúgvingini og verjuni.

---

[4] Flight Information Region
[5] Area Control Center
[6] Trafic Information Zone
[7] Aerodome Flight Information Service

Í tí føri, tá ið kommunala tilbúgvingin, politiið ella heilsutilbúgvingin verður sett inn í samband við eitt átak á sjónum, finnur MRCC Tórshavn í samstarvi við politiið vanliga flutningsmøguleikar til vanlukkustaðið. Hetta kann gerast við tyrlu ella skipi.

Atlantic Helicopters hevur bjargingartyrlu, ið er til taks alt samdøgrið, árið runt, og er tøk til leiting, bjarging og sjúkraflutning

Um ein vanlukka er tætt við land, kann MRCC Tórshavn ella JRCC Ísland lata leiðsluna av SAR operatiónini til ein annan myndugleika á landi. Tað kann vera til politiið ella kommunalu tilbúgvingina.

### 2.7.3 Aðrar bjargingaruppgávur

Politiið hevur samskipandi leiðsluna í sambandi við leiting og bjarging á landi og á vøtnum, í áum og í praksis í havnarløgum og fram við landi, tá ið tað vísir seg at vera skilabesta loysnin, og eindirnar, ið verða nýttar til uppgávuna, eru natúrliga staðsettar á landi. Hetta má tó gerast í tøttum samstarvi við MRCC Tórshavn, ið sambært tilbúgvingarlógini hevur samskipandi leiðsluna av átøkum á sjónum. Politiið og MRCC Tórshavn hava gjørt sínámillum avtalu, sum lýsir markamótið millum samskipandi leiklutin.

Bjarging, framd á vøtnum, áum og havnarløgum er ein partur av kommunalu tilbúgvingini. Tí er alneyðugt, at hesar uppgávur eru lýstar í kommunalu váðametingini, og evnið viðgjørt í kommunalu tilbúgvingarætlanini.

Enn er ein formlig kavaratilbúgving ikki skipað. Umboð fyri kommunurnar hava, tá ið tilbúgvingarlógin var til viðgerðar, víst á ein tørv hesum viðvíkjandi, og í viðmerkingunum til lógina verður víst til, at *"tað verður ein uppgáva, saman við kommununum at finna útav, hvussu ein tílík kavaratilbúgving skal skipast."*[8]

Um tað harafturímóti er talan um at taka upp t.d. fólk, ið hava latið lív, er tað uppgávan hjá politinum, har politiið skal biðja um og gjalda fyri upptøkuna.

## 2.8 Eldur umborð á skipi til havs

Sum er, er eingin serlig sløkkitilbúgving í Føroyum, hvørs uppgáva er at basa eldi umborð á skipum, sum ikki liggja við bryggju. Meginreglan er, at tað er manningin, ið sløkkir eldin umborð. Um ikki ber til at sløkkja eldin, má manningin takast av skipinum, og sløkking setast í verk frá sjósíðuni.

[8] Løgtingsmál nr: 183/2011

## 2.9 Aðrir partar í tilbúgvingarhøpi

Í sambandi við tilburðir, ið vanliga krevja átak frá teimum vanligu átakseindunum, kunnu eisini aðrir myndugleikar, privatar fyritøkur og einstaklingar verða umbiðin.

### 2.9.1 Aðrir myndugleikar

Samferðslumyndugleikar kunnu takast við, tá ið vanlukkur henda við flutningsførum ella á/við flutningskervið. Landsverk hevur ábyrgdina av at halda landsvegirnar opnar.

"Havarikommissionen for Civil Luftfart og Jernbane" er óheftur stovnur, ið kannar vanlukkur og álvarsligar tilburðir á loftferðsluøkinum í Danmark, Grønlandi og Føroyum.

Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgd av at samskipa tilbúgving fyri flutningsaktørar undir Fíggjarmálaráðnum, sum millum annað merkir, at Fíggjarmálaráðið ella stovnur undir Fíggjarmálaráðnum tekur lut í samskipandi kreppustýringini á operationellum og strategiskum stigi.

Strandfaraskip landsins hevur sambært løgtingslóg um fólka- og farmaflutning skyldu at skipa fyri nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, farmaflutningi og/ella flutningi av akførum og nøktandi landvegis fólkaflutningi á teimum farleiðum, har tað hevur stóran samfelagsligan týdning, at skipað verður fyri slíkum flutningi.

Landsverk planleggur og heldur landsvegakervið sambært løgtingslóg um landsvegir. Landsverk er eftirlitsmyndugleiki og vegamyndugleiki fyri landsvegir, tunlar og fyri undirsjóvartunlarnar, Vágatunnilin, Norðoyartunnilin, Eysturoyartunnilin og Sandoyar-tunnilin.

Undirsjóvartunlarnir verða riknir av almennum partafeløgum, ið hava ábyrgdina av at hava eina tilbúgving, sbrt. ásetingunum um egintilbúgving í tilbúgvingarlógarinnar § 15. Tilbúgvingarátøk, sambært § 15, eru ætlað til at seta í verk eitt skjótt fyrstaátak til tess at avmarka skaðan, til onnur hjálp kemur fram til vanlukkustaðið. Onnur hjálp skal í hesum samanhangi í fyrstu atløgu skiljast sum tann kommunala tilbúgvingin. Virksemistilbúgving og átøk í hesum sambandi skal gerast í samráð við staðsettu kommunalu tilbúgvingina, sum í fyrstu atløgu hevur ábyrgdina av, at váðin í kommununi verður eyðmerktur og at hava tilbúgvingarætlanir samsvarandi váðanum av øllum virksemi í kommununi. Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur heimild at gera av, at neyðug tiltøk verða sett í verk í sambandi við nýtslu og skipan av virkseminum í undirsjóvartunlunum til tess at byrgja fyri eldvanda, eldspjaðing ella spreinging, ella fyri at tryggja fullgóðar rýmingar-, bjargingar- og sløkkingarmøguleikar, um eldur kemur í, ella um óhapp stendst av vandamiklum evnum. Hetta skal eisini gerast í tøttum samstarvi við kommunalu tilbúgvingina, sum er myndugleikin, ið skal eyðmerkja váðan,

og sum í síðsta enda hevur ábyrgd av, at nøktandi tilbúgving er tøk, sambært tilbúgvingarlógarinnar § 8 stk. 1.

Um kommunala tilbúgvingin í sambandi við váðametingina metir, at virksemistilbúgvingin ikki er nøktandi, kann kommunan seta seg í samband við Arbeiðs- og brunaeftirlitið og vísa á, hvørji átøk, hon metir, eru neyðug í mun til váðan og á tann hátt tryggja, at egintilbúgvingin, sbrt. § 15, er nøktandi í mun til endamálið at avmarka skaðan, til onnur hjálp kemur fram.

Landsverk hevur veðurstøðir kring landið, sum altíð máta og boða frá støðuni, í sambandi við koyrilíkindi. Landsverk saltar og viðlíkaheldur vegakervið.

Tá ein vanlukka hendir á landsvegi innan fyri kommunumark, hevur staðsetta kommunan, sambært tilbúgvingarlógarinnar § 1 og § 8, skyldu til at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaðan. So skjótt tørvurin á bráðhjálp og vandin eru av, er tað vegmyndugleikin, ið hevur skyldu til at rudda vegin, møguliga fyri ánarans rokning (um ein slík heimild er til staðar).

Í sambandi við ferðsluóhapp á kommunalum ella á privatum vegi er kommunan vegmyndugleiki, og er tað kommunan, ið hevur ábyrgd av at rudda vegin, møguliga fyri ánarans rokning (um ein slík heimild er til staðar).

### *2.9.2 Privatar fyritøkur*

Privatar fyritøkur kunnu verða umbidnar sum ánarar av útgerð. Her kann t.d. takast fram flutningsfyritøkur í sambandi við bráðfeingis flutning av fólki, byggifeløg o.a. í sambandi við átøk, har tørvur er á útgerð, ið kann lyfta tungar lutir, lastbilafyritøkur, ið kunnu flyta umhvørvisvandamikið rusk og oyðilagt byggitilfar, og veitingarfeløg, ið kunnu bróta av streym- ella vatnveiting til oyðilagdar bygningar.

Í millum privatar vinnufyritøkur kunnu eisini vera persónar, ið kunnu vera hentir at heita á. Tað kann til dømis vera ánari ella ábyrgdari í eini fyritøku, ið hevur verið fyri skaða, har viðkomandi persónur liggur inni við vitan um, hvussu bygningurin er innrættaður, ella hevur um hendi serútgerð og serútbúgvin fólk, ið kann brúkast í sambandi við eitt átak. Tað er vinnufyritøkuni til fyrimunar at nýta tøkt tilfeingi, fólk og útgerð, ið kann basa vanlukkuni. Tá slíkt tilfeingi verður nýtt, skal tað vera ein greið avtala millum átaksleiðaran, ið heitir á, og fyritøkuna, sum veitur hjálpina. Tað er umráðandi, at átaksleiðarin kunnar í KST um slíkar umbønir, so hesar verða skjalfestar.

Um so er, at starvsfólk frá einum privatum veitara verða sett inn á einum skaðastaði, hevur TEKNISKI-ÁTL yvirskipaðu ábyrgdina fyri trygdini hjá hesum starvsfólkum, sambært løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi.

Fyritøkur, ið liggja inni við stórum mongdum av eldhættisligum, umhvørvishættisligum ella heilsuhættisligum evnum, eru umfataðar av kapitli 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd og krevja umhvørvisgóðkenning. Fyritøkurnar skulu lýsa fyri myndugleikunum, hvørji vandamikil evni eru í fyritøkuni, hvar tey eru staðsett, hvørjar vanlukkur kunnu koma fyri, hvørji fyribyrgjandi átøk fyritøkan hevur gjørt, og hvussu avleiðingarnar av eini vanlukku kunnu avmarkast. Hetta er í tráð við tilbúgvingarlógarinnar § 15, ið áleggur øllum vandakendum virksemi at hava eina egintilbúgving og at senda inn tilbúgvingarætlanir til staðsettu kommununa og landsstýrismannin í tilbúgvingarmálum.

Fyritøkur, ið hava vandakent virksemi, hava vanliga eitt starvsfólk, sum í sambandi við eina vanlukku hevur ábyrgdina av at taka ímóti kommunalu tilbúgvingini, tá hon kemur á staðið og at kunna átaksleiðaran um støðuna. Sumt vinnuligt virksemi hevur egna tilbúgving, sum verður sett í verk í sambandi við stórar vanlukkur, og sum kann veita kommunalu tilbúgvingini hjálp, tá kommunala tilbúgvingin kemur á staðið. Sum dømi kann nevnast P/F Vága Floghavn.

### *2.9.3 Einstaklingar og sjálvboðin*

Einstaklingar kunnu eisini vera hentir at heita á, um teir vegna útbúgving, vitan ella førleikar kunnu geva átaksmanningini viðkomandi upplýsingar, sum á ein ella annan hátt kunnu vera við til at avgreiða tær uppgávur, ið skulu loysast í sambandi við eitt átak. Tað kann eisini vera einstaklingur, ið hevur sæð nakað, ið kann vera viðkomandi fyri at loysa uppgávuna.

Einstaklingar, sum í sambandi við ein tilburð eru nærhendis ella beint við, kunnu eisini bjóða seg fram til dømis í samband við fyrstuhjálp, leiting eftir fólkið og sum stuðul til bráðflutt fólk. Slíkir einstaklingar verða róptir spontan sjálvboðin.

Sum dømi um spontan sjálvboðin kann nevnast sjálvboðin, sum frá heilsuverkinum hava fingið eina sonevnda “First responder” útbúgving, ið er ein víðkað fyrstuhjálpútbúgving. Í dag eru umleið 280 skrásettir einstaklingar, sum hava fingið tílíka útbúgving í Føroyum, m.a. finnast tílíkir á øllum útoyggjum, har responstíðin kann vera long.

Eisini hevur heilsuverkið í samsvari við Tilbúgvingarætlan Føroya frá 2003 skipað partar av heilsustarvsfólkunum í nærumhvørvinum, ið ikki dagliga arbeiða á sjúkrahúsunum, t.d. heimasjúkrasystrar, heilsurøktarar o.o. í bólkar ella sonevnd sjúkralið. Hesi starvsfólk eru skúlað til at arbeiða á skaðastaði, tá ið talan er um størri vanlukkur og kunnu tí veita lívbjargandi hjálp og vera við til at raðfesta sjúklingarnar soleiðis, at tey, sum hava størst tørv, koma fyrst á sjúkrahúsið, samstundis sum sjúkraflutningsstarvsfólkið kann taka sær av at fáa flutt tey skjótt á sjúkrahús í staðin fyri at brúka dýrmæta tíð á skaðastaðnum.

Einstaklingar kunnu eisini vera partur av sjálvbodnum felagsskapum (t.d. bjargingarfelag ella Reyða Krossi), sum av átaksleiðsluni kunnu biðjast um at hjálpa í sambandi við eitt átak.

Átaksleiðslan skal samskipa og taka støðu til so hvørt, um tað er neyðugt, gagnligt ella ráðiligt, at einstaklingar ella sjálvbodnir felagsskapir taka lut í átakinum. Myndugleikar, ið frammanundan vænta at gera nýtslu av sjálvbodnum í sambandi við ítøkilig átøk, skulu frammanundan gera avtalur um hetta og taka tey sjálvbodnu við í ráðleggingararbeiðið. Eisini skal økisábyrgdarmyndugleikin gera eina neyvari lýsing av mannagongdum fyri leiðslu og samskipan sum heild.

Einstaklingar verða knýttir at tí økismyndugleika, sum teir skulu luttaka fyri, og økismyndugleikin hevur sjálvur ábyrgdina av at tryggja, at starvsfólk eru tøk at taka leiðslu yvir teimum sjálvbodnu í tí ítøkiligu støðuni. Leiðslustarvfólkið kann vera umboð vegna økismyndugleikan ella sjálvboðið fólk. Tað er økismyndugleikin, ið tekur avgerð og hevur ábyrgdina av, hvussu hann skipar seg. Ábyrgdin hjá økismyndugleikanum er millum annað:

- at persónligir upplýsingar um hvønn einstakling verða skrásettir av økismyndugleikanum (ella av sjálvbodnum felagsskapi),
- at gera eina meting av førleikunum hjá hvørjum einstaklingi í mun til átakið,
- at geva hvørjum einstaklingi boð um ítøkiligu støðuna við serligum atliti at váðanum, uppgávuni, útinning, logistik og samskifti. Umframt at einstaklingurin, í sambandi við átakið, vísir til ein útvaldan ábyrgdarpersón (leiðara),
- at geva boð til hvønn einstakling um ikki at gera arbeiði, ið krevur serligar fakligar førleikar, so sum innsavnan av slóðum í sambandi við møguligt brotsverk og bjargingaruppgávur,
- at fylgja við í mun til kropsligu og sálarligu heilsuna hjá hvørjum einstaklingi, og
- at tryggingingarviðurskifti hjá hvørjum einstaklingi eru í lagi í samband við átakið.

Um einstaklingar longu eru partur av einum átaki, tá ið átaksleiðslan fyri ábyrgdarøkið kemur á átaksstaðið, skal átaksleiðarin tryggja sær, at oman fyri standandi skjótast gjørligt verður avgreitt.

## *2.10 Altjóða hjálp*

Í sambandi við stórar og meira torgreiddar tilburðir kann tað vera neyðugt at biðja um hjálp úr útlandinum. Hetta tá talan er um heilt serligar støður, tá tørvurin á tilfeingi, fólki og útgerð, er størri enn tað, ið er tøkt her á landi.

### 2.10.1 Altjóða avtalur

Føroya landsstýri hevur gjørt avtalu við danska tilbúgvingarstýrið, Beredskabsstyrelsen, sum kann veita hjálp við vitan, fólki og útgerð.

Norðurlendskt samstarv

Tann 9. august 1989 gjørdu Danmark, Finnland, Noreg og Svøríki (og seinni eisini Ísland) avtalu um samstarv tvørtur um landamørk fyri at fyribyrgja ella avmarka skaða á fólk, ognir ella umhvørvi, tá ið óhapp henda. Partarnir bundu seg til at veita hvør øðrum hjálp eftir førimuni. Avtalan er staðfest á Løgtingi tann 29. mars 1989. Økisábyrgdarhavarin kann biðja um hjálp og stuðul hjá avvarðandi myndugleika í hinum samstarvslondunum. Myndugleikin, sum veitir hjálp, ger síðan av, hvussu henda hjálp skal veitast. Hjálpin virkar sum ein stuðulseind undir leiðslu av økisábyrgdarhavaranum. Hjálpitól og tilfar kunnu frítt verða flutt millum landamørkini. Tað er Politiið í Føroyum, sum varðar av avtaluni.

Somu lond gjørdu í 2002 avtalu um heilsutilbúgving, har londini millum annað hava bundið seg til at veita hjálp til hvørt annað, um tað gerst neyðugt, at kunna hvønn annan um átøk, ið kunnu fáa ávirkan á onnur Norðurlond og at arbeiða fyri at landsins lóggáva er í samsvari við skyldur sambært avtaluni. Í hesum sambandi er settur ein norðurlendskur samstarvsbólkur, ið verður kallaður ”Svalbardgruppen”. Svalbardgruppen hevur javnan fundir og hevur sína heimildir frá norðurlendska ráðharraráðnum fyri almanna- og heilsupolitikk. Endamálið við Svalbardbólkinum er at betra um samstarvið og at deila førleikar og vitan viðvíkjandi tilbúgving og kreppustýring ímillum tey norðurlendsku londini við tí fyri eyga betri at kunna handfara kreppur[9]. Tað er Landslæknin og heilsuverkið, sum varða av avtaluni.

### 2.10.2 Umbøn og samskipan

Alment

Tað er hvørt øki sær, ið sum meginregla hevur ábyrgd av at tryggja sær, at altjóða hjálp er tøk innan fyri egið ábyrgdarøki. Hetta merkir í høvuðsheitum, at hvørt øki sær hevur ábyrgd av at senda umbøn, taka ímóti og seta útlendsku eindirnar inn í átakið. Samskipanin við aðrar økisábyrgdarhavarar skal vera samsvarandi hesum leiðreglum.

Hóast hvør myndugleiki sær kann avgera spurningin og biðja um millumlanda hjálp, skal samskipanin av hesum gerast í Átaksráðnum fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) ella í Kreppuráðnum fyri Føroyar (Krisestaben), áðrenn sett verður í verk. Hetta er millum annað fyri at kunna hinar økisábyrgdarhavararnar og at virka fyri, at allir myndugleikar hava somu mynd av støðuni.

[9] Mandat for Nordisk sundhedsberedskabsgruppe (Svalbardgruppen) – www.norden.org

Politiið
Um politiið hevur tørv á altjóða hjálp, verður hetta biðið um umvegis NSIOC (Nationalt situations- og operationscenter). NSIOC hevur yvirlit yvir tal av fólki og tí útgerð, ið er partur av átakinum, og yvir tørvin av eyka fólki og útgerð. NSIOC hevur stýrandi, samskipandi og stuðlandi leiklut í mun til politiøkini.

Útlendskir politistar, ið eru umbidnir at hjálpa til, arbeiða altíð undir leiðslu hjá staðsetta politinum og vilja til ein hvørja tíð vera saman við einum bindiliði frá staðsetta politinum.

Kommunala tilbúgvingin
Í tí føri har kommunala tilbúgvingin hevur brúk fyri fólki og útgerð, sum kommunan ikki sjálv hevur tøkt, biður kommunan um grannahjálp, sambært tilbúgvingarlógarinnar § 9. Um eingin onnur avtala er gjørd ímillum kommunurnar frammanundan, skal kommunan, ið hevur biðið um hjálpina gjalda kommununi, ið hevur veitt hjálp, endurgjald av beinleiðis útreiðslum. Grannahjálp verður umbiðin umvegis fyriskipanarstaðið og fyriskipanarstøðina, KST/KSN, ið skjalfestir umbønina.

Kommunala tilbúgvingin kann eisini biðja um hjálp frá landsmyndugleikunum, ið somuleiðis verður gjørt umvegis fyriskipanarstaðið og fyriskipanarstøðina, KST/KSN, ið skjalfestir umbønina.

Um tað gerst neyðugt at biðja um altjóða hjálp, skal hetta leggjast fyri Kreppuráðið fyri Føroyar, har umboð fyri økini eru, og har umboðið fyri landsstýrismannin í tilbúgvingarmálum hevur heimild í løgtingslóg um hald av útreiðslum at taka avgerð um at veita trygd fyri hald av útreiðslum. At trygd verður latin, merkir ikki, at Føroya landsstýri góðtekur at halda endaligu útreiðslurnar av einum átaki. Hesin spurningur verður at taka upp við avvarðandi partar seinni. (Tað kann vera skaðaelvari, kommunur, landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar o.a.)

Útlendskar eindir, sum arbeiða á einum skaðastaði, arbeiða altíð undir leiðslu av TEKNISKI-ÁTL. Útlendskar eindir, ið verða umbidnar, fáa tillutað eitt bindilið, ið skal veita hjálpini stuðul í mun til ymiskar trupulleikar, ið kunnu stinga seg upp.

Heilsutilbúgvingin
Sjúkrahúsverk Føroya hevur í samráð við Landslæknan, KST og KSN ein yvirskipaðan samskipandi leiklut og veitir hjálp í sambandi við umbøn av starvsfólkum og viðgerðararhættum frá útlondum, sum er avtalað millum Føroyar og Danmark og evt. onnur lond.

Læknar og sjúkrarøktarfrøðingar skulu í byrjanarstøðinum hava danska autorisatión til tess, at tey kunnu arbeiða í Føroyum. Fyri ES- og norðurlendskar útbúgvingar er galdandi ein serlig løtt mannagongd til at útvega danska autorisatión. Í sambandi við

fyribils bráðfeingis heilsutørv skal heilsustarvsfólkið sum meginregla frammanundan fráboða tænastuveitingina til Landslæknan, sum síðani boðar Styrelsen for Patientsikkerhed frá. Um hetta ikki er møguligt, kann tað gerast eftirfylgjandi. Í øllum førum skal Landslæknin kunnast um hetta skjótast gjørligt.

Heilsustarvsfólk frá útlondum skulu í sambandi við arbeiðið á einum skaðastaði altíð virka undir leiðsluni av ML-HEILSA. ML-HEILSA skal vísa ábyrgdarbýtinum og leiklutunum í mun til útlendsk heilsustarvsfólk serligan ans á tann hátt, at føroysk lóggáva verður hildin. Útlendsk heilsustarvsfólk kunnu sambært føroyskari lóggávu ikki taka við sær heilivág, uttan so hetta frammanundan er avtalað við apoteksverkið, ið hevur einkarættin at innflyta heilivág til Føroyar.

# 3 Fráboðan

## 3.1 Alment

Tá boð verða send eftir kommunalu tilbúgvingini, heilsutilbúgving, politinum o.a. verður hetta gjørt umvegis alarmsentralin, ið tekur ímóti øllum 1-1-2 uppkallum. Tá ið viðkomandi uppkall koma, verða uppgávurnar uttan drál latnar viðkomandi tilbúgvingareindum.

Fráboðanir í sambandi við SAR-tilburðir verða latnar víðari til MRCC Tórshavn (Maritime Rescue Coordination Center Tórshavn), sum samskipar og setir neyðug átøk í verk.

## 3.2 Alarmsentralurin (1-1-2)

Alarmsentralurin er staðsettur á politistøðini í Tórshavn. Alarmsentralurin er neyðtænasta fyri allar Føroyar og er virkin alt samdøgrið. Alarmsentralurin tekur ímóti øllum 1-1-2 uppkallum og boðar viðkomandi tilbúgvingareindum frá aftaná at hava gjørt eina meting, í hvønn mun uppkall eru viðkomandi ella ikki fyri tilbúgvingareindirnar við útgangsstøði í galdandi lóg, leiðreglum ella avtalum partanna millum, um hvørjar uppgávur eru viðkomandi fyri einstøku tilbúgvingareindirnar.

Fyri at tryggja, at tað í neyðstøðu verður boðað frá til røttu tilbúgvingareindirnar og fyri at tryggja, at yvirlit er yvir tøkar eindir (fólk og útgerð), fara allar boðsendingar, har eingin onnur avtala er gjørd, umvegis alarmsentralin.
Hetta er eisini galdandi í teimum førum, har samskipandi leiðslan hjá politinum (KSN) og/ella har Átaksráðið er savnað. Hetta fyri at tryggja, at samband er millum tey, ið sita á alarmsentralinum, og samskipandi leiðsluna av átakinum.

1-1-2 er alarmsentralurin, har borgarar kunnu ringja og boða frá einari vanlukku, neyðstøðu, eldi, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum, fyri at fáa skjóta og røttu hjálpina á staðið, t.d. sjúkrabil, kommunala tilbúgving og politi.

Er talan um sjóbjarging, fer fráboðanin um neyðstøðu vanliga umvegis VHF ella EPIRB til MRCC Tórshavn/Tórshavn Radio.

Um so er, at fráboðan um vanlukku, neyðstøðu, eld og líknandi á sjónum verður fráboðað til 1-1-2, letur alarmsentralurin boðini víðari til MRCC Tórshavn, sum yvirtekur samskipandi uppgávuna sambært stafetthugsjónini.

## 3.3 Vaktsentralar

Nakrar tilbúgvingareindir hava stovnsett ein mannaðan vaktsentral fyri betur at kunna loysa tær operativu uppgávurnar. Mannaðir vaktsentralar eru hjá politinum, Tórshavnar Sløkkiliðið, á Landssjúkrahúsinum og á MRCC Tórshavn.

Vaktsentralurin hjá politinum í Tórshavn samskipar alt virksemi hjá politinum í Føroyum.

Vaktsentralurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði samskipar kommunalu tilbúgvingina í Tórshavnar kommunu. Vaktsentralurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði er somuleiðis einasti góðkendi vaktsentralur í landinum til m.a. íbinding av sjálvvirkandi ávaringarskipanum.

Vaktsentralurin á Landssjúkrahúsinum samskipar sjúkrabilarnar í flest øllum økjum í landinum (undantikið Norðoyggjar og Suðuroy), umframt at loysa innanhýsis uppgávur á Landssjúkrahúsinum.

MRCC Tórshavn er ein deild í VØRN, ið eisini varðar av Tórshavnradio. Tórshavnradio er strandarradiostøð, sum áhaldandi hevur lurtivakt á altjóða neyðrásum. Tórshavnradio kann móttaka og fráboða við VHF, MF, DSC og NAVTEX.

# 4 Skipan av átøkum

## 4.1 Yvirskipað hugtøk

Í sambandi við eitt átak verður skilt ímillum skaðastaðið (ið er avmarkað við innaru avbyrging) og sjálvt átaksøkið (ið er avmarkað við ytru avbyrging). Skaðastaðið er ábyrgdarøkið hjá teknisku tilbúgvingini í mun til trygd o.a. Politiið hevur ábyrgd av at samskipa tað samlaða átakið á átaksøkinum og hevur ábyrgdina av at hava eftirlit við, hvør kemur inn á økið.

Í tí føri, tá vandi enn kann vera fyri fólk í parti av skaðastaðnum – tað kann til dømis vera ein CBRNE tilburður, nógvur og vandamikil roykur ella vandi fyri at hús rapa - verður lýst eitt vandaøki. Vandaøkið, sum verður ásett av teknisku átaksleiðsluni, gerst sostatt partur av skaðastaðnum, og sum útgangsstøði kunnu bert starvsfólk við serligari trygdarútgerð fáa atgongd til økið.

Staðseting av teimum trimum økjunum kann lýsast við aðaltekningini niðanfyri:




Aðaltekningin skapar útgangsstøði fyri skipan av einum átaksøki í sambandi við allar tilburðir. Í sambandi við meira torgreiddar tilburðir – tað kann til dømis vera eitrandi roykur ella gass – skipar átaksleiðslan átaksøkið eftir tørvi og tekur í tí sambandi støðu til vandan og tørvin á heilt serligum átøkum í mun til vandan. Tað kann vera bráðfeingis boð yvir Kringvarp Føroya. Í fylgiskjølunum 5-7 finst ein meira nágreinilig lýsing av ymiskum skipanum av skaðastøðum.

Tað er treytað av, hvat slag av tilburði talan er um, hvørjir aktørar ítøkiliga verða partar av átakinum, men serliga í sambandi við stórar tilburðir har fleiri fólk eru løstað, eru tríggjar primerar leiðsluuppgávur í einum átaksøki:

- Samskipan av samlaða átakinum og aðrar uppgávur, ið politiið varðar av, sum verður røkt av ÁTL-POLITI. Hetta er skipað í tilbúgvingarlógini og rættargangslógini.
- Leiðsla av tekniska átakinum á skaðastaðnum, ið verður røkt av TEKNISKI-ÁTL. Hetta er skipað í tilbúgvingarlógini og leiðreglum staðsettar við heimild í tilbúgvingarlógini.
- Leiðsla av heilsufrøðiliga átakinum, undir hesum ta heilsufrøðiligu metingina, raðfestingina, viðgerðina, visiteringina og sjúkraflutningin, verður røkt av Sjúkraflutningstænastuni í samstarvi við ML-HEILSA og ÁTL-HEILSA. Hetta er skipað í innanhýsis leiðreglum við støði í løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya og kunngerð um skipan av Sjúkrarflutningstænastuni.

Aðrir myndugleikar og serfrøði kunnu taka lut í og stuðla átakinum, sambært kapittul 2. Fyri at eyðmerkja teir tríggjar átaksleiðararnar og serfrøðina er gjørd ein leiðbeining viðvíkjandi eyðmerkingarvestum til leiðarar fyri hesar átakseindir, sí fylgiskjal 3.

Tað kunnu vera støður, har tilbúgvingareindirnar fáa illgruna um, at eitt brotsverk møguliga er framt. Kommunala tilbúgvingin skal í sambandi við átakið vera varug við, hvat kann vera orsøk til vanlukkuna. Um kommunala tilbúgvingin kemur fram á illgrunasom viðurskifti, skal politiið hava boð beinan vegin og møgulig prógv skulu um gjørligt tryggjast. Somu viðurskifti eru galdandi fyri starvsfólkið frá heilsutilbúgvingini og fyri hjálparfólkið.

Tað er uppgávan hjá politinum at seta í verk eina brotsgerðarstaðaravbyrging, men um politiið enn ikki er komið á staðið, verður uppgávan loyst av kommunalu tilbúgvingini í samráð við politiið.

Staðseting av brotsgerðarstaðaravbyrging kann lýsast við aðaltekningini niðanfyri (dømi vísir ein tilburð, har illgruni er um, at ein bumba er brostin, har lýsta fjarstøðan á 200 m kann broytast í mun til støðuna).



Í sambandi við trygdartilburðir, sí 5.4, er tørvur á einum serligum politiátaki, bæði í mun til vandan, men eisini í mun til kanningararbeiðið. Í hesum føri arbeiðir politiið við hugtøkunum brotsstaður og operatiónsøki.

Er talan um eina hending, har tørvur er á einum átaki frá politinum, einum átaki frá kommunalu tilbúgvingini og einum átaki frá heilsutilbúgvingini verður staðsetingin av teimum ymisku geirunum sett í samstarvið ímillum myndugleikarnar.

## *4.2 Átaksleiðslan*

### *4.2.1 Vanligar uppgávur*

Í sambandi við stórar tilburðir verður ein átaksleiðsla skipað. Átaksleiðslan hevur støð í fyriskipanarstaðnum, KST, undir samskipandi leiðslu av politinum.

Í átaksleiðsluni eru leiðsluumboð frá teimum myndugleikum, sum hava ávísar átaksuppgávur í mun til ein ávísan tilburð. Bulurin í átaksleiðsluni fyri stórar tilburðir við løstaðum persónum telur hesar tríggjar átaksleiðararnar, t.v.s. ÁTL-POLITI, ÁTL-HEILSA og TEKNISKI-ÁTL.

Fyri at tryggja eitt munagott átak er týdningarmikið, at átaksleiðslan hevur eina felags fatan av støðuni og út frá henni setur mál fyri, hvussu átakseindirnar kunnu røkka ásettu málunum í felag.

Tað er týdningarmikið, at átaksleiðslan vísir sínámillum álit, er opin fyri fleiri møguligum loysnum og ger eina meting av møguligum avleiðingum. Fyri hvønn átaksleiðara er yvirskipað galdandi, at hann – afturat at hava førleika og kunnleika til galdandi reglur og bygnað innan egið økið – skal hava kunnleika til hini økini og teirra leiklutir og ábyrgd, eins og hann, í støðuni, má duga at tillaga seg og vera førur fyri at taka neyðugar avgerðir.

ÁTL-POLITI samskipar, vegna Føroya landfúta, tað samlaða átakið í øllum átaksøkinum, soleiðis, at samlaða átakið verður so munagott sum møguligt. ÁTL-POLITI hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, at tað verður samstarvað, samskipað, og at átaksøkið verður skipað, men hevur eisini uppgávur í sambandi við tilbúgvingarboð, bráðflytan, avbyrgjan og atgongueftirlit. Stuðulseindir, sum verða partur av einum átaki, eru undir ræði av ÁTL-POLITI, tá ið tær eru á átaksøkinum, men uttan fyri skaðastaðið.

TEKNISKI-ÁTL hevur ábyrgd av teknisku leiðsluni av átakinum á skaðastaðnum, harundir trygd og arbeiðsumstøðum hjá starvsfólkinum. Átøk frá øllum átakseindum á skaðastaðnum skulu tí vera í tøttum samstarvi við TEKNISKI-ÁTL.

Tað skal viðmerkjast, at ábyrgdin av at fyriskipa arbeiðið (átakið) á skaðastaðnum trygt og heilsugott, sambært løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi[10], liggur líka so nógv hjá TEKNISKI-ÁTL sum øðrum arbeiðsgevara/-leiðara, sum hava leiðbeiningarheimildir mótvegis sínum starvsfólkum. Á skaðastaðnum er hetta galdandi fyri øll starvsfólk, ið eru sett inn at loysa eina uppgávu (liðleiðarin mótvegis manningini hjá sløkkiliðnum, ÁTL-HEILSA mótvegis heilsustarvsfólkunum o.fl.).

ÁTL-HEILSA hevur ábyrgd av operativa heilsufakliga arbeiðinum á skaðastaðnum. Umframt, at vera í tøttum tvørfakligum samstarvi við hinar átaksleiðararnar, hevur ÁTL-HEILSA tætt samstarv við ML-HEILSA, sum inni á skaðastaðnum raðfestir og viðger sjúklingar. ÁTL-HEILSA skal tryggja sær, at heilsufakliga arbeiðið á skaðastaðnum er rætt skipað og at sjúklingar koma á sjúkrahús.

Undir samskipandi leiðsluni hjá politinum hava teir tríggir átaksleiðararnir eina røð av felags (tvørfakligum) uppgávum á einum átaksøki, sí niðanfyri.

Í teimum førum, har eindir, ið hava ein serligan fakligan førleika, verða settar inn í einum átaksøki, liggur ábyrgdin fyri fakliga átakinum hjá leiðarunum fyri einstøku eindirnar. Hesir fakligu leiðarar eru, við hvør sínum fakliga serkunnleika, partur av átaksleiðsluni og viðvirka soleiðis til ta best hóskandi loysnina í samlaða átakinum. Bulurin í átaksleiðsluni kann soleiðis stuðlast alt eftir, hvør ólukkan er.

Í parti 4.4 – 4.6 verða uppgávurnar hjá teimum trimum átaksleiðarunum, umboðandi sítt ábyrgdarøki, meira nágreiniliga lýstar.

### *4.2.2 Fyrsti fundur í átaksleiðsluni*

Ávegis til átaksøkið fáa TEKNISKI-ÁTL, ÁTL-POLITI og ÁTL-HEILSA, í tann mun tað ber til, sínámillum samband í lag fyri at avtala eitt møtistað og eina farleið inn á økið við atliti at avtalaða vandaøkinum (t.d. í sambandi við ein CBRNE-tilburð). Tá teir tríggir átaksleiðararnir eru komnir saman í átaksøkinum, verður ein stuttur ”fyrsti fundur” fyri at avtala tað heilt grundleggjandi og neyðuga, har tann, sum fyrstur er komin fram á staðið, kunnar hinar báðar um støðuna.

Evnir til fyrsta fundin kunnu t.d. vera:

- At tryggja at allir kunnu samskifta (sí reglubrot 4.7).
- At fáa eina felags fatan av støðuni.
- At áseta vavið av skaðastaðnum og átaksøkinum og eyðmerkja møguligu vandaøkini, har vandar verða neyvari lýstir.
- Staðseting av samskipanarstaði (KST), møtistaði, farleið og savningarøki (opmarsh).
- At áseta møguligt brotsgerðarstað og at seta upp eina brotsgerðarstaðaravbyrging.

[10] Løgtingslóg nr. 79 frá 11. Mai 2000

- At finna fram til nøkulunda tal av løstaðum og at staðseta viðgerðarstað og til- og frákoyringarveg til ambulansu.
- At gera av, um bráðflutningur skal setast í verk, ella um fólk skulu halda seg innandura.
- At gera av, um tilbúgvingarboð skal varpast út.
- Avtala nær og hvar næsti fundur verður.

### *4.2.3 Seinni fundir í átaksleiðsluni*

Umframt "fyrsta fund" hjá átaksleiðsluni møtist átaksleiðslan eftir tørvi fyri at avgera staðseting av neyðugu hentleikunum í átaksøkinum, sum m.a. fevnir um heintanarstað, savningarstað til deyð, viðgerðarstað og møguliga at tillaga slíkar støð fyri áhaldandi at fáa eitt greiðari yvirlit yvir gongdina av átakinum, og um valdar loysnir kunnu tillagast. Hesir fundir eru vanliga á fyriskipanarstaðnum, KST.

Væntast kann, at trýst verður á átaksleiðsluni, og tí kann gerast trupult alla tíðina at varðveita eitt greitt yvirlit. Ein háttur at varðveita yvirlitið er, at tað á fundunum verður arbeitt eftir føstum leisti:

- Vel eitt stað í KST, har kort og talvur síggjast.
- Avtala fundartíðir hjá átaksleiðsluni.
- Skapa frið til samstarvið og slepp undan órógvi. Boða t.d. frá, at tað eina løtu bara skal órógvast við átrokandi boðum.
- Greina tríggjar tær týdningarmestu uppgávurnar ella vandamálsstøðurnar.
- Deil innanhýsis, hvussu fatanin av støðuni er í løtuni og breiðka um felags fatanina av støðuni.
- Brúka fundirnar til at avtala felags metingar av støðuni fyri at skapa grundarlag fyri felags avgerðum.

### *4.2.4 Fyriskipanarstaður (KST)*

KST verður skipað av politinum og er savningarstað hjá átaksleiðsluni, men tað merkir ikki, at átaksleiðslan altíð er í KST. Ein ella fleiri av átaksleiðarunum kunnu fara úr KST t.d. fyri at gera kanningar í átaksøkinum ella á skaðastaðnum ella at møta nýggjum átakseindum, sum eru komnar á staðið.

KST kann skipast í einum ella fleiri akførum, einum ella fleiri bygningum ella øðrum egnaðum hølum og innrættast við samskiftisútgerð, yvirlitstalvum, fundarútgerð o.ø. Politiið hevur ein bil, sum kann brúkast sum tøkniligur stuðul hjá átaksleiðsluni.

KST skal skipast so tætt at skaðastaðnum sum gjørligt og skal týðiliga merkjast, so allir leiðarar, sum koma á átaksøkið, finna tað og koma á KST fyri at fáa kunning og uppgávur. Í hendingum, har yvirgangur ikki kann útihýsast, eigur staðið at verða trygdarkannað, áðrenn KST verður skipað, og aftaná vera undir vaktarhaldi.

Tá KST er skipað, skulu allar umbønir frá átaksleiðsluni sum útgangsstøði stílast til KST, ið miðlar umbønirnar víðari til fyriskipanaðarstøðina, KSN, ella vaktsentralin hjá politinum og haðani møguliga víðari til Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab). Um so er, at ein umbøn ikki er stílað til KST, tað kann vera ein innanhýsis umbøn um hjálp, skal myndugleikin, ið hevur umbiðið hjálpina, kunna KST um, at umbønin er farin, so hon kann skjalfestast. Øll kunning til KSN og til Átaksráðið skal ígjøgnum KST.

## 4.3 Kreppusamskifti

### 4.3.1 Endamál

Í sambandi við stórar heilt serligar tilburðir er ein partur av myndugleikauppgávuni hjá myndugleikunum at samskifta til og við almenningin. Endamálið við samskiftinum er at minka um negativu avleiðingarnar við skjótt at miðla út týðandi, beina og samskipandi kunning, so borgarin hevur best møguligt grundarlag at taka hond um egna trygd og heilsu.

Myndugleikarnir skulu javnan samskifta um støðuna, um váðar, um avleiðingar orsakað av tilburðinum og um, hvussu fólk skulu fyrihalda seg í mun til tilburðin. Samskifti skal eisini tryggja, at álit er á, at myndugleikarnir arbeiða miðvíst við at standa ímóti teimum avleiðingum, ið kunnu hugsast at standa av tilburðinum og skjótast gjørligt fáa endurskapa ein vanligan gerandisdag. Vanliga skal samskifti vera ein partur av øllum sjónligum tilbúgvingarátøkum.

Í sambandi við størri, heilt serligar tilburðir er tað umráðandi, at fjølmiðlar og borgarar verða upplýst, hóast tað ikki er nýggj týðandi kunning. Hetta er neyðugt fyri at skapa tryggleika við í verki at vísa, at myndugleikarnir eru varir við tørvin at fáa kunning og fyri at forða fyri leysatíðindum og –søgum, sum standast av vantandi vitan um veruligu viðurskiftini. Kunning mótvegis fjøldini skal – um gjørligt – leggja upp fyri tørvinum um kunning á øðrum máli enn føroyskum.

### 4.3.2 Uppgávur

Kunning til almenningin skal vera ígjøgnum tær skipanir, ið eru týðandi og mest munagóðar í mun til móttakarabólkin og sjálvan tilburðin. Tað kann vera sosialir miðlar, samrøða við fjølmiðlar, tíðindaskriv, tíðindi á heimasíðu, tíðindafundir, sms-tænastur og bráðfeingisboð. Rátt verður til, at eitt eftirlit verður sett í verk, ið skal hava eftirlit við, hvat sosialir miðlar og fjølmiðlar varpa út. Hetta er fyri at laga kunningina eftir tørvinum, umheimurin hevur.

Tað er hvør myndugleiki sær, ið hevur ábyrgd av at hava eina kunningartilbúgving, ið kann lagast eftir, hvussu stórur tilburðurin er, og at nóg mikið av fólki og útgerð er til at loysa uppgávuna.

Kunning til almenningin skal vera løtt at skilja og skal millum annað innihalda niðanfyri nevnda:

- Nær er vanlukkan hend?
- Hvat er hent?
- Hvar er vanlukkan hend?
- Hvørjar eru avleiðingarnar?
- Hvussu skal almenningurin bera seg at í mun til tilburðin? - og hví?
- Hvussu væntast støðan at taka seg upp?
- Hvat gera myndugleikarnir?
- Hvar og nær skal væntast at fáa meira kunning?

### *4.3.3 Ábyrgd og samskipan*

Hvør myndugleiki úttalar seg um egin átøk og um viðurskifti, sum eru serlig fyri økið, myndugleikin hevur ábyrgdina av, í samsvar við meginregluna um økisábyrgd og letur frá sær tær upplýsingar, ið myndugleikin metir vera fakliga neyðugar við tí fyri eyga at minka um negativu avleiðingarnar, ið standast av tilburðinum. Tað liggur í tí sambandi á hvørjum myndugleika at tryggja, at fjølmiðla- og samskiftisparturin er samskipaður bæði innanhýsis í myndugleikanum og ímillum myndugleikar fyri at tryggja sær, at útsagnir frá myndugleikunum ikki standa í andsøgn við hvørja aðra. Hetta er galdandi í mun til sjálvt átakið og í mun til restina av kreppustýringarskipanini, har undir eisini upplendið hjá ábyrgdarmyndugleikunum. Kreppusamskiftið er ein leiðsluábyrgd. Uppgávan kann avhendast, men ábyrgdin liggur framhaldandi hjá leiðarunum hjá teimum myndugleikum, ið eru partur av átakinum.

Politiið hevur samskipandi ábyrgd av kreppusamskiftinum og úttalar seg yvirskipað um støðuna og um samlaða átakið hjá myndugleikunum. Í hesum sambandi liggur tað á politinum at tryggja, at tann kunning, ið verður almannakunngjørd, er eftirkannað og er góðkend av hinum myndugleikunum, ið hava við átakið at gera. Eftirkanning og góðkenning av kunningini, ið skal sendast út, kann við fyrimuni verða gjørd í Átaksráðnum fyri Føroyar (Den Færøske Beredskabsstab). Áheitanir í sambandi við serlig viðurskifti verða vístar til økisábyrgdarmyndugleikan.

Tað er sum útgangsstøði altíð politiið, sum samskipandi myndugleiki, ið úttalar seg til fjølmiðlar og almenningin um talið av løstaðum og talið av deyðum. Í teimum førum, har heilsumyndugleikarnir ynskja at úttala seg, til dømis um talið av fólki, ið eru komin til viðgerð, og um hvørjari heilsustøðu tey eru í, skal hetta samskipast við politiið.

### *4.3.4 Tilbúgvingarboð*

Í einari bráðfeingisstøðu har vandi er, (ella kann vera) fyri skaða á fólk, djór, umhvørvi, virðir ella ognir kunnu eini tilbúgvingarboð varpast út.

Allir almennir og kommunalir myndugleikar í Føroyum kunnu senda út tilbúgvingarboð til Kringvarp Føroya. Sum ískoyti kunnu sosialir miðlar nýtast til at bera bráðfeingisboðini.

Tilbúgvingarboð skulu bert nýtast, tá talan er um eina bráðfeingisstøðu, ið er lívshóttandi fyri fleiri fólk. Tað kann tó vera orsøk til at senda út boð í sambandi við eld, har roykurin kann vera eitraður og leiðbeina fólk um at halda seg innandura og lata vindeygu og hurðar aftur. Hetta skal tó helst gerast sum tíðindaskriv, á sosialu miðlunum ella á heimasíðum.

## 4.4 Átakið hjá politinum

### 4.4.1 Samskipan av øllum átakinum

ÁTL-POLITI hevur ábyrgdina av, at tað samlaða átakið verður samskipað eftir yvirskipaðum raðfestingum og avgerðum Fútans.

Í stórum tilburðum – ella út frá eini meting – fer ein politileiðari við teimum røttu førleikunum til skaðastaðið sum ÁTL-POLITI. Til hesin leiðarin kemur á skaðastaðið, virkar tann royndasti politisturin í tí fyrsta bilinum sum ÁTL-POLITI.

Hendingaferð og í minni tilburðum er tað tann royndasti politisturin í fyrsta bilinum á skaðastaðnum, sum er átaksleiðari hjá politinum.

Í sambandi við stórar tilburðir skipar ÁTL-POLITI eitt fyriskipanarstað (KST), haðani tað samlaða átakið á átaksøkinum verður samskipað.

Uppgávan hjá ÁTL-POLITI, sum ábyrgdarhavandi av samskipandi leiðsluni á átaksøkinum, er:

- at fyrireika og skipa fyri bráðflutningi av fólki í samstarvi við TEKNISKI-ÁTL,
- at umhugsa tørvin á at býta átaksøkið upp, um fleiri skaðastøð eru,
- at áseta skaðastaðið og stødd á átaksøki í samstarvi við samlaðu átaksleiðsluna,
- at meta um – í samstarvi við TEKNISKI-ÁTL – um eitt øki er hótt ella í vanda (nýtt vandaøki, um ættin skiftir),
- at ávísa og tryggja koyrileið t.d. ambulansuveg inni á átaksøkinum,
- at gera eitt fyribils tyrlulendingarpláss um neyðugt,
- at tilnevna KST-leiðara og radio-/loggførara,
- at áseta møti- ella kontakttíðir fyri TEKNISKI-ÁTL, ÁTL-HEILSA og aðrar viðkomandi leiðarar,
- í stórum tilburðum at velja leiðslu til savningarøkið (opmarch), savningarstaðið o.a.
- at seta neyðugt vaktarhald og avbyrging (innaru og ytru), har undir at tryggja møgulig virðir,
- at geva støðumetingar til fyriskipanarstøðina (KSN),
- at samskipa hjálp/stuðul vegna øll viðvirkandi
- at samskipa atgongdina fyri fjølmiðlarnar á sjálvum átaksøkinum,

- at umhugsa tørvin á stovnan av einum móttøku- og avvarðandistaði í t.d. skúlum, bygdarhúsum, hallum í samstarvi við kommununa (umvegis TEKNISKI-ÁTL) ella KSN
- at tryggja neyðuga skjalprógvan, t.d. við mynda- ella videoupptøkum og
- at samskipa kost og vesi viðurskiftir til luttakandi fólki.

### *4.4.2 Aðrar uppgávur hjá politinum*

Samstundis, sum politiið hevur tann samskipandi leiklutin, hevur politiið aðrar politifakligar uppgávur í tí tvørfakliga átakinum.

Yvirskipað skal politiið tryggja lóg og landaskil (sí §108 í rættargangslógini), har undir at:

- Gera og uppihalda øll sløg av avbyrgingum og forðingum.
- Gera og uppihalda neyðuga samskiftisnetið.
- Gera neyðugar skrásetingar og eyðmerkingar.
- Seta í verk og fremja kanningararbeiði bæði aftur- og framálítandi.
- Fáa í lag og uppihalda møguliga trygdarkropskanning og atkomueftirlit.
- Standa fyri møguligari fylgdarkoyring.

Fyri at gera ta neyðugu framløguna, skjalprógvanina og samskiftið hevur politiið ymsar innanhýsis førleikar, sum alt eftir støðuni verða nýttir taktiskt. Til dømis kunnu nevnast politivarðferðir, hundavarðferðir, reaktiónvarðferðir, aktiónstyrkin, taktiskt kanningararbeiði, National Kriminalteknisk Center (NKC), kriminaltekniskar kontaktpersónar, Katastrofuregistrering (KATREG) o. fl.

## *4.5 Átakið hjá kommunalu tilbúgvingini*

TEKNISKI-ÁTL hevur teknisku leiðsluna á innara skaðastaðnum. Hetta merkir, at hann hevur ábyrgdina av at fyribyrgja og bøta um skaðar (í breiðum týdningi) á skaðastaðnum, og at hetta verður gjørt á ein tryggan og nøktandi hátt, trygdini og heilsuni viðvíkjandi. Hetta er tó ikki galdandi fyri reint medisinsk átøk í mun til løstaðar ella fastkleimdar persónar. Reint medisinsk átøk verða sett í verk av heilsutilbúgvingini.

Tekniski átaksleiðarin (TEKNISKI-ÁTL) hevur sostatt yvirskipaðu leiðsluna av øllum innsettum tekniskum eindum innanfyri innaru avbyrging og ábyrgdina av, hvussu hesar eindir virka inni á skaðastaðnum í sambandi við tekniskar uppgávur, so sum bjarging, sløkking, avstíving, burturbeining av bygningslutum/akførum/vraklutum og uppgávur í sambandi við at tryggja umhvørvið. TEKNISKI-ÁTL hevur harumframt ábyrgdina av at meta um, um fólk á skaðastaðnum møguliga kunnu vera dálkað (CBRNE-tilburðum) í ein mun, ið krevur, at hesi skulu reinsast, og um so er at seta reinsing í verk sum skjótast.

Tað kunnu vera støður, har TEKNISKI-ÁTL ikki verður boðsendur til eitt skaðastað í samband við smærri tilburðir (t.d. eldur í ruskspann úti, smáir uttandura eldar, minni

dálking), ella at hann í fyrsta lagi kemur á skaðastaðið, eftir at fyrsta átakseind frá kommunalu tilbúgvingini er komin á skaðastaðið. Í hesum førum er tann tekniska leiðslan av átakinum á skaðastaðnum, áðrenn TEKNISKI-ÁTL er komin, undir leiðslu av TEKNISKI-LL frá fyrstu átakseind. TEKNISKI-ÁTL skal altíð boðsendast, tá ið tørvur er á at seta inn fleiri átakslið ella fleiri átakseindir á skaðastaðið.

Grundað á eina støðumeting av váðanum avgerð TEKNISKI-ÁTL, um tað er ráðiligt at senda eindir inn á skaðastaðið, og hvussu teknisku uppgávurnar á skaðastaðnum skulu loysast.

TEKNISKI-ÁTL gevur síni boð gjøgnum TEKNISKI-LL – ella annan ábyrgdarpersón (t.d. sløkkiliðsfólk við longst tænastutíð) – ið er møttur.

TEKNISKI-ÁTL hevur í hesum sambandi ábyrgdina av at kunna allar innsettar átakseindir um at varðveita slóðir og annað próvtilfar í sambandi við kanningararbeiðið hjá politinum.

TEKNISKI-ÁTL hevur ábyrgdina av fleiri uppgávum á skaðastaðnum, og avgerðir hansara kunnu hava ávirkan á viðurskifti uttanfyri innaru avbyrging. Sostatt skulu partar av avgerðunum takast í samráð við hinar átaksleiðslurnar (politi, sjúkraflutningstænastuna) og aðrar myndugleikar o.a., sum eru ella verða partar av átakinum.

TEKNISKI-ÁTL hevur, sum ábyrgdarhavandi fyri leiðsluna av tí tekniska átakinum á skaðastanum, hesar uppgávur:

- at gera eina støðumeting, undir hesum eina váðameting, ið skal tryggja, at lívbjargandi- og tekniski parturin av átakinum verður útintur á einum tryggum og heilsufakligum forsvarligum grundarlagi,
- at stuðla politinum í metingini, um tað er neyðugt at bráðflyta fólk,
- at áseta víddina av einum møguligum vandaøki (Í sambandi við CBRNE-tilburðir kann hetta verða gjørt í samráð við avvarðandi serfrøðingatilbúgving hjá Beredskabsstyrelsen),
- at greina og lýsa endamálið við tekniska átakinum og seta ætlanir í verk í mun til átakið,
- at geva TEKNISKI-LL hjá møttu kommunalu eindunum átaksboð um fyrsta átakið,
- at tryggja gott og viðkomandi samskifti við egnan vaktsentral og/ella alarmsentralin um m.a. komutíðir og støðufráboðan, umframt aðra neyðuga kunning,
- at gera (for)kanningar fyri at fáa neyðuga grundarlagið til at fremja átakið,
- at gera eina ætlan um og seta í verk tað endaliga átakið,
- at lýsa tørvin á útgerð og fólki fyri at tryggja, at átakið kann fremjast á fullgóðan hátt og meta um tørvin á aðrari manning og útgerð,

- umframt egna manning at biðja um neyðugu hjálpina (grannahjálp, bjargingarfelag, privatar veitarar, o.s.fr.), sum vanliga verður umbiðið umvegis KST,
- at skipa neyðugan tekniskan leiðslubygnað við tí endamáli at fáa tíð og rúmd til skaðastaðsleiðslu,
- alsamt samskipa og samskifta við allar TEKNISKI-LL frá kommunalu tilbúgvingini,
- at hava eftirlit við átakinum og meta um, um átakið virker eftir ætlaðan fyri at tryggjað, at tað ikki bindur óneyðuga útgerð og fólk, og
- at seta í verk møguligt átak móti fylgiskaðum.

## *4.6 Átakið hjá Heilsutilbúgvingini*

### *4.6.1 ML-HEILSA & ÁTL-HEILSA*

Medisinski Leiðarin Ambulansa, ML-HEILSA, hevur heilsufakligu ábyrgdina í sambandi við tað prehospitala átakið. ML-HEILSA samstarvar við hinar átakseindirnar. Átaksleiðari Ambulansa, ÁTL-HEILSA hevur ta yvirskipaðu operativu ábyrgdina av átaksøkinum.

Allar prehospitalar eindir, undir hesum sjúkraflutningstænastan, vísa til ML-HEILSA á sjálvum skaðastaðnum. ÁTL-HEILSA hevur taktisku og operativa ábyrgdina. Starvsfólkini í Sjúkraflutningstænastuni við besta førleika í fyrsta sjúkrabilinum á skaðastaðnum hava leiðsluábyrgd - til ML-HEILSA og ÁTL-HEILSA koma á staðið.

Tað mest umráðandi í sambandi við tað prehospitala átakið er at bjarga mannalívum. Starvsfólk í Sjúkraflutningstænastuni skulu skjótt kunna meta, raðfesta, viðgera og flyta sjúklingarnar til endaliga viðgerð. Fyri at kunna loysa uppgávurnar á skynsaman hátt er neyðugt, at átakseindirnar arbeiða væl saman.

Uppgávurnar hjá ML-HEILSA eru at:

- meta um primera heilsufakliga átakið á skaðastaðnum, undir hesum at meta um talið av løstaðum og møguligum skaðamynstri við tí fyri eyga at skipa fyri prehospitalari triagé og viðgerð,
- leiða heilsutilbúgvingarliga átakið á skaðastaðnum,
- tryggja eitt áhaldandi yvirlit yvir heilsufakliga átakið á skaðastaðnum,
- veita heilsufakliga ráðgeving til ÁTL-POLITI og TEKNISKI-ÁTL,
- samstarva við Landslæknan, tá ið hann verður tilkallaður,
- meta um og gera av, um tað er neyðugt við kreppuhjálp í átaksøkinum, (krepputoymi), og um tørvur er á einum samskipandi sálarligum kontaktpersóni,
- í samráð við ÁTL-HEILSA at gera av, nær tað heilsufakliga átakið á skaðastaðnum steðgar.

Uppgávurnar hjá ÁTL-HEILSA eru at:

- leiða tað samlaða átakið á skaðastaðnum, undir hesum arbeiðið hjá sjúkraflutningstænastuni, akuttbilar, tyrluflutning, umframt onnur heilsustarvsfólk, ið eru boðsend,

- tryggja sær eitt yvirlit so hvørt yvir heilsufakliga átakið á skaðastaðnum,
- tryggja eina framhaldandi fráboðan til móttakandi sjúkrahús,
- hava ábyrgdina av samskipanini av og manningini á samliplássum og peika út leiðarar fyri útberaratænastuna á samliplássinum og á bráðflutningsstaðnum,
- hava ábyrgdina av samskipanini av flutningi til móttakandi sjúkrahús,
- samstarva við Landslæknan tá ið hesin er boðsendur,
- boðsenda neyðugt eyka starvsfólk og akfør/útgerð í sambandi við prehospitala átakið hjá Sjúkraflutningstænastuni.

### *4.6.2 Landslæknin*

Landslæknin veitir vanliga átaksleiðsluni ráðgeving í sambandi við CBRNE-tilburðir ella aðrar tilburðir, har persónar hava verið útsettir (eksponeraðir) fyri heilsuskaðiligum árinum, eitt nú frá eitrandi royki.

Uppgávurnar hjá Landslæknanum eru at:

- avmarka teir persónar, ið hava verið úti fyri ella kunnu hava verið úti fyri eksponering, grundað á upplýsingar, hann hevur fingið (evt. í samráð við týðandi serfrøðingar),
- gera av hvørji heilsulig tiltøk eiga at setast í verk yvir fyri teimum, ið hava verið eksponerað, evt. í samráð við aðrar serfrøðingar,
- upplýsa skrásettar persónar og um neyðugt onnur nærhendis skaðastaðnum um fyrivarni og sjúkrafyribyrging,
- gera av hvørja viðgerð viðkomandi skal hava við fyribyrgjandi heilivági,
- tryggja sær samband við móttakandi sjúkrahús, ið skulu taka ímóti sjúkum ella persónum við eyðkennum,
- veita upplýsingar til átaksleiðsluna, Sundhedsstyrelsen og Styrelsen for Patientsikkerhed, eins og móttakandi sjúkrahús,
- vera við til at gera tilbúgvingarfráboðanir,
- koma á staðið ella veita ráðgeving vegna Epideminevndina í sambandi við karantenu ella við tvangsuppílegging í sambandi við almenna vandamikla smittandi sjúku.

## *4.7 Samskifti*

Í Føroyum finst ikki, eins og vit kenna tað frá londunum kring okkum, ein felags samskiftissskipan til kreppusamskifti. Hvør tilbúgvingareind hevur egna samskiftisskipan. Mest vanligt eru skipanirnar analogar. At hvør tilbúgvingareind hevur egna samskiftisskipan er ein avbjóðing fyri tað tvørfakliga samstarvið á skaðastaðnum. Loysnin er, at átaksleiðslan á skaðastaðnum samskiftir innanhýsis á skaðastaðsradio, kanal 2 (423,75 MHz) – sí fylgiskjal 4.

Avbjóðingin hevur sambært eftirmetingum víst seg at vera, at samskiftið á skaðastaðnum ikki verður ”eygleitt” av fyriskipanarstøðini, KSN, og sostatt mugu boð gevast fyri seg yvir aðra radioskipan ella yvir telefon.

Hetta setur stór krøv til átaksleiðsluna á skaðastaðnum bæði í mun til innanhýsis samskifti, men sanniliga eisini at boð, ið verða givin á fyriskipanarstaðnum, KST, verða endurgivin rætt, og tað krevur, at samskiftið frá skaðastaðnum til upplendið hjá hvørjari einstakari tilbúgvingareind fer fram so hvørt.

Tað er neyðugt, at átaksleiðararnir hava minst tvey samskiftistól (um ikki trý – alt í mun til hvussu samskiftistólini røkka), eitt til innanhýsis samskifti í átaksleiðsluni og eitt til samskifti við egnar eindir og egið upplendi.

Hetta merkir, at samskiftisparturin kann verða torførur hjá átaksleiðaranum at taka sær av einsamallur, um talan er um ein stóran ella torgreiddan tilburð og krevur tí, at toymisarbeiðið á skaðastaðnum verður styrkt í mun til samskiftið – sí kapittul 5.

## 4.8 Dronur (Kallbýflugur)

Í sambandi við summi átøk kann tað verða neyðugt fyri kommunalu tilbúgvingina at nýta dronur fyri at fáa eitt betri yvirlit yvir skaðastaðið.

Politiið kann eisini nýta dronur í sambandi við politiuppgávur, so sum brotsgerðarstaðskanningar og fyri at fáa eitt betri yvirlit í sambandi við stóran ófrið ella í sambandi við mótmælisgongur.

Í sambandi við nýtslu av dronum skal ÁTL-POLITI samskipa og í samráð við samlaðu átaksleiðsluna meta um tørvin á at nýta dronu og meta, um tey dátu, ið verða samlað saman, eru viðkvæm. Átaksleiðslan skal meta um so hvørt, um nýtslan av dronuni er neyðug, hóskandi, trygg og skal haraftrat neyvt samskipa flúgvingina við bjargingartyrluna, so vandi ikki stendst av nýtsluni av dronuni. Tann, ið flýgur dronuna, hevur til eina og hvørja tíð ábyrgd av, at flogið verður eftir galdandi reglum og mannagongdum. Tað er sera umráðandi fyri flogtrygdina, at Vága AFIS, tyrlur og flogfør vita um dronur, sum politiið ella aðrir myndugleikar senda upp innanfyri 5 km frá flogvøllinum.

## 4.9 Tyrlulendingarpláss

Tá bjargingartyrla ella tyrla hjá sjóverjuni verður nýtt í sambandi við eitt átak, verður tað neyðugt at gera eitt ella fleiri tyrlulendingarpláss í ella nærhendis átaksøkinum. Verður tyrlulendingarpláss staðsett uttan fyri átaksøkið, skal lendingarplássið tryggjast við nøktandi avbyrging. Átaksleiðslan tekur avger um staðsetingina av tyrlulendingarplássinum, meðan politiið hevur ábyrgdina av at skipa sjálvt plássið.

Í avgerðini at velja staðseting av tyrlulendingarplássi verður støðið tikið út frá niðanfyri nevndu umstøðum:

- Lendið skal vera rættiliga flatt og frítt fyri forðingum.

- Lendingarplássið verður valt eftir tyrluslagi, og undirlagið skal vera nóg fast til at klára at bera tyrluslagið.
- Eldkvæmt og leyst tilfar skal vera beint burtur av plássinum.
- Atgerðir á lendingarplássið skal ikki vera til óneyðugan ampa fyri triðjapersón.
- Til lendingarplássið skal vera ein til- og fráflúgvingarleið uttan forðingar, hvørs vísningur skal vera tengdur at verandi vindætt og háttaður soleiðis, at flúgving lágt yvir fólki, bygningum og tilfari í mestan mun slepst undan.

Flogskiparin tekur avgerð, um ein lending kann fara fram á tí ávísta plássinum við atliti at ásetingum um flogtrygd fyri tyrluna. Við komu til lendingarplássið flýgur tyrlan vanliga uppiyvir fyri at kanna plássið. Um plássið ikki verður mett egnað, finnur flogskiparin sjálvur eitt pláss so tætt við upprunaplássið sum gjørligt.

Undir tilflúgving samskiftir tyrlan við ÁTL-POLITI, í tann mun tað ber til.

# 5 Stórir, torgreiddir og serligir tilburðir

## 5.1 Alment

Aðalreglurnar fyri átaksleiðslu eru tær somu í vanligum, stórum og meira torgreiddum tilburðum, eisini um tilburðurin stendur við í dagar, ella um fleiri tilburðir koma fyri í senn.

Havandi í huga, at ein vanligur tilburður skjótt kann broytast frá ikki at hava tað stóra uppá seg til eitt stórt og meira torgreitt átak, er neyðugt, at átaksleiðslan frá byrjan av støðugt hugsar um, hvønn veg tilburðurin kann broytast, og um neyðugt er at styrkja samlaða leiðslubygnaðin.

Samlaðu uppgávurnar hjá hvørjum átaksleiðara kunnu skjótt verða so umfatandi, at tað kann gerast neyðugt at víðka um leiðslubygnaðin á sjálvum átaksøkinum. Aftrat kann gerast neyðugt at víðka um leiðslubygnaðin á kommunalum ella á landsumfevnandi støði, tað vil siga, at neyðugt verður at styrkja um leiðslubygnaðin fyri hvørt øki sær við tí fyri eyga at leiða samlaða átakið og at stuðla átaksleiðaranum í átaksøkinum.

Í <u>átaksøkinum</u> kann talan verða um at skipa fylgjandi toymir umframt fyriskipanarstaðið (KST):

- Stuðulstoymi til kommunalu tilbúgvingina (økisábyrgdartoymi), sí punkt 5.2.1
- Stuðulstoymi til heilsutilbúgvingina (økisábyrgdartoymi), sí punkt 5.2.2

Á <u>lokalum ella landsumfevnandi støði</u> kunnu niðanfyri nevndu toymir skipast:

- Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab) (tvørfakligt toymi undir leiðslu av politinum), sí punkt 5.3.4
- Fyriskipanarstøðin (KSN) (økisábyrgdartoymið hjá politinum), sí punkt 5.3.1
- Kommunala tilbúgvingin og/ella kommunala krepputoymið (økisábyrgdartoymið), sí punkt 5.3.2
- Samskipandi eind á sjúkrahúsunum og Leiðslubólkurin (Landssjúkrahúsið), sí punkt 5.3.3

## 5.2 Toymisarbeiði á átaksøkinum

### 5.2.1 Leiðsla hjá kommunalu tilbúgvingini í sambandi við rættiliga stórar tilburðir

<u>Víðkan av leiðslubygnaði</u>

Í teimum støðum, har skaðastaðið er fjøltáttað ella fevnir yvir eitt vítt landafrøðiligt øki, kann TEKNISKI-ÁTL velja at deila skaðastaðið sundur í fleiri skaðastøð.

Um tað er meiri enn eitt skaðastað, kann TEKNISKI-ÁTL, um neyðugt, seta leiðslu fyri átakið á tí einstaka skaðastaðnum. Leiðarin á tí einstaka skaðastaðnum – verður nevndur skaðastaðsleiðari - og skal helst hava eina átaksleiðaraútbúgving.

Settu skaðastaðsleiðararnir virka undir TEKNISKI-ÁTL, sum við hesum víðkaða leiðslubygnaði framhaldandi hevur leiðsluna av samlaða tekniska átakinum. Skaðastaðsleiðarin røkir leiðsluna av tekniska átakinum á tí einstaka skaðastaðnum.

Ein TEKNISKI-LL, sum ikki er útbúgvin átaksleiðari, kann einans setast sum skaðastaðsleiðari (tekniskur leiðari) á einum skaðastaði, har eitt lið (t.e. liðleiðarans egna lið) er innsett. Umframt hetta skal helst einki tvørfakligt samstarv við aðrar myndugleikar á leiðslustigi vera á skaðastaðnum.

Tað kunnu verða støður, har TEKNISKI-ÁTL kann meta tað vera skilagott at seta meiri enn ein skaðastaðsleiðara, tó uttan at býta skaðastaðið sundur. Hetta kann t.d. vera í sambandi við stórar tilburðir, har neyðugt er at gera átøk frá meiri enn einari síðu.

Í sambandi við eitt stórt skaðastað kann tørvur vera á at seta ein skaðastaðsleiðara, soleiðis at TEKNISKI-ÁTL burturav kann samla seg um tað tvørfakliga samstarvið við átaksleiðslurnar.

<u>Setan av stuðulstoymi</u>
Í sambandi við leiðslu av einum stórum átaki hevur TEKNISKI-ÁTL vanliga eisini tørv á at seta eitt stuðulstoymi, sum hjálpir til við tekniska átakinum. Uppgávur hjá toyminum eru til dømis:

- at skráseta/skjalfesta,
- at leggja til rættis framhald av tekniska átakinum,
- at samskipa útgerð og fólk
- at samskifta við innsettar eindir

At skráseta og skjalfesta tilburðir, útgerð og fólk kann við fyrimuni gerast av starvsfólki, ið hevur tilbúgvingarliga leiðsluútbúgving ella líknandi royndir.

Toymið eigur eisini at hava samskiftisfólk, sum gevur TEKNISKI-ÁTL betri møguleikar at taka sær av teimum neyðugu leiðarauppgávunum. Av somu orsøkum eigur ein samskiftispersónur at taka sær av samskiftinum hjá TEKNISKI-ÁTL, sum soleiðis hevur størri frælsi til at samstarva við hinar átaksleiðararnar.

Toymið kann annaðhvørt skipast í KST ella í einum sjálvstøðugum høli í nánd av KST. Einstakar tilbúgvingar hava akfør, ið kunnu nýtast til hetta og møguliga – í samráð við politiið – sum KST.

Leiðslubygnaðurin á átaksøkinum kann við sundurbýti av skaðastaði og leiðslubygnaði og skipan av toymi í høvuðsheitum síggja soleiðis út:




Tað skal viðmerkjast, at hendan myndin er treytað av, at skaðastaðsleiðararnir hava átaksleiðaraútbúgving, tá ið teir hava leiðsluna av fleiri liðum.

### *5.2.2 Leiðsla hjá heilsutilbúgvingini í sambandi við stórar tilburðir*

Í sambandi við stórar tilburðir við nógvum løstaðum kann tað koma fyri, at nógvar eindir verða sendar út frá heilsutilbúgvingini. Í slíkari støðu kann tørvur vera á at seta í verk fleiri savningarstøð í mun til støddina av skaðastaðnum, nøgdina av skaðastøðum ella mongdina av løstaðum.

Eisini kann tørvur vera á at seta í verk eitt toymi til at røkja uppgávur sum:

- Skjalfesting
- Ráðlegging av tí heilsufakliga átakinum
- Logistik
- Samskifti við vaktsentral/sjúkrahús, ÁTL-HEILSA, ML-HEILSA, leiðara á framskundaða savningarstaðnum, leiðara á útberaratænastuni, leiðara á savningarstaðnum til løstað og leiðara á bráðflutningsstaðnum.

Toymið kann antin setast í verk á KST ella í einum sjálvstøðugum øki, helst nærhendis KST.

Eitt samskiftisfólk skal helst taka sær av radiosamskiftinum vegna ML-HEILSA, so at viðkomandi hevur størri frælsi til at samstarva við samlaðu átaksleiðsluna.

Tann prehospitali leiðslubygnaðurin í átaksøkinum kann lýsast sum ein meginregla í niðanfyri standandi bygnaði:




<u>Framskundað savningarstað og savningarstaður til løstað</u>

Til hvørt savningarstað velur ML-HEILSA ein leiðara, ið undir vanligum umstøðum er starvsfólkið í sjúkraflutningstænastuni við besta førleika, men kann eisini vera ein lækni. Hjálparfólkið hjá leiðarum á savningarstøðum kann røkja uppgávuna sum radiosamskiftari.

Leiðarar á savningarstøðunum hava hvør ábyrgd fyri sínum savningarstaði og starvsfólkunum, ið eru til hjálpar. Tað kunnu vera:

- Kommunulæknar, anestesilæknar, akuttlæknar o.o.
- Starvsfólk hjá sjúkraflutningstænastuni (paramedisinarar og sjúkraflutnings-viðgerar)

Eisini kann hjálp koma frá eitt nú bjargingarfeløgum, First Respondarum ella Reyða Krossi. Hesi eru eisini undir leiðslu hjá leiðaranum á savningarstøðununum.

Uppgávan hjá leiðaranum á framskundaða savningarstaðnum er at:

- skipa savningarstaðið eftir avtalu við ML-HEILSA ella ÁTL-HEILSA
- tryggja, at savningarstaðið er hóskandi innrættað, tó við tí fyri eyga at tey løstaðu skjótast gjørligt skulu víðari til savningarstað til løstað. Vanligt er at hava:
  - triagéøki,

- neyðviðgerðarøki, og
- pláss til sjúklingar, ið eru bólkaðir sum 1 (reytt), 2 (gult) og 3 (grønt),

- tryggja, at øll eru kunnað um, at ML-HEILSA hevur ábyrgd av at triagéra løstað víðari til Savningarstað til løstað,
- veita kunning so hvørt til ML-HEILSA um støðuna og um neyðugt er við eyka manning og útgerð á framskundaða savningarplássinum,
- tryggja sær, at lættari løstað, ið sjálvi kunnu ganga, fara víðari til savningarstað/bíðistað til óløstað (grøna økið),
- tryggja sær, at starvsfólk eru javnt býtt út á økini í mun til tørvin.

Uppgávan hjá leiðaranum á Útberaratænastuni er at:

- tryggja sær, at nokk av fólki er til at bera løstað frá framskundaða savningarstaðnum til savningarstaðið til løstað. Hetta kunnu vera fólk frá bjargingarfeløgum, First Respondarir, Reyði Krossur ella onnur,
- gera avtalu um, hvussu tey løstaðu skulu berast út av økinum,
- fáa til vega nokk av børum,
- hava tætt samstarv við leiðaran á framskundaða savningarstaðnum og/ella ML-HEILSA um, hvør skal út av økinum fyrst, og
- tryggja sær at tað er gott ”flow” í útberingini, og at ikki steðgur kemur í.

Uppgávan hjá leiðaranum á savningarstaðnum til løstað er at:

- skipa savningarstaðið eftir avtalu við ML-HEILSA og ÁTL-HEILSA,
- tryggja, at savningarstaðið til løstað er nærhendis bráðflutningsstaðnum,
- tryggja, at savningarstaðið er hóskandi skipað, tó við tí fyri eyga, at tey løstaðu skjótast gjørligt skulu víðari til bráðflutningsstaðið og við sjúkrabili til sjúkrahús,
- veita øki til løstað í mun til tey trý stigini 1 (reytt), 2 (gult) og 3 (grønt),
- tryggja, at triagéringin virkar,
- tryggja sær, at starvsfólk eru javnt býtt út á økini í mun til tørvin.

Uppgávan hjá leiðaranum á bráðflutningsstaðnum er at:

- tryggja sær, at bráðflutningsstaðið er nærhendis savningarstaðnum til løstað,
- avtala við politiið, hvørjir vegir skulu nýtast til sjúkrabilar til og frá sjúkrahúsinum,
- tryggja, at sjúkrabilar standa í raðfylgju og eru klárir at taka ímóti løstaðum til flutning á sjúkrahús.

Tað er sera umráðandi, at man í omanfyri nevndu støðum er førur fyri at veita neyðuga viðgerð, samstundis sum man hevur fyri eygað at fáa løstað skjótast gjørligt inn á sjúkrahús.

## *5.3 Staðbundið og landsumfevnandi toymisarbeiði*

Í sambandi við stórar og torskildari tilburðir kann verða neyðugt, at hvørt upplendi fyri hvørt øki stuðlar upp undir átakið, ið fer fram, og í samstarvi við átaksleiðsluna loysir ymiskar uppgávur. Tað kann vera ráðlegging við framtíðini í huga, stýring av samlaða átakinum vegna økisábyrgdarmyndugleikan, samstarv við aðrar myndugleikar, samskifti við almenningin, logistikk, skjalfesting og annað.

Stuðulin til átaksleiðsluna verður veittur av kreppuskipanini hjá hvørjum øki sær, til dømis av fyriskipanarstøðini hjá politinum (KSN), staðsetta kommunala krepputoyminum ella frá samskipanarstaðnum á einum av teimum trimum sjúkrahúsunum. Tað er hvørt økið sær, ið gera av, hvørt tað er neyðugt at seta í verk eina samskipandi eind í upplendinum.




Aðaltekning við einum dømi um, hvussu leiðsla og samstarv virkar, tá Átaksráðið ikki er virkið. Støðan kundi verið eitt minni skaðastað. Pílarnir vísa á, hvørja leið boðini fara ímillum átaksøkið og upplendið. Aftrat er tvørfakligt samskifti og samskipan í upplendinum á operationellum (rakstrarligum) stigi.

Eisini kann vera sett í verk ein tvørfaklig samskipan á operationellum (rakstrarligum) stigi í Átaksráðnum fyri Føroyar, har umboð fyri kommunurnar, umboð fyri politiið, umboð fyri MRCC Tórshavn og umboð fyri heilsuverkið hava fast sæti. Út yvir føstu umboðini kunnu bindilið (liason) frá øðrum myndugleikum vera partur av kreppuskipanini hjá hvørjum øki sær. Uppgávan hjá bindiliðnum er at tryggja, at kunning er millum myndugleikarnar, og at henda kunning kemur rættstundis.




Aðaltekning við einum dømi um, hvussu leiðsla og samstarv virkar, tá Átaksráðið er virkið. Støðan kundi verið eitt størri skaðastað við fleiri løstaðum. Pílarnir vísa á, hvørja leið boðini fara ímillum átaksøkið og upplendið. Tá Átaksráðið er virkið, er umráðandi, at samskiftið frá skaðastaðnum fer umvegis Vaktsentralin hjá politinum beinleiðis til Átaksráðið har tvørfakliga samstarvið verður skipað.

### *5.3.1 Fyriskipanarstøðin (KSN)*

Tá ið tørvur er á yvirskipaðari samskipan av einum samlaðum politiátaki, verður KSN skipað. Tá mett verður neyðugt, kunnu persónar uttaneftir harafturat gerast partur av KSN sum bindilið til aðrar myndugleikar, tá ið Átaksráðið (Færøernes Beredskabsstab) ikki er komið saman.

Yvirskipaðu uppgávurnar hjá KSN eru at:

- seta í verk og raðfesta átakið hjá politinum, at fyrireika og senda ein ella fleiri ÁTL-POLITI á staðið, alt eftir stødd og vavi av átaksøkjum,
- seta í verk revsirættarligt kanningararbeiði og kanningar, og
- samskipa tað samlaða átakið, millum annað at
  - stuðla ÁTL-POLITI,
  - seta í verk logistisk átøk, skjalprógvan o.a.,
  - biðja um hjálp frá og fáa samband við aðrar myndugleikar og eindir, sum ikki eru við í átakinum,
  - vísa á og tryggja atkomuvegir til sjúkraflutning uttanfyri átaksøkið,
  - eyðmerkja og skráseta saknað, løstað og deyð,
  - boða avvarðandi frá,

- vera við í skipanini av bráðflutnings- og avvarðandistaði (BAS),
- kunna fjølmiðlar og borgarar, og
- seta í verk tilbúgvingarboð í samráð við átaksleiðsluna.

### *5.3.2 Kommunala tilbúgvingin og/ella kommunala krepputoymið*

Kommunala krepputoymið verður kallað inn í sambandi við stórar og drúgvar tilburðir, sum hava við sær, at fleiri ábyrgdarøki hjá kommununi kunnu væntast at verða ávirkað. Heitið, kommunala krepputoymið, er ikki eitt alment heiti, sum vit kenna og nýta fyri t.d. KST og KSN. Kommunur kunnu hava valt onnur heiti fyri teirra kommunala kreppubygnað og kreppustýringareind.

Uppgávan hjá krepputoyminum er at stuðla undir tað tekniska átakið í átaksøkinum og at samskipa tær kommunalu uppgávurnar í samband við átakið. Nevnast kunnu t.d. kunning til almenningin, raðfesting og umraðfesting av teimum samlaðu kommunalu uppgávunum, umskipan av kommunala tilfeinginum (umsiting, starvsfólk, stovnar, ítróttaranlegg o.a.) og hýsing og kostarhald av bráðfluttum o.a.

Kommunala krepputoymið er vanliga skipað við umboðum fyri viðkomandi kommunalar umsitingar. Arbeiðið í toyminum er vanliga undir leiðslu av kommunustjóra / kommunuskrivara ella tilbúgvingarleiðaranum.

Um tørvur er á tí, kunnu aðrir økisábyrgdarmyndugleikar t.d. politiið ella heilsutilbúgvingin verða partur av kommunala krepputoyminum.

Borgarstjóri og/ella krepputoymið verður kallað saman eftir áheitan frá TEKNISKI-ÁTL. Hetta er grundað á eina meting um vavið og um útlitini av tilburðinum. Krepputoymið kann eisini kallast saman eftir ynski frá øðrum, sum eru ávirkað av átakinum, t.d. sosiala umsitingin hjá kommununi, um trýstið verður óvanliga stórt í mun til tær dagligu uppgávurnar.

### *5.3.3 Samskipan av heilsutilbúgvingini*

Í sambandi við stórar tilburðir er ábyrgdarøkið millum sjúkrahúsini í Føroyum býtt í trý prehospital øki:

- Norðoyarøkið (Borðoy, Kalsoy, Kunoy, Viðoy, Svínoy og Fugloy)
- Miðøkið (Streymoy, Eysturoy, Vágar, Nólsoy, Sandoy, Skúvoy, Mykines, Hestur og Koltur)
- Suðuroyarøkið (Suðuroy, Lítla Dímun og Stóra Dímun)

Klaksvíkar sjúkrahús, ið skipar prehospitalu tilbúgvingina í Norðoyarøkinum, og Suðuroyar sjúkrahús, ið skipar prehospitalu tilbúgvingina í Suðuroyarøkinum, hava eina skipan, ið líkist.

Um eitt útkall kemur í hesum økjum, er tað ”deildin”, ið móttekur fráboðanina – eins og tað verður gjørt undir vanligum umstøðum.

Deildirnar hava ábyrgd av at seta í verk ta prehospitalu heilsufakligu tilbúgvingina í teirra øki, umframt at samskipa átakið ímillum sjúkrahúsini. Deildirnar lata viðkomandi upplýsingar víðari umvegis egna samskiftisútgerð, tað kann vera yvir radio ella telefon. Deildirnar samskifta við ÁTL-HEILSA.

Í Miðøkinum er tað samdøgursmannaði vaktsentralurin á Landssjúkrahúsinum, ið tekur ímóti fráboðanini. Vaktsentralurin setur í verk prehospitalu tilbúgvingina og hevur ábyrgd av samlaða átakinum – í tann mun, at vaktsentralurin setir í verk ta prehospitalu heilsufakligu tilbúgvingina, samskipar átakið ímillum sjúkrahúsini, letur víðari upplýsingar um tilburðin innanhýsis í Landssjúkrahúsinum og setir í verk tilbúgvingarætlanina fyri Landssjúkrahúsið.

Høvuðsuppgávan hjá vaktsentralinum er at stuðla undir heilsufakliga átakinum bæði uttan fyri sjúkrahúsið eins og ímillum sjúkrahúsini. Hetta verður gjørt umvegis egna samskiftisútgerð radio/telefon. Vaktsentralurin hevur tætt samstarv við ÁTL-HEILSA.

Um ein tilburður er serliga stórur, og mett verður, at tørvur er á einari meiri yvirskipaðari samskipan av átakinum, verða ymisk toymi kallað inn at samskipa møguligan sjúkraflutning av landinum. Á Landssjúkrahúsinum verður leiðslan kallað saman at taka sær av yvirskipaðum spurningum so sum:

- At skipa fyri sjúkraflutningi av landinum.
- At hava samskifti við politiið.
- At savna skrásetingina av sjúklingum úti á skaðastaðnum.
- At savna skrásetingina av sjúklingum á Landssjúkrahúsinum.
- At boðsenda eyka fólki í samráð við visitator.
- Evt. at aktivera psykiatriska/psykologiska tilbúgving.
- Varskógva Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús.

### *5.3.4 Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab)*

Átaksráðið fyri Føroyar tekur sær av samskipan og samstarvi tvørtur um økir í sambandi við heilt serligar tilburðir og stórar tilburðir, ið eru kendir frammanundan. Átaksráðið virkar á operationellum stigi, sbrt. parti 2.1.2. Átaksráðið fyri Føroyar er undir leiðslu av politinum, tá ið tilburður er á landi og undir leiðslu av MRCC Tórshavn, tá ið tilburður er á sjónum.

Samskipandi leikluturin er galdandi bæði frammanundan, ímeðan og aftan á tilburð, t.e. frá fyrireiking, ráðlegging, í sambandi við sjálvt átakið og til, at átakið er minkandi í vavi, og fram til, tá viðurskiftini eru komin í rættlag aftur. Leiðslan hevur, saman við hinum umboðunum í Átaksráðnum, ábyrgdina av at eftirmeta og taka samanum í

sambandi við arbeiðið hjá Átaksráðnum fyri á tann hátt at gerast dugnaligari til at loysa tær uppgávur, ið liggja hjá átaksráðnum.

Fasta umboðanin í Átaksráðnum fyri Føroyar er politiið, MRCC Tórshavn/Vørn, umboð fyri kommunalu tilbúgvingina, umboð fyri heilsutilbúgvingina og fyri stuðulseindina Arktisk kommando. Hvørt økið sær hevur ábyrgd av at hava eina ætlan fyri, hvør umboðar ábyrgdarøkið í Átaksráðnum fyri Føroyar og eina ætlan fyri, hvussu umboðið verður kallað inn í sambandi við eitt átak.

Sjálvboðin, privatar fyritøkur og aðrir ad hoc myndugleikar kunnu eisini vera umboðað í Átaksráðnum fyri Føroyar. Tað er tilburðurin, ið er avgerandi í mun til, hvør skal umboðað Átaksráðið.

Hvør myndugleiki, ið hevur umboðan í Átaksráðnum fyri Føroyar, er við í arbeiðnum í mun til egnu ábyrgd í samsvari við meginregluna um økisábyrgd.

Átaksráðið fyri Føroyar vísir til Kreppuráðið fyri Føroyar.

## *5.4 Trygdartilburðir*

Ein tilburður kann metast sum trygdartilburður, tá ið ein fráboðan er um t.d.:

- Spreinging við umfatandi oyðilegging.
- Fleiri persónar, sum í einum avmarkaðum landafrøðiligum øki eru vorðnir sjúkir, uttan vit ella deyðir,
- Illgrunasamar støður á einum øki og mótvegis persónum, sum kunnu viðføra gíslatøku ella yvirgang.
- Áhaldandi og umfatandi skottilburðir.
- Álop á kjarnumál sum t.d.: kirkju- og samkomuhús, myndugleikapersónar, ferðsluknútapunkt og tílíkt.
- Álop á eitt ella fleiri óvard sivil mál.
- Aðrar ógvusligar tilburðir.

Tá ein trygdartilburður fer fram, er hann vanliga ófráboðaður og merktur av at vera torskildur og kann tørva ein serligan førleika. Politiið hevur ábyrgdina av at meta um váðan fyri samanbresti við møguleikar illgerðarmenn.

Út frá teimum tøku upplýsingunum ger vaktsentralurin hjá politinum av, um ein tilburður er at rokna sum ein trygdartilburður og kunnar síðani hinar tilbúgvingarpartarnar um avgerðina, eisini átaksleiðsluna.

### 5.4.1 Fyrsti fundur í átaksleiðsluni og støðumetingin um fyrivarni

Áðrenn eindir verða settar inn í sambandi við ein trygdartilburð, skal átaksleiðslan syrgja fyri at halda ein fyrsta fund í einum tryggum øki, har tær grundleggjandi og neyðugu avgerðirnar og fyrivarnini verða avtalað, sambært parti 4.2.2

Harafturat skulu hesi serligu viðurskifti vera avtalað:

- Skipan av koyrileið og fylgdarkoyring
- Ásetan av alarmeringsstøðum, har átaksmanningin skal leita til, um farast skal úr átaksøkinum
- Greina og meta um verju av møguligum eindum í átaksøkinum

### 5.4.2 Operatiónsøki

Politiið kann skipa eitt operatiónsøki, sum er eitt landafrøðiliga avmarkað øki, har vandi er fyri samanbresti við illgerðamenn ella líknandi. Politiið skal kunna hinar eindirnar um avgerðina, at eitt operatiónsøki er skipað.

Átaksleiðararnir fyri eindirnar skulu gera eina meting, áðrenn manning verður sett inn, og tryggja samskipanina við politiið í samsvari við felags støðufatanina. ÁTL-POLITI tekur avgerð um at seta í verk tiltøk fyri at tryggja innsettu eindirnar í operatiónsøkinum, undir hesum neyðuga fylging (eskortering) at seta í verk eitt eygleiðingarstað (kagstøð) og um varðhald skal skipast.

### 5.4.3 Átak í øki við vanda fyri at møta illgerðamanni

Tilburðir, har politiið leitar eftir einum ella fleiri vandamiklum (vápnaðum) illgerðamonnum í einum øki, er tað týðandi, at løstað fáa neyðuga heilsuliga- og lívbjargandi hjálp, eins og átøk mótvegis eldi, rapan og líknandi skulu gerast í innleiðandi kreppuløtuni.

Átakið í slíkum øki byggir á váðametingina hjá ÁTL-POLITI í økinum, har ÁTL-POLITI í síni meting brúkar niðan fyri nevndu sundurbýting av økinum:

<u>Reytt øki</u>

Tann parturin av økinum, har váðin fyri at møta einum vandamiklum illgerðamanni verður mettur at vera stórur, tí ÁTL-POLITI hevur ítøkiliga vitan um, at illgerðamaðurin er staddur har og er ein beinleiðis hóttan/vandi fyri tilbúgvingareindirnar. Átaksleiðslan kann bert í heilt serligum førum seta eitt tvørfakligt átak í verk við denti á lívbjarging og bráðflyting. Í mun til trygdina hjá tilbúgvingareindunum skal tað ítøkiliga tvørfakliga átakið gjølla umhugsast.

<u>Gult øki</u>

Tann parturin av økinum, har váðin fyri at møta einum vandamiklum illgerðamanni er mettur at vera miðal, tí illgerðamaðurin hevur verið har ella kann leita sær til økið. ÁTL-

POLITI setir í verk eitt tvørfakligt skundátak við denti á lívbjarging og bráðflyting. Hetta skal samskipast út frá einari ítøkiligari trygdarmeting í samstarvi við átaksleiðsluna.

Grønt øki
Tann parturin av økinum, har váðin fyri at møta einum vandamiklum illgerðamanni, er mettur at vera lítil, tí illgerðamaðurin ikki hevur verið í ella væntast at koma inn á økið. Eitt tvørfakligt átak kann setast í verk. Tó skulu tey atlit havast í huga, ið vanliga skulu takast í sambandi við trygdartilburðir.

Skipanin av einum átaksøki byggir á støðumyndina, støðumetingina og samstarvið í átaksleiðsluni. Íverksetanin av einum vanligum átaksøki kann verða sera avbjóðandi í einum trygdartilburði. Tað kann til dømis vera ov vandamikið at skipa eitt viðgerðarstað í økjum, har politiið leitar eftir einum ella fleiri vandamiklum illgerðamonnum og ikki hevur orkuna til at verja hinar tilbúgvingareindirnar. Tað kann í slíkum førum verða neyðugt at flyta løstað til eitt trygt øki, har tey kunnu fáa ta neyðugu fyrstuhjálpina.

TEKNISKI-ÁTL hevur í trygdartilburðum ikki – sum vanligt – ta yvirskipaðu ábyrgdina av tí tekniska átakinum, tí ÁTL-POLITI hevur ábyrgdina av tí yvirskipaðu taktisku stýringini av átakinum, herundir ábyrgdina av, at tað tekniska átakið verður sett í verk og gjøgnumført. Hetta fer fram eftir avtalu við TEKNISKI-ÁTL, sum eisini skal stuðla og vegleiða ÁTL-POLITI um, hvussu átakið verður útint. Hvør tað er, ið skal fremja átakið, má í einstøku støðuni byggja á eina ítøkiliga meting frá tí samlaðu átaksleiðsluni.

Frammanundan avgerðini, um tilburðurin er trygdartilburður, kann eitt átak í einum ella fleiri økjum longu verða byrjað. Seinni kann verða mett, at tað er ein stórur ella miðal váði fyri at møta einum vandamiklum illgerðarmanni í økinum. Í tí førinum skal átaksleiðslan gera av, um átakið kann halda fram við politiverju, ella um átaksmanningin skal takast út úr økinum.

### *5.4.4 Ráðlegging*

Land, kommunur og ríkismyndugleikar skulu í felag gera átaksætlanir fyri trygdartilburðir, ið hava fyrilit fyri kreppuskipan landsins.

## *5.5 Stórur ófriður og mótmælisgongur*

Sum við trygdartilburðum kann politiið í sambandi við stóran ófrið o.a. skipa eitt ella fleiri operatiónsøki. Politiið vísir á eitt møtistað uttan fyri operatiónsøkið til hinar tilbúgvingareindirnar, haðan átakið verður samskipað.

Í sambandi við avgerðina um at skipa operatiónsøkið kann operatiónsleiðslan hjá politinum gera av, at ongar politivarðferðir (patruljur) mugu sendast inn ella sjálvar koyra inn í økið, uttan at klárt og týðiligt loyvi er fingið frá operatiónsleiðsluni. Loyvið skal samskipast við ÁTL-POLITI og kann verða tongt at eykatiltøkum fyri at tryggja

politivarðferðina í operatiónsøkinum neyðuga fylging (ekskortering), at seta í verk eitt eygleiðingarstað (kagstøð), og um varðhald skal verða skipað.

Av trygdarávum skal líknandi framferðarháttur nýtast í støðum, har aðrar tilbúgvingareindir hava tørv á at fara inn í operatiónsøkið, og tá ið uppgávur at bjarga lívi eyðsæð hava hægstu raðfesting.

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1 Yrkisorð

**Alarmeringsstað**
Eitt stað, ið átaksleiðslan frammanundan lýsir sum eitt stað, hagar átakseindirnar leita sær, tá ið neyðugt er at rýma frá átaksøkinum í sambandi við ein trygdartilburð til dømis.

**Alarmsentralur**
Har 1-1-2 alarmuppringing verður móttikin. Við støði í boðunum verður mett um vavið av tilburðinum, og fráboðan send víðari.

**Ambulansuvegur**
Ein fastløgd leið, sum politiið, í samráð við leiðaran á **bráðflutningsstaðnum,** tryggjar, at sjúkrabilar ótarnaðir kunnu koyra til og frá skaðastaðnum, t.e., at politiið tryggjar, at koyrandi er og skipar ferðsluna.

**Átaksleiðari Heilsa (ÁTL-HEILSA)**
Uppgávan hjá ÁTL HEILSA er at leiða tað operativa átakið fyri heilsufakliga partin á taktiskum stigi. ÁTL HEILSA samstarvar tætt við hinar átaksleiðararnar á fyriskipanarstaðnum, KST. Harumframt samskiftir hann við ML-HEILSA á skaðastaðnum.

**Átaksleiðari Politi (ÁTL-POLITI)**
Tann persónurin frá politinum, sum røkir ta samskipaðu leiðsluna av tí samlaða átakinum og tann polititaktiska partin á einum átaksøki. ÁTL-POLITI hevur leiðsluna av øllum luttakandi politieindunum.

**Átaksleiðslan**
Átaksleiðslan er tað samstarvstoymið, sum átaksleiðarar, ið hava týdning fyri átakið, eru partar av. Átaksleiðslan á skaðastaðnum er undir samskipandi leiðslu hjá politinum og hevur ábyrgdina av, at átakið verður framt í verki. Bulurin í átaksleiðsluni eru átaksleiðararnir frá politinum, kommunalu tilbúgvingini og heilsutilbúgvingini.

**Átaksráðið fyri Føroyar (Færøernes Beredskabsstab)**
Krepputoymið, ið verður gjørt virkið fyri at samskipa tilfeingið, ið er tøkt í landinum (manning, førleikar og útgerð) í sambandi við stórar vanlukkur ella kreppur.

Krepputoymið virkar sum eitt stað fyri samstarvi og samskipan millum myndugleikar og verður sett í verk á operativum stigi.

Tað er politiið (um tilburðurin er á landi) og MRCC Tórshavn (um tilburðurin er á sjónum), ið hevur formansskapin og leiðir toymið. Átaksráðið fyri Føroyar er sum útgangsstøði fast mannað við umboðum fyri politiið, MRCC Tórshavn, kommunalu tilbúgvingina, heilsutilbúgvingina og stuðulseindina Arktisk kommando. Sjálvboðin, privatar fyritøkur og aðrir ad hoc myndugleikar kunnu eisini vera umboðað í Átaksráðnum. Tað er tilburðurin, ið er avgerandi í mun til, hvør skal umboð Átaksráðið.

**Átaksøki**

Átaksøkið er, har eitt tilbúgvingarátak verður framt. Átaksøkið er sostatt arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá samlaðu átaksleiðsluni. Átaksøkið er avmarkað við ytri avbyrging. Sí eisini skaðastað.

**Bráðflutnings- og avvarðandi miðdepil**

Ein bygningur ella eitt annað stað við lívd, har óløstað verða bráðflutt, tá ið tey eru skrásett, kunnu fáa samband við myndugleikar, hjálparfelagsskapir og avvarðandi. Aftrat tí kunnu avvarðandi til fólk, ið eru komin til skaða ella hava latið lív, koma í samband við myndugleikar og hjálparfelagsskapir. Í sambandi við stórar, sálarliga tyngjandi tilburðir kunnu bráðflutt og avvarðandi í Bráðflutings- og avvarðandi miðdeplinum fáa samband við fólk, ið kunnu veita psykososialan stuðul og viðgerð. Bráðflutnings- og avvarðandi miðdepilin er partur av samskipandi leiðsluni hjá politinum.

**Bráðflutningsstað**

Bráðflutningsstaðið verður skipað av politinum og leiðaranum á Bráðflutningsstaðnum. Bráðflutningsstaðurin skal helst verða staðsettur nærhendis savningarstaðnum til løstað. Tað er frá bráðflutningsstaðnum, at tey løstaðu verða flutt í sjúkrabilar.

**Avbyrging av brotsgerðarstaði**

Avbyrgingin av einum brotgerðarstaði frá til dømis einari bumbuspreinging, sum politiið ger fyri at tryggja pettir ella aðra slóð frá spreingingini. Avbyrgingin verður gjørd fyri at tryggja slóðir og verður vanliga – alt eftir umstøðunum – gjørd umleið 200 metrar frá spreingistaðnum. Koyrileið verður tryggjað til innaru avbyrging við atliti at bjargingarátaki, tí at bjarga lívi altíð kemur fram um at tryggja slóð. Avbyrging av brotsgerðarstaði fellur ikki saman við innaru avbyrging og verður framíhjá ansað av politinum.

**CBRNE-serfrøði**

CBRNE-serfrøði er ein serlig tilbúgving, ið kann stuðla átakseindunum í sambandi við serligar tilburðir, har evnafrøðilig evni (C), lívfrøðilig evni (B) geislavirkin evni (R), kjarnorkuevni (N) og/ella spreingievni (E) eru partur av tilburðinum. Ingeniørregimentet í Skive veitir serfrøðina, um spreingievni eru partur av tilburðinum. CBRNE serfrøði finst ikki í løtuni í Føroyum. Fiskimálaráðið hevur tó eina samstarvsavtalu við danska tilbúgvingarsstýrið, Beredskabsstyrelsen, um at veita tænastur viðvíkjandi serfrøðitilbúgving.

**Endaliga átakið**
Tann síðsti parturin í einum átaki, ið verður sett í verk aftan á fyrsta átakið. Í sambandi við endaliga átakið hevur átaksleiðslan fingið betri yvirlit yvir støðuna og hevur eina betri fatan av, hvat tað er, ið skal setast í verk sambært kommunalu skylduni at fyribyrgja, avmarka og bøta skaða ella skaðatilburð.

**Eyðmerkingarvestur**
Vestur, sum við liti og áskrift vísir, hvønn leiklut ein ávísur persónur hevur á skaðastaðnum.

**Framskundað savningarstað**
Er staðsett nærhendis sjálvum skaðastaðnum, har løstað verða ”triagérað” (raðfest) og neyðviðgjørd, áðrenn tey verða flutt víðari skjótast til ber. Hetta er ikki eitt stað, ætlað at liggja og bíða.

**Fyriskipanarstaður, KST**
Felags leiðslu- og samskiftisstaðið á átaksøkinum, haðan samlaða átakið verður leitt, og haðan samskift verður við yvirskipaðar og javnsettar tilbúgvingarmyndugleikar ella stovnar. Fyriskipanarstaðurin verður skipaður av politinum og er vanliga savningarstaðið hjá átaksleiðsluni.

**Fyriskipanarstøð, KSN**
Staðið, vanliga á politistøðini, haðan politiið stjórnar ta samskipaðu leiðsluna á operationellum stigi. Í stórum tilburðum er hetta í samstarvi við viðkomandi partar.

**Fyrsta átakið**
Fyrsta átakið miðar eftir at veita ta fyrstu hjálpina til fólk, ið eru komin til skaða, og til persónar, sum beinleiðis eru í vanda, og at tryggja, at skaðatilburðurin ikki gerst meira umfatandi enn neyðugt. Tá ið fyrsta átakið er sett í verk, hevur samlaða átaksleiðslan møguleika at gera eina neyvari meting av skaðastaðnum við tí í hyggju at seta í verk endaliga átakið.

**Hýsingarmóttøka**

Eitt øki ella stað, har tikið verður ímóti bráðfluttum og øðrum neyðstøddum við tí fyri eyga at veita hýsing og kostarhald.

**Innara avbyrging**
Avmarking av skaðastaði. Innan fyri innaru avbyrgingina arbeiðir kommunala tilbúgvingin. Tí eru akfør og útgerð hjá kommunalu tilbúgvingini sum oftast eisini innan fyri innaru avbyrgingina.

**Kommunalt krepputoymi**
Tað toymið, sum ein ella fleiri kommunur – ella felags kommunalt samstarv – kann/kunnu seta í verk við tí fyri eyga at stuðla tí tekniska partinum av átakinum og at samskipa aðrar kommunalar uppgávur í samband við eitt átak. Kommunala krepputoymið er ikki eitt felagsheiti fyri slíkt virksemi. Summar kommunur hava nýtt onnur heiti fyri kommunalu kreppustýringareindina.

**Koyrileið**
Leiðin, sum átakseindirnar skulu koyra til og frá sambindingarstaðnum (konktakstaðnum) til savningarøkið ella til skaðastaðið/átaksøkið.

**Medisinskur Leiðari Heilsa (ML-HEILSA)**
Er lækni ella starvsfólk frá sjúkraflutningstænastuni við førleikum, ið stýrir heilsufakliga partinum av átakinum. ML HEILSA samskipar átakið á skaðastaðnum viðvíkjandi triagéring (raðfesting av sjúklingum) og neyðviðgerð. Somuleiðis hevur ML HEILSA tætt samskifti við ÁTL-HEILSA.

**Møtistað**
Staðið sum leiðararnir fyri politiið, kommunalu tilbúgvingina og heilsutilbúgvingina hava avtalað at hittast, um tað ikki hendir á fyriskipanarstaðnum, KST.

**Operatiónsøki**
Eitt avmarkað øki, har eitt politiátak fer fram ella skal fara fram, og serútbúgvin politifólk skipa fyri. Eitt operatiónsøki verður gjørt í sambandi við tilburð, har innihald ella vav elvir serligan vanda fyri fólk ella virðir.

**Prehospitala átakið**
Heilsutilbúgvingarlig viðgerð av løstaðum, áðrenn tey koma á sjúkrahús.

**Sambindingarstað (Kontaktstað)**
Eitt stað beint við átaksøkið, har átakseindirnar kunnu møtast og fáa leiðbeining um átakið og um, hvussu koyrt verður fram til savningarøkið (Opmarch).

**Savningarstað til løstað**

Savningarstaðið til løstað verður skipað eftir víðari viðgerð, har tey løstaðu verða býtt í bólkarnar 1 (REYÐ), 2 (GUL) og 3 (GRØN). Eru nógvir løstaðir sjúklingar, verður tjald sett upp fyri at fyribyrgja, at tey løstaðu verða niðurkøld. Raðfestingin, ið ML-HEILSA hevur gjørt, skal haldast, tó verður eyga hildið við sjúklingum, ið kunnu versna, og sum tí kunnu enda í bólki 1 (REYÐ). Allir sjúklingar í bólki 1 (REYÐIR) verða raðfestir at verða fluttir á sjúkrahús skjótast til ber.

**Savningarstað**
Stað, har óløstað og fólk við smávegis skaða (gangandi) verða savnað fyri at verða skrásett og fyri at fáa 1. hjálp, um neyðugt. Savningarstaðið verður staðsett av átaksleiðsluni og er partur av samskipandi leiðsluni hjá politinum.

**Samskipandi leiðsla**
Í sambandi við vanlukkur hevur Føroya Landfúti ábyrgdina av, at átakið er samskipað so væl sum til ber. Samskipandi leiðslan verður sett í verk, tá ið eitt átak krevur, at fleiri myndugleikar loysa uppgávuna í felag.

**Savningarstað til deyð**
Eitt stað, har deyð verða løgd fyribils. Staðið skal vera ráðiliga skipað til bæði persónar, sum eftir øllum at døma eru deyðir, og persónar, sum eftir skaða og løstum at døma eru deyð. Staðsetingin av savningarstaðnum til deyð verður ásett av átaksleiðsluni og er partur av samskipandi leiðsluni hjá politinum. Politiið hevur eisini ábyrgdina av at ansa eftir staðnum.

**Savningarøkið (Opmarch)**
Økið, har bilar, útgerð og fólk, ið ikki eru sett inn í samband við átakið, savnast. Savningarøkið er mannað við einum umboði fyri politiið, sum savningarøkisleiðara, og einum umboði frá kommunalu tilbúgvingini, ið hevur serstaka vitan um bilar og útgerð hjá kommunalu tilbúgvingini, at stuðla politinum.

**Skaðastað**
Tað økið, har skaðin er hendur, og økið, ið verður brúkt av kommunalu tilbúgvingini sum arbeiðsøki. Skaðastaðið er sostatt ábyrgdarøki hjá TEKNISKI-ÁTL. Skaðastaðið er skilmarkað við innaru avbyrgingini. Sí eisini átaksøki.

**Skaðastaðsleiðari**.
Í sambandi við stórar tilburðir kann TEKNISKI-ÁTL býta skaðastaðið í fleiri minni skaðastøð hvørt við sínari leiðslu. Hetta verður rópt skaðastaðsleiðari. Skaðastaðsleiðarin hevur ábyrgdina av tí tekniska/taktiska átakinum á tí einstaka skaðastaðnum, men vísir til ÁLT-TEKNIK, har hjálp eisini skal verða umbiðin.

**Støðulýsing**
Boð um støðuna í átaksøkinum. Boðini eru grundarlag fyri avgerð um at tillaga talið av luttakandi átakseindum, eisini um fleiri eindir skulu boðsendast.

**Tekniska leiðslan**
Leiðslan fyri kommunalu tilbúgvingini, ið leiðir tekniska og taktiska átakið á skaðastaðnum.

**Tekniskur átaksleiðari (TEKNISKI-ÁTL)**
Persónurin frá kommunalu tilbúgvingini (sløkkiliðnum), sum røkir teknisku og taktisku leiðsluna av átakinum á einum skaðastaði, og sum hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av trygdini hjá øllum eindunum innan fyri innaru avbyrgingina. TEKNISKI-ÁTL útinnir síni boð gjøgnum liðleiðarar.

Í dag verður heitið tekniskur átaksleiðari brúkt um persónin, sum hevur ábyrgdina av átakinum fyri kommunalu tilbúgvingina.

**Tekniskur liðleiðari (TEKNISKI-LL)**
Persónurin frá kommunalu tilbúgvingini (sløkkiliðnum), sum røkir teknisku og taktisku leiðsluna av átakinum á einum skaðastaði, tá TEKNISKI-ÁTL enn ikki er komin fram á skaðastaðið, ella persónur, ið hevur fingið ábyrgd av einum ella fleiri skaðastøðum undir leiðslu av tekniska átaksleiðaranum (TEKNISKI-ÁTL). TEKNISKI-LL vísir í báðum førum til tekniska átaksleiðaran (TEKNISKI-ÁTL), sum altíð hevur yvirskipaðu leiðsluna.

**Triage**
Heilsufaklig raðfesting av viðgerðartørvi og flutningi í mun til tøkar flutnings- og viðgerðarmøguleikar.

**Trygdartilburður**
Ein tilburður, har fólk kunnu vera løstað ella í stórum vanda, sum hevur staðist av spreinging, skjóting ella líknandi.

**Uppmøtingartíð (heilsutilbúgvingin)**
Tíðin frá tí, at vaktsentralurin fær boðini, til sjúkrabilurin er á skaðastaðnum/hjá sjúklinginum.

**Uppmøtingartíð (kommunala tilbúgvingin)**
Tíðin frá tí, at alarmsentralurin kallar kommunalu tilbúgvingina út, til hon er á skaðastaðnum (sambært tilbúgvingarætlan).

**Útberaratænstan**

Útberaratænastan skal veita hjálp at bera tey løstaðu til savningarstaðið til løstað. Tað kunnu t.d. vera bjargingarfeløgini, First Respondarar og Reyði Krossur, ið hjálpa við at bera tey løstaðu út.

**Vaktsentralur**
Stað hjá myndugleika, sum fær boð frá alarmsentralinum t.d., ið síðan raðfestir uppgávuna og gevur boðini víðari innan fyri egið ábyrgdarøki.

**Vaktsentralurin á Landssjúkrahúsinum og vakttelefonir hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi og Klaksvíkar Sjúkrahúsi**
Vaktsentralurin og vakttelefonirnar fáa øll heilsufaklig uppkall frá alarmsentralinum (1-1-2), kommunulæknum o.ø., røkir visitatión, samskipar og veitir somuleiðis heilsufakliga vegleiðing og ráðgeving.

**Vakttelefon**
Telefon hjá myndugleika ella persóni, sum alt samdøgrið kann fáa boð um bráðstøðu, frá alarmsentralinum, einum vaktsentrali ella frá privatfólki.

**Vandaøkið**
Vandaøkið er økið innan fyri innaru girðingina, har ítøkiligur vandi er fyri fólk. Vandaøki, ið vanliga eru í sambandi við CBRNE-tilburðir, tilburðir við nógvum (og vandamiklum) royki, ella, tá ið vandi er fyri, at bygningar rapa, verður ásett av Tekniska Átaksleiðaranum, sum eisini hevur ábyrgd av bjarging og at bráðflyta fólk í vandaøkinum. Í sambandi við CBRNE-tilburðir verður vandaøkið ásett í samstarvi við viðkomandi serfrøði, og tað verður lýst við eini trygdarfrástøðu. Bara starvsfólk í serligari verndarútgerð skulu, sum útgangsstøði, hava atgongd til hetta økið.

**Ytra avbyrging**
Skilamark til átaksøkið.

# *Fylgiskjal 2 Lóggáva o.a.*

1. (FO) Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving. Lógin er í Lógarsavninum (www.logir.fo). Kann eisini lesast her.

2. (FO) Leiðbeining nr. 8000 frá 24. januar 2018 til kommunustýrið, tilbúgvingarnevndina og kommunala tilbúgvingarleiðaran um at skipa kommunalu tilbúgvingina. Leiðbeiningin er í Lógarsavninum (www.logir.fo). Kann eisini lesast her.

2. (DK) Átaksleiðsla á skaðastaðnum (Beredskabsstyrelsen, november 2015). Bóklingurin er á heimasíðuni hjá "Beredskabsstyrelsen" (www@brs.dk). Kann eisini lesast her.

3. (FO) Kunngerð nr. 9 frá 19. februar 2010 frá Heilsumálaráðnum um skipan av Sjúkraflutningstænastuni. Kunngerðin er í Lógarsavninum (www.logir.fo). Kann eisini lesast her.

4. (DK) Leiðreglur fyri átøk í sambandi við CBRNE-tilburðir (Beredskabsstyrelsen, januar 2016). Leiðreglurnar eru á heimasíðuni hjá Beredskabsstyrelsen (www.brs.dk). Kann eisini lesast her.

5. (NO) Handbók til tilbúgvingareindirnar viðv. vandamiklum evnum – CBRNE (Direktoratet for samfunnssikkerhed og beredskab 2016). Handbókin er á heimasíðuni hjá Direktoratet for samfunnssikkerhed og beredskab (www.dsb.no). Kann eisini lesast her.

6. (FO) Mannagongdir í sambandi við at basa dálking á sjónum. Mannagongdirnar eru á heimasíðuni hjá Landsverk (www.lv.fo). Kann eisini lesast her.

7. (FO) SAR FAROE ISLANDS. Handbókin er á heimasíðuni hjá MRCC Tórshavn (www.mrcc.fo). Kann eisini lesast her.

# *Fylgiskjal 3 Eyðmerkingarvestar*

Endamálið við eyðmerkingarvestum er, at tað skal vera lætt hjá átaksleiðsluni at eyðmerkja, hvør er hvør. Fyrst av øllum, so at bulurin í átaksleiðsluni (politiið, kommunala tilbúgvingin og heilsutilbúgvingin) kann eyðmerkja hvør annan, men eisini soleiðis, at umboð fyri sertilbúgving og tann sjálvbodna partin av einum átaki skjótt kunnu eyðmerkast.

Politiið arbeiðir eftir donsku reglunum um persónliga verndarútgerð, sum sett er í verk sambært EU-fyriskipan um persónliga verndarútgerð, sum ásetur, at starvsfólk, sum arbeiðir á vegnum, skal vera í verndarklæðum, ið lúka treytirnar í DS/EN ISO 20471.

Øðrum átakseindum er álagt at arbeiða eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi og kunngerð nr. 746 frá 28. august 1992 um nýtslu av persónligari verndarútgerð.

Í arbeiðsbólkinum, ið hevur gjørt ”Leiðreglur fyri átaksleiðslu”, vóru luttakararnir samdir um, at umráðandi er, at myndugleikarnir brúka ymsar litir, og at tað á eyðmerkingarvestunum skal vera skrivað við teksti, hvønn leiklut í átakinum viðkomandi persónur hevur. Av tí, at sertilbúgvingin frá donskum stovnum, ið Fiskimálaráðið hevur avtalu við frammanundan, brúka svart, hevur arbeiðsbólkurin hildið fast við, at tað sama er galdandi í Føroyum.

Litirnir, arbeiðsbólkurin samdist um, eru lýstir niðanfyri.

| Myndugleiki | Litur | Skrift (dømir) |
|---|---|---|
| Politiið | Blátt | ÁTL-POLITI, KST Leiðari |
| Kommunala tilbúgvingin | Reytt | TEKNISKI-ÁTL, Átaksleiðari |
| Heilsutilbúgving | Hvítt | ÁTL-HEILSA, ML-HEILSA |
| Sertilbúgving (Danmark) | Svart | KEMI, CBB, SIS, NUC, EOD, STPS* |

*Landslæknin (STPS).

Mælt verður til, at allar átakseindirnar nýta tilfar, ið er lætt at síggja eisini í myrkri. Niðanfyri verða víst uppskot til útsjónd.













## Eyðmerking av sjálvbodnum felagsskapum

| Felagsskapur | Eyðmerking | Skrift (dømi) |
| --- | --- | --- |
| Bjargingarfeløgini í Føroyum | | Liðleiðari, dronuførari |
| Reyði Krossur | | Liðleiðari, samarittur |

# *Fylgiskjal 4 Rundskriv um skaðastaðarradio*

Tórshavn 21. May 2002 - Rundskriv um skaðastaðarradio

Skaðastaðarradio, sum sløkkiliðini nýta í sambandi við arbeiði, skipan og leiðslu á einum skaðastaði, eru UHF-radio við hesum kanalum og frekvensum, sum eru góðkend av Radioeftirlitinum (Fjarskiftiseftirlitinum) og Brunaumsjón landsins:

Kanal 1 423,95 MHz

**Kanal 2 423,75 MHz**

Kanal 3 423,30 MHz

Kanal 4 423,15 MHz +

Kanal 5 423,10 MHz

Kanalirnar til sínamillum samskifti skulu nýtast á skaðastaðnum soleiðis:

Kanal 1 millum brunaumsjónarmannin og sløkkiliðsmanningina.

**Kanal 2 millum brunaumsjónarmannin og samskipandi leiðslu - politiið.**

Kanal 3 millum brunaumsjónarmannin, liðleiðara og roykkavarar.

Kanal 4 millum brunaumsjónarmannin og serliga hjálpartænastu á skaðastaðnum.

Kanal 5 er tøk til ymsa nýtslu.
----
Gevið gætur: Ein fortreyt fyri kanal 2 er, at politiið hevur sama slag av skaðastaðradio sum sløkkiliðið.
----
Nýtsluvegleiðing:

Uppkall... Nevn teg sjálvan fyrst t.d. "Brunaumsjónarmaðurin kallar roykkavarar ella politi, yvir". Svar... "Roykkavari her, yvir". Enda samrøðu..."farin", ella "yvir og farin".

Týðandi fráboðan... "ávaring" ...... Endurtak týðandi boð.

Tala róliga og stutt.

Sambært Radioeftirlitinum skal sløkkiliðið útvega einstaklingaloyvi til frekvensnýtslu frá radioeftirlitinum fyri hvørt radiotólið sær.

Brunaumsjón landsins

Petur Olsen

# Fylgiskjal 5 Átaksøki – dagligir tilburðir




Partur av skaðastaðnum kann vera lýst at vera vandaøki, men tað er sjáldan tá talan er um dagligar tilburðir.

# *Fylgiskjal 6 Átaksøki – stórir tilburðir*




Avgerð um staðseting av teimum ymisku hentleikunum í átaksøkinum verður avgjørt av átaksleiðsluni og kann broytast í mun til omanfyristandandi. Hentleikarnir kunnu eftir avtalu í átaksleiðsluni staðsetast innanfyri innaru avbyrgingina, men uttanfyri vandaøki.

# Fylgiskjal 7 Àtaksøki við tveimum skaðastøðum




Avgerð um staðseting av teimum ymisku hentleikunum í átaksøkinum verður avgjørt av átaksleiðsluni og kann broytast í mun til omanfyristandandi. Hentleikarnir kunnu eftir avtalu í átaksleiðsluni staðsetast innanfyri innaru avbyrgingina, men uttanfyri vandaøki. Átaksleiðslan kann eisini taka avgerð um at staðseta ein viðgerðarstað, heldur enn tveir. Tilvísing til "upplendi" er sum víst í fylgiskjali 6.

# *Fylgiskjal 8 Yvirlit yvir virksemi, umfatað av kapitli 5*

**Listi yvir fyritøkur, virki og útbúnað, ið koma undir kapittul 5 í umhvørvisverndarlógini**.

| **A. Framleiðsla og tilevning úr jarni, stáli ella metali.** |
|---|
| 1. Metalstoypivirki. |
| 2. Fyritøkur og virki til yvirflatuviðgerð av evnum úr jarni, stáli ella metali. |
| 3. Stálskipasmiðjur og flótidokkir. |
| 4. Maskinverksmiðjur og maskinverkstaðir.* |
| 5. Ílatsverksmiðjur og rørverksmiðjur. |
| 6. Ravmagnstøknligar fyritøkur.* |
| 7. Ravløðuverksmiðjur. |

| **B. Nám og tilevning av steini, koli og tílíkum.** |
|---|
| 1. Glarullsverksmiðjur og steinullsverksmiðjur. |
| 2. Grótbrot. |
| 3. Sementstoypivirkir og betongblandivirkir. |
| 4. Fyritøkur til framleiðslu av postalíni, glaraðari leirvøru ella leirvørum.* |
| 5. Kolanám. |

| **C. Nám og viðgerð av steinolju, steinoljuúrdráttum, asfalti, náttúrugassi og koli.** |
|---|
| 1. Virkir til tilgerð av asfalti og virkir til framleiðslu av vegtilfari. |
| 2. Virkir til reinskan ella oyðing av spillolju ella øðrum burturkasti av reinsivir kisúrdráttum. |
| 3. Goymslurúm við flótandi gassi (kolbrintu).* |
| 4. Goymslur við steinolju ella flótandi steinoljuúrdráttum.* |

| **D. Evnafrøðilig framleiðsla o.a.** |
|---|
| 1. Goymsla við lívrunnum ella ólívrunnum frumevnafrøðiligum evnum. |
| 2. Sápuverksmiðjur, vaskievnisverksmiðjur og verksmiðjur til reingerðarevni. |
| 3. Litverksmiðjur og lakkverksmiðjur. |
| 4. Ljósmyndaídnaður og ljósmyndastarvsstovur.* |
| 5. Fyritøkur til at lata burtur úr ella pakka evnafrøðilig evni ella úrdráttir, sbr. D. 1-3. |
| 6. Fyritøkur til kroysting og tæðrabrynjing av plastvørum og plastálegging. |
| 7. Verksmiðjur til framleiðslu av skúmplasti og øðrum polymerum tilfari. |

| **E. Tilvirking av planturávørum.** |
|---|
| 1. Træverjuvirkir. |
| 2. Rotatións-, offset-, silki- og bókaprentsmiðjur.* |
| 3. Pappírsvøruverksmiðjur, pappdósaverksmiðjur.* |
| 4. Sagverk, virkir til framleiðslu av finérplátum ella fipurplátum, møblaverksmiðjur og maskinsnikkaravirkir.* |
| 5. Gummivøruverksmiðjur.* |
| 6. Klædnableikingarvirkir og klædnalitingarvirkir. |
| 7. Vevstovur, spunavirkir, klædnaverksmiðjur og snørisvirkir.* |
| 8. Reinsarí og vinnuliga rikin vaskarí. |

| |
|---|
| 9. Fyritøkur til viðgerð ella tilgerð av fóðurevnum. |
| 10. Heilsølubakarí (her uppií breyðverksmiðjur). |
| 11. Bryggjarí og sodavatnsverksmiðjur. |

| **F. Tilvirking av rávørum úr djórum.** |
|---|
| 1. Sláturvirki og kjøtvirki.* |
| 2. Kjøtfóðurverksmiðjur (fyribeiningarstøðir) og beinmjølaverksmiðjur. |
| 3. Garvarí og onnur skinnvirki.* |
| 4. Virkir til reinsingar av djórafitievnum. |
| 5. Mjólkavirkir, fyritøkur til framleiðslu av osti ella ostapulvuri umframt kosumísverksmiðjur og turrmjólkarverksmiðjur. |
| 6. Margarinverksmiðjur. |
| 7. Fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum.* |
| 8. Virkir til turking ella knúsing av skeljum. |
| 9. Fóðurevnisverksmiðjur. |
| 10. Leðurvøruverksmiðjur. |

| **G. Goymsla, varðveitsla ella viðgerð av burturkasti annars.** |
|---|
| 1. Virkir til goymslu ella varðveitslu av burturkasti, her uppií tyrvingarstøð, ruskdungar og serligar goymslur til evju ella ilsku, móttøkumiðstøð ella móttøkupláss til oljuburturkast ella evnafrøðiligt burturkast umframt ruskbrennistøðir. |
| 2. Virkir til viðgerð ella tilvirking av burturkasti, her uppi í spillvatnsreinsiverk, uppskipingarmiðstøðir, knúsivirki, plantuleivdarvirki og bilupphøggingarpláss. |

| **H. Orku- og hitaframleiðsla.** |
|---|
| 1. Orkuverk og hitaframleiðandi virkir.* |
| 2. Vindmyllur.* |

| **I. Virkir fyri motorakfør og onnur flutningstól.** |
|---|
| 1. Motorbreytir og prutlbreytir umframt koyritøknilig virkir, afturlatnir venjingarvøllir undantiknir, ið einans verða nýttir til koyrifrálæru. |
| 2. Floghavnir og flogvøllir. |
| 3. Bilhús og pláss til koyriamboð í sambandi við arbeiðstakara- ella bileigarafyritøkur, her uppií støð (støðlar) hjá bussum. Bjargingarstøðir.* |
| 4. Fyritøkur og virkir til veitingar ella umvælingar av motorakførum – prutl undantikin – tá ið hesar fyritøkur ella virki fremja yvirflatuviðgerð við liti ella lakki.* |

| **J. Djórahald og goymsla ella viðgerð av húsdjóratøðum.** |
|---|
| 1. Flogfenaðargarðar.* |
| 2. Felddjóragarðar.* |
| 3. Svínahald. |
| 4. Fiskaaling. |

| **K. Aðrar fyritøkur.** |
|---|
| 1. Skotvøllir. |

Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, sum í fylgiskjalinum eru merkt við eini stjørnu, kunnu av landsstýrismanninum verða undantikin skylduni til góðkenning, tá ið tað metir, at tann dálking, ið virkið, fyritøkan ella útbúnaðurin vil kunna elva, hevur minni týdning fyri umhvørvið

# *Fylgiskjal 9 Yvirlit yvir tilbúgvingarøkini*

| Oyggj(ar) | Tilbúgvingøki | Kommunur | Bygdir/Staðseting |
|---|---|---|---|
| Suðuroy & Lítla Dímun | Suðuroyar syðra sløkkilið | • Sumbiar kommuna<br>• Vágs kommuna<br>• Porkeris kommuna<br>• Hovs kommuna | • Sumba<br>• Víkarbyrgi<br>• Lopra<br>• Akrar<br>• Vágur<br>• Nes<br>• Porkeri<br>• Hov |
| | Fámjins sløkkilið | • Fámjins kommuna | • Fámjin |
| | Tvøroyrar sløkkilið | • Tvøroyrar kommuna<br>• Hvalbiar kommuna | • Øravík<br>• Øravíkslíð<br>• Trongisvágur<br>• Tvøroyri<br>• Froðba<br>• Hvalba<br>• Nes<br>• Sandvík<br>• Lítla Dímun |
| Skúvoy & Stóra Dímun | Skúvoyar sløkkilið | • Skúvoyar kommuna | • Skúvoy<br>• Stóra Dímun |
| Sandoy | Húsavíkar sløkkilið | • Húsavíkar kommuna | • Húsavík<br>• Dalur<br>• Djúpidalur<br>• Skarvanes |
| | Skálavíkar sløkkilið | • Skálavíkar kommuna | • Skálavík |
| | Sands sløkkilið | • Sands kommuna | • Sandur |
| | Skopunar sløkkilið | • Skopunar kommuna | • Skopun |
| Vágoy & Mykines | Vága sløkkilið | • Vága kommuna | • Slættanes<br>• Oyrargjógv<br>• Fútaklettur<br>• Sandavágur<br>• Giljanes<br>• Miðvágur |
| | Sørvágs sløkkilið | • Sørvágs kommuna | • Vatnsoyrar<br>• Sørvágur<br>• Bøur<br>• Gásadal<br>• Mykines |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Streymoy | Tórshavnar sløkkilið | • Tórshavnar kommuna | • Hestur<br>• Koltur<br>• Kirkjubøur<br>• Velbastaður<br>• Syðradalur<br>• Nólsoy<br>• Argir<br>• Tórshavn<br>• Hoyvík<br>• Hvítanes<br>• Sund<br>• Kaldbak<br>• Kaldbaksbotnur<br>• Norðradalur<br>• Mjørkadalur<br>• Hundsarabotnur<br>• Oyrareingir<br>• Kollafjørður |
| | Kvívíkar sløkkilið | • Kvívíkar kommuna | • Kvívík<br>• Stykkið<br>• Leynar<br>• Skælingur<br>• Válur |
| | Vestmannar sløkki- og bjargingarlið | • Vestmanna kommuna | • Vestmanna |
| Streymoy & Eysturoy | Sunda sløkkilið | • Sunda kommuna | • Hósvík<br>• Hvalvík<br>• Streymnes<br>• Saksun<br>• Nesvík<br>• Langasandur<br>• Haldórsvík<br>• Tjørnuvík<br>• Oyrarbakki<br>• Oyri<br>• Norðskáli<br>• Gjógv |
| Eysturoy | Eiðis sløkkilið | • Eiðis kommuna | • Eiði<br>• Svínáir<br>• Ljósá |
| | Skálafjarðar sløkkilið | • Nes kommuna<br>• Sjóvar kommuna<br>• Runavíkar kommuna | • Funningur<br>• Funningsfjørður<br>• Elduvík<br>• Oyndarfjørður<br>• Skálafjørður<br>• Skála<br>• Innan Glyvur<br>• Strendur<br>• Kolbeinagjógv<br>• Morskranes |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | • Selatrað<br>• Skipanes<br>• Lambareiði<br>• Lamba<br>• Glyvrar<br>• Saltangará<br>• Runavík<br>• Saltnes<br>• Toftir<br>• Nes<br>• Æðuvík<br>• Rituvík |
| | Sløkkiliðið í Eysturkommunu | • Eysturkommuna | • Leirvík<br>• Norðargøta<br>• Syðrugøta<br>• Gøtugjógv<br>• Undir Gøtueiði |
| | Fuglafjarðar sløkkilið | • Fuglafjarðar kommuna | • Fuglafjørður<br>• Kambsdalur<br>• Hellurnar |
| Borðoy, Kunoy, Viðoy, Kalsoy, Svínoy & Fugloy | Klaksvíkar sløkkilið | • Klaksvíkar kommuna<br>• Kunoyar kommuna<br>• Hvannasunds kommuna<br>• Viðareiðis kommuna<br>• Fugloyar kommuna | • Klaksvík<br>• Norðoyri<br>• Ánirnar<br>• Haraldssund<br>• Kunoy<br>• Syðradalur<br>• Húsar<br>• Mikladalur<br>• Trøllanes<br>• Norðtoftir<br>• Depil<br>• Norðdepil<br>• Múli<br>• Hvannasund<br>• Fossánes<br>• Viðareiði<br>• Svínoy<br>• Kirkja<br>• Hattarvík |

## *Fylgiskjal 10: Strikumynd – Oljubasing á sjónum*



# *Fylgiskjal 11: Kreppustýring í Føroyum*




*Mynd: Kreppustýringin í Føroyum. Grøni geirin lýsir skipan í sambandi við tilburðir á landi, blái geirin lýsir skipan í sambandi við tilburðir á sjónum, og reyði geirin lýsir tvørfakliga samstarvið á operativum (stýrandi) og strategiskum (ráðandi) stigi.*